# GERÐABÓK

**Dato:** 04. juni 2026 **Kl**. 16:00
**Stað:** Býráðssalurin
**Málsnr:** 173/26-200/26

**FUNDARLEIÐARI:**
Elsa Berg

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Heðin Mortensen
Heidi Lava Elgeirsdóttir
Annita á Fríðriksmørk
Anja Weyhe
Kristianna Winther Poulsen
Bergur Robert Dam Jensen
Guttormur í Skála
Annfinn Brekkstein
Tróndur Sigurðsson
Høgni Vilhelmsen
Birgir Nielsen
Súna Mørk

**LUTTÓKU EISINI:**
Eyðfríð Jacobsen
Fríður P. Dalsgarð
Hermann Mortensen
David Andresen
Jeanette Ellefsen Blaasvær
Mortan Simonsen
Øssur Patursson

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Jóan Petur Hentze

**PROTOKOLLFØRARI:**
Olga Knudsen/Anna Brekku Havmand

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | | Blað nr.: 634<br>Forkvinnunnar merki: |

**Innihaldsyvirlit** **Síða**

**Til viðgerðar**


| | | | |
|---|---|---|---|
| 173/26 | 26/04660-1 | Kári Johansen berst frá at møta á býráðsfundi 4. juni 2026 | 636 |
| 174/26 | 26/00448-1 | Mál beind í nevndir 2026 | 637 |
| 175/26 | 26/00943-1 | M.A. Jacobsens virðislønir - endurskoðan 2026 | 639 |
| 176/26 | 26/03666-1 | Oyggjaleikir - íløgutørvur 2026 | 645 |
| 177/26 | 25/00478-2 | Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi - 14/04756 | 647 |
| 178/26 | 25/01117-1 | Umvæla gamla Argja skúla til frítíðartilboð hjá 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gula skúla - 24/07481 | 649 |
| 179/26 | 25/05986-1 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924 | 653 |
| 180/26 | 25/02390-2 | Víðkan av kirkjugarðinum í Kollafirði | 665 |
| 181/26 | 26/03062-6 | Nýggjur skrivstovubygningur til Moldgoymsluna í Húsahaga | 669 |
| 182/26 | 25/06251-6 | Spælipláss í Nólsoy, matr. nr. 107c | 672 |
| 183/26 | 25/00954-1 | Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið | 675 |
| 184/26 | 25/01086-2 | Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina | 684 |
| 185/26 | 25/01100-7 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22/00590 | 695 |
| 186/26 | 25/01104-1 | Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað | 709 |
| 187/26 | 26/00563-3 | Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 39e og 39f, Argir. Frá A1 til A4 | 718 |
| 188/26 | 25/03896-1 | Parkeringspláss við omankoyringina til Hvítanes | 720 |
| 189/26 | 25/08052-1 | Útstykkingarvegur á matr. nr. 203c í Kollafirði | 725 |
| 190/26 | 25/11126-3 | Parkeringsskipan | 729 |
| 191/26 | 25/01181-1 | Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK - innkomuveg - 21/02196 | 733 |
| 192/26 | 26/03662-2 | Nýggjur economiser til Brennistøðina | 735 |
| 193/26 | 26/03040-2 | Nevndarlimur Visit Tórshavn 2026 | 738 |
| 194/26 | 25/09219-3 | Leigumál. Kommunan leigar lendi til Transformarastøð. SEV. Øki á Bøllureyni. matr.nr. 139a, Tórshavn. | 740 |
| 195/26 | 26/03680-5 | Sandsølan á Sundi ( Sandship ) : Umsókn um at víðka leiguøki á Sundi | 743 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 635<br><br>Forkvinnunnar merki: |


| | | | |
|---|---|---|---|
| 196/26 | 26/03494-2 | Brúksvatn til Stórutjørn | 745 |
| 197/26 | 26/02479-1 | Framflytingar fyri roknskaparárið 2025 | 747 |
| 198/26 | 26/00100-1 | Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026 | 750 |
| 199/26 | 25/11095-1 | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 753 |
| 200/26 | 25/00153-1 | Nýtt felagshús til FC Hoyvík og heildarætlan fyri økið - 23/05602 | 757 |

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 636 |
| | Forkvinnunnar merki: |

**Til viðgerðar**

## 173/26 Kári Johansen berst frá at møta á býráðsfundi 4. juni 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 173/26 | 26/04660-1 |

**Málslýsing**
Kári Johansen hevur boðað frá, at honum berst frá at møta til býráðsfundin.

Sambært § 18, stk. 3, í kommunustýrislógini ger býráðið av, at treytirnar fyri innkallan av tiltakslimi, ið er Súna Mørk eru loknar.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Tikið til eftirtektar.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 637<br>Forkvinnunnar merki: |

# 174/26 Mál beind í nevndir 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 3/26 | 26/00448-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 26/26 | 26/00448-1 |
| 3 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 73/26 | 26/00448-1 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 104/26 | 26/00448-1 |
| 5 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 174/26 | 26/00448-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Tikið til eftirtektar.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Framlagt.

# 175/26 M.A. Jacobsens virðislønir - endurskoðan 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 09.03.2026 | 45/26 | 26/00943-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 15.04.2026 | 50/26 | 26/00943-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 06.05.2026 | 75/26 | 26/00943-1 |
| 4 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 175/26 | 26/00943-1 |

**Upprunin til málið**
Samtykt í mentamálanevndini 24. juni 225

**Lýsing av málinum**
Tórshavnar býráð letur á hvørjum ári fylgjandi mentanarvirðislønir:

*Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs (her kunnu tvær virðislønir latast)*

*M. A. Jacobsens virðisløn fyri*
*- fagurbókmentaligt verk*
*- yrkisbólkmentaligt verk*
*- annað mentanaravrik*

Sum umrøtt á undanfarnum fundi í mentamálanevndini, hevur Rithøvundafelag Føroya ført fram ynski um at broyta virðislønirnar sum fylgjandi:

1. 3 ella fleiri uppskot verða tilnevnd á hvørjum ári, áðrenn ein vinnari verður valdur. Hesar verða kunngjørdar uml 3 mánaðir áðrenn handanina, fyri at skapa størri uppmerkemi um virðislønirnar og harvið eisini bøkurnar/rithøvundarnar.
2. At barnamentanarheiðurslønin verður broytt til eina barna- og ungdómsbókmentavirðisløn – tvs. at hon verður avmarkað til einans at fevna um bómentir, men víðka til at fevna um ungdóm eisini.
3. At Mentanarvirðisløn M.A. Jacobsens verður til Bókmentanarvirðisløn M.A. Jacobsens
4. At broyta viðtøkur fyri annað mentanaravrik til eisini at umfata barnamentan.

Arbeiðið við mentanarvirðislønunum er í løtuni skipað soleiðis:

- Ráðgevi á Stjórnarskrivstovuni tekur sær av tí praktiska viðvíkjandi handanini o.ø.
- Býarbókavørðurin hevur ábyrgd av at skipa arbeiðið fyri nevndina fyri M.A. Jacobsens virðislønir.
- Barnabókavørðurin hevur ábyrgd av at skipa arbeiðið fyri nevndina fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs.

Hesi hava tætt samstarv og samskifti sínamillum.

Tvær nevndir eru – ein fyri M.A. Jacobsen's virðislønir og ein fyri Barnamentanarheiðurslønina. Tær eru mannaðar soleiðis:

| | |
|---|---|
| M.A. Jacobsen: | 1 limur fyri Rithøvundafelag Føroya<br>1 fyri Fróðskaparsetur Føroya<br>3 fyri Tórshavnar býráð. |
| Barnamentanarheiðurslønin: | Forfólkið í mentamálanevnd Tórshavnar býráðs<br>Barnabókavørðurin á Býarbókasavninum |

1 skúlabókavørður í TK
2 limir valdir av Tórshavnar býráð.

Umsitingin hevur havt fundir við Ráðgeva á Stjórnarskrivstovuni umframt býar- og barnabókavørðarnar um viriðslønirnar, har ynskini hjá Rithøvundafelag Føroya eisini vórðu viðgjørd. Niðanfyri er samandráttur av viðgerð og niðurstøðum.

Yvirskipað
Virðislønirnar hava stórt virði fyri mentanarlívið og eru høgt í metum. Tær fevna breitt – serliga við virðislønini fyri mentanaravrik. Hækkaða virðislønaupphæddin er kærkomin og tíðarhóskandi.

M.A. Jacobsen var bókavørður og málkønur, og tískil er hóskandi, at virðislønirnar framhaldandi í høvuðsheitum taka støði í bókmentum og føroyska málinum.

Talið og sløgini av virðislønum er hóskandi, tó at mett verður, at tað ikki er neyðugt við tveimum virðislønum til barnamentan, tí mongdin av tilfari, sum kemur út á hvørjum ári ikki er so stór. Heldur skal man víðka virðislønina til at fevna um ungdómsmentan eisini (sum skal koma fram í heitinum), og broyta reglugerðina soleiðis, at tað ber til at lata virðislønina til antin barna- og ungdómsbókmentir (hetta verður raðfest hægst) ella barna- og ungdómsmentan.

Hyggur tú eftir øðrum virðislønum innan list og mentan í Føroyum, so finnast m.a. hesar:

- FMA, sum er til tónleik (tó her er einans talan um standmynd og onga peningaupphædd)
- Geytin, sum er filmsvirðisløn, sum TK letur eina av tveimum virðislønum til – upphæddin er 40.000kr umframt ein standmynd
- Mentanarvirðislønir landsins - her er talan um allar listagreinar og upphæddirnar fevna frá 50.000-150.000kr.
- Lesaravirðislønin, sum er til bókmentir. Størstu fólkabókasøvnini í landinum, herundir eisini Býarbókasavnið, skipa fyri hesari, og hon er 30.000kr. Tað er tann bókin, sum er vorðin útlánt mest, sum vinnur lesaravirðislønina á hvørjum ári.

M.A. Jacobsens virðislønir hóska væl inn í hesa heildina. Ritlist er kanska ein av teimum listagreinunum, sum tað er truplast at liva av – serliga í einum lítlum marknaði, sum í Føroyum – og tí er tað hóskandi at hava eina virðisløn við eini peningaupphædd, sum í stóran mun er til ritlistina. Eisini hevur tað eyðsýndan týdning fyri føroyska málið, at føroysk ritlist verður viðurkend og fær uppmerksemi.

Fyri Tórshavnar kommunu, sum er kommunan har flest listafólk innan allar listagreinar búgva og virka, hevur tað tó eisni týdning at kunna heiðra avrikum innan aðrar lista- og mentanargreinar og tískil er hóskandi at hava virðislønina fyri mentanaravrik við.

Heitini á virðislønunum
Tað, at virðislønirnar hava ymisk heiti, kann gera marknaðarføringina eitt sindur trupla. Mælt verður til at broya heitið á barnamentanarvirðislønin til at eisini vera eina M.A. Jacobsens virðisløn, soleiðis at heitini verða

M. A. Jacobsens virðisløn fyri
- fagurbókmentaligt verk
- yrkisbókmentaligt verk
- mentanaravrik
- barna- og ungdómsbókmentir*

*kann eisini verða latin sum virðsløn fyri barna- og ungdómsmentan.

Tað vil siga at lýsast kann við at “M.A. Jacobsens virðislønir verða handaðar” og ikki “handan av virðislønum M.A. Jacobsens og barnamentanarvirðisløn Tórshavnar býráðs”.

<u>Tilnevningar</u>
Mett verður ikki, at tað er skynsamt at gera tilnevningar til hesar virðislønirnar. Orsøkirnar eru í høvuðsheitum hesar:

- Bókmentalandslagið er lítið og royndirnar hjá bókavørðunum vísa, at har ikki altíð eru nóg nógvir góðir kandidatar til at man kann hava tilnevningar hvørt ár.
- Tilnevningar eru tíðar- og peningakrevjandi í mun til marknaðarføring og PR (um tær skulu tæna sínum endamáli) og kapasiteturin er ikki til hetta.
- Tilnevningar leggja eyka arbeiðsbyrðu og trýst á nevndirnar.
- Fleiri rithøvundar eru ikki glaðir fyri tilnevningar. Tað kann t.d. hava við sær at onkrir rithøvundar javnan verða tilnevndir (tí teir geva út regluliga), men ongantíð vinna. Um so rithøvundurin takkar nei til at tilnevningina, kann tað merkja, at ein bók, sum kanska er ein upplagdur vinnari, endar við at ikki fáa virðislønina.
- Kappingarelementið av tilnevningum kann yvirskugga virðislønina.

Skal man sammeta við aðrar virðislønir í landinum, so eru M.A. Jacobsens virðislønir kanska meira at sammeta við Mentanarvirðislønir Landsins í tign og við tað, at tað er ein almennur myndugleiki, sum letur tær. Mentanarvirðislønir Landsins hava ikki tilnevningar.

Sammett verður ofta við Norðurlendsku ella Útnorður virðislønirnar í bókmentum, men munurin er, at tá tilnevna ymisk lond teirra kandidatar og so verður ein vinnari valdur.

Í mun til sjónligheit, so kann kommunan kanska heldur gera eitt størri PR arbeiði í mun til handanina, og eftirfylgjandi skipa fyri tiltøkum ella líkandi í samstarvi við mentanarstovnarnar. Sigast skal tó, at M.A. Jacobsens virðislønir vanliga fáa nógv uppmerksemi í miðlunum – t.d. sendir KVF vanliga beinleiðis frá virðislønunum.

<u>Nevndirnar og skipan</u>
Ynski er um, at nevndirnar framyvir eru fakliga settar heldur enn politiskt valdar. Av tí at ymiskur fakkunnleiki skal til fyri at meta um ymsu virðislønirnar, verður mælt til at seta tríggjar 3-fólka nevndir:

Nevnd fyri fagur- og yrkisbókmentir mannað av:

- Býarbókavørðinum, sum er forfólk,
- Umboði fyri Fróðskaparsetur Føroya
- Umboði fyri Rithøvundafelag Føroya

Nevnd fyri barna- og ungdómsbókmentir / barna- og ungdómsmentan mannað av:

- Barnabókavørðinum, sum er forfólk
- Umboði fyri skúlabókavørðarnar í kommununi
- Umboði fyri Rithøvundafelag Føroya

Nevnd fyri mentanaravrik

- Býarbókavørðurin, sum er forfólk
- Umboði fyri hinar mentanarstovnarnar hjá Tórshavnar kommunu
- Umboði uttanífrá – t.d. fyri LISA

Tey, sum umboða almennar stovnar fáa fundarpening, ímeðan umboð fyri yrkisfeløg ella líknandi eiga at fáa samsýning fyri luttøku sambært galdandi takstum.

Mentamáladeildin kundi hóskandi virkað sum skrivstova fyri virðislønirnar.

Tíðarskeiðið fyri nær bókmentaverk skulu verða útgivin fyri at verða tikin við í viðgerðina eigur at verða nágreinað í regluerðini.

| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 642 |
|---|---|
| | Forkvinnunnar merki: |

Virðislønahandanin

Virðislønahandanin er hátíðarlig og sømir sær virðislønunum. Mannagongdirnar í mun til hvør tekur samband við tey, sum skulu fáa virðisløn, og hvussu hetta samskiftið er, hava ikki altíð verið eins greiðar, og hetta eigur at verða greinað.

Um mentamáladeildin fer at virka sum skrivstova fyri virðislønina, eigur samskipanin av virðislønahandanini, sum í løtuni liggur hjá ráðgeva á stjórnarskrivstovuni, at verða gjørd í samstarvi við mentamáladeildina.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Reglugerð fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs
Reglugerð fyri Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

25/00473 M.A.Jacobsens virðislønir: Uppskot frá Rithøvundafelagnum um broytingar - 23/03083
https://360.torshavn.fo/locator.aspx?name=Common.Details.Navigate&module=Case&subtype=12&recno=313427

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

Reglugerð fyri Barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs
Reglugerð fyri Mentanarvirðislønir M. A. Jacobsens

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | x | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | Játtast á: | |
|---|---|---|

| Deild | Verk-ætlan | Navn |
|---|---|---|
| | | |

| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
|---|---|---|---|
| | | | |

| Upphædd |
|---|
| |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla mentamálanevndini til at viðgera málið, og at umsitingin orðar nýggjar reglugerðir fyri M.A. Jacobsens virðislønir (herundir eisini barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býrðáðs) við støði í lýsingini omanfyri at leggja fyri mentamálanevndina til góðkenningar.

**Mentamálanevndin 09. mars 2026:** Útsett.

**Mentamálanevndin 15. apríl 2026:** Samtykt at einasta broyting, ið verður gjørd, er at broyta heitini á virðislønunum í reglugerðunum.

**Ískoyti 6. mai**
Viðheft er uppskot til dagførda reglugerð fyri M.A. Jaobsens virðislønir.

Í uppskotinum er heitið á barnamentanarheiðursløn Tórshavnar býráðs broytt til M.A. Jacobsens virðisløn fyri barnamentan, eins og samtykt, og reglugerðin fyri hesa virðislønin er skrivað inn í reglugerðina fyri M.A. Jacobsens virðislønir. Sostatt hava vit eina reglurgerð fyri M.A. Jacobsens virðislønir heldur enn tvær. Verandi reglugerðir fara tískil úr gildi.

Umframt broytingina omanfyri, er reglugerðin dagførd við hesum punktunum fyri at endurspegla praksis:

- Tað er skrivað inn í reglugerðina, at býarbókavørðurin er skivari fyri nevndina, sum tekur sær av fagurbókmentum, yrkisbókmentum og øðrum mentanaravriki, og at skrivarin kallar nevndina inn. Áður stóð at býráðsvaldu limirnir skuldu kalla inn, men í praksis hevur hetta verið býarbókavørðurin.
- Í undanfarnu reglugerð stendur, at virðislønirnar verða latnar á føðingardegi M.A. Jacobsens, sum er 17. september. Hetta verður ikki altíð hildið, og tískil er orðingin “ella annan hóskandi dag um heystið” løgd afturat.
- Heitini á einstøku virðislønunum eru útgreinað.
- Smærri málsligar dagføringar eru eisini gjørdar.

**Tilmæli:**
Mentanmálaleiðarin og trivnaðarstjórin mæla til at samtykkja dagførdu reglugerðina og beina málið í býráðið.

**Mentamálanevndin 06. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

| | Býráðsfundur<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 644<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 645<br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 176/26 Oyggjaleikir - íløgutørvur 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.05.2026 | 70/26 | 26/03666-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 111/26 | 26/03666-1 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 176/26 | 26/03666-1 |

**Upprunin til málið**
Oyggjaleikir 2027.

**Lýsing av málinum**
Í samb. við Oyggjaleikir 2027, hava fleiri ítróttargreinirnar tørv á útgerðini, sum skal brúkast til Oyggjaleikir.
Tey ynskja útgerðina í ár, tí tey m.a. hava onkrar kappingar í ár, og so kunnu tey á henda hátt venja seg við útgerðina.

Talan er um fylgjandi:

- Borðtennis hevur brúk fyri borðunum og netunum. Kostnaðarmeting 100.000 kr. u/mvg (16 borð o.a.)
- Kurvabóltur hevur brúk fyri fýra kurvum. Kostnaðarmeting 416.000 kr. u/mvg
- Judo hevur brúk fyri tekniskari útgerð. Kostnaðarmeting 40.000 kr. u/mvg
- Timelap skipan til súkkling/triathlon. Kostnaðarmeting 110.000 kr. u/mvg
- FÍF, kastibúður forstyrkjast og net. Vit vita ikki kostnaðin enn.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís øki í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 646<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 5775 | LK57040 | Gundadalshøllin |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 5775 | | Oyggjaleikir 2027 | Ja |

| Upphædd |
|---|
| 850.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 850.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026/2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til:

- at flyta 850.000 kr. av kt. 5775 LK57040 (Gundadalshøllin) á nýggja projektkonto til Oyggjaleikir 2027.
- at leggja málið fyri Býráðið umvegis Fíggjarnevndina
- at 850.000 kr. verða játtaðar aftur til Gundadalshøllina á fíggjarætlanini 2027, so høllin kann klárgerast til Oyggjaleikir 2027.

**Mentamálanevndin 06. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, treytað av at peningurin verður játtaður aftur til Gundadalshøllini á fíggjarætlanini 2027.

At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 177/26 Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi - 14/04756

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 06.05.2026 | 77/26 | 25/00478-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 110/26 | 25/00478-2 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 177/26 | 25/00478-2 |

**Upprunin til málið**
Mál 14/04756 Tórshavnar Golfklubbi: Umsókn um stuðul til byggjan av golfvølli og felagshúsi

**Lýsing av málinum**
Ætlan fyri menning av golfvøllinum og felagsumstøðunum hjá limum fyriliggur í málinum.
Tøk játtan á kr. 2.000.000,00 er til endamálið á kt 5775 LK57016.

Við fíggingini frá TK, eru hesar fýra høvuðsætlanirnar í umbúna:

1) Framhald av ætlanini at gera eina “driving range”. Kr. 450.000.
2) At gera ein royndargrønu á dyrkaða lendinum uttanfyri seyðahúsinum (í samsvar við ætlanini hjá Edwini; Nýtt hol 1). Kr. 520.000.
3) At gera nýtt hegn og hampa um tað verandi. Kr.75.000.
4) At gera lendisgøtur (Bindur vøllin saman í eina gøtuskipan sum kann brúkast til gongufólk, fólk sum skulu viðlíkahalda, og spælarar sum hava tørv á at ganga við golfvogni til golfútgerðina). Kr. 955.000.

Ætlanin er at rinda Tórshavnar golfklubba upphæddina sum skjótast, so felagið fær sett verkætlanina í gongd.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd** **Ja** ☐ **Nei** ☐

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 648 |
| | Forkvinnunnar merki: |

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

## Játtan:

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57016 | Golfvøllur | 5775 | | Golfvøllur | | 2.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin og mentamáleiðarin mæla til

- At játta 2.000.000 kr. av kt 5775 LK 57016 til nýggja løgujáttan.
- at beina málið í Býráðið umvegis Fíggjarnevndina
- at rinda Tórshavnar golfklubba upphæddina sum skjótast, treytað av, at øll neyðug loyvi eru fingin til vega.

**Mentamálanevndin 06. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 178/26 Umvæla gamla Argja skúla til frítíðartilboð hjá 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gula skúla - 24/07481

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 11.02.2026 | 14/26 | 25/01117-1 |
| 2 Trivnaðarnevndin | 12.02.2026 | 10/26 | 25/01117-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 16/26 | 25/01117-1 |
| 4 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 33/26 | 25/01117-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 18.05.2026 | 82/26 | 25/01117-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 27.05.2026 | 132/26 | 25/01117-1 |
| 7 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 178/26 | 25/01117-1 |
| 8 Mentamálanevndin | | | 25/01117-1 |

**Upprunin til málið**
Flyta játtan í íløguætlanini 2026 til Heildaruvæling av Argja skúla til løgukonto

**Lýsing av málinum**

Í íløguætlanini 2026 er játtaðar 8 mió. kr. til heildarumvæling av Argja skúla.

Umsitingin hevur arbeitt við eini ætlan at heildarumvæla Argja skúla til frítíðartilboð til 3.-6. flokk og til at útvega Gula skúla fleiri undirvísingarhølir.

Kostnaðarmeting:
Leysliga kostnaðarmetingin er, at heildarumvælingin kostar 16 mió. kr.
Tekjan, fasadur og vindeygu skulu dagførast. Harumframt skal innrættingin av bygninginum dagførast við atlit til tørvin hjá frítíðartilboðnum og Gula skúla.
Fyrireikingarnar at dagføra bygningsskjólið eru farnar í gongd. Neyvari kostnaðarmeting fyriliggur, tá tilboð koma inn.

Tíðarætlan:
Ætlanin er at brúka játtanina í ár til at fyrireika arbeiðið og umvæla bygningsskjólið. Fyri at arbeiðið kann gerast liðugt, so mugu 8 mió. kr. afturat raðfestast á fíggjarætlanini 2027, so verður verkætlanin mest sannlíkt liðug í august 2027.
Niðanfyri er ein samandráttur av máli nr. 24/07481 “Umvæla gamla Argja skúla til frítíðartilboð hjá 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gula skúla”:

Mentamálanevndin samtykti tann 10. januar 2024, í máli nr. 23/06810, at arbeiða víðari við at skipa nýggj frítíðartilboð til børn og ung frá 3. flokki upp til 18 ár. Samtyktin er gjørd við støði í avgerð frá Barna- og Útbúgvingarmálaráðnum viðvíkjandi frítíðartilboðnum hjá Tórshavnar kommunu til 3. Flokk.

Eindarleiðararnir á Barna- og Ungdómsdeildini hava kannað møguligar staðsetingar av frítíðartilboðum til børn og ung frá 3. flokki upp til 18 ár.

Mælt verður til, at eitt frítíðartilboð verður staðsett í gamla Argja skúla á Argjavegi 32.
Talan er um ein bygning, sum Tórshavnar kommuna eigur.

| | Býráðsfundur<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 650 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

Mentamáladeildin upplýsir, at Guli skúli brúkar kjallaran í niðasta parti av gamla Argja skúla til smíðstovu og eina stovu til súkkluverkstað. Skúlin sær møguleika fyri samnýtslu av hesum hølum við eitt møguligt frítíðartilboð.

Mentamáladeildin og leiðslurnar í Gula skúla og í Lonunum síggja góðar møguleikar í at høvuðsumvæla gamla Argjaskúla til frítíðartilboð og skúlabrúk.

Barna- og ungdómsdeildin og Mentamáladeildin hava gjørt eitt upprit við tørvslýsing hjá frítíðar- og skúlatilboðið í gamla Argja skúla.

Í oktober 2024 samtyktu Mentamálanevndin og Trivnaðarnevndin at taka undir við tørvslýsingini og at taka við í FÆ 2025. Nevndin heitir á byggi- og býarskipanarnevndina um at gera uppskot um at gera uttanum økið, sum ein miðdepil.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Bygningurin verður ikki brúktur nógv í løtuni. Guli skúli brúkar niðastu hølini í norður endanum á bygninginum til smíðstovu og súkkluverkstað. Suður endin á bygninginum verður brúktur til AA-fundir.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- 24/07481 Upprit við tørvslýsing hjá frítíðar- og skúlatilboðið í gamla Argja skúla (Skjal nr 4)
- 24/07481 Umvæla gamla Argja skúla til frítíðartilboð hjá 3.-6. flokk og undirvísingarhølir hjá Gula skúla

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| Umsitingaravleiðingar | | | | |
| Umhvørvisavleiðingar | | | | |
| Møgulig frávik/lættar frá ásetingum | | | | |
| Sosialar avleiðingar | | | | |
| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒

| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 651<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

Eyka játtan ☐

Lokað verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 4175 | LK41021 | Heildarumvæling av Argja skúla |

| **Játtast á:** | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 4175 | | | Heildarumvæling av Argja skúla |

| **Upphædd** |
|---|
| 8 mió. |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður | Upphædd: | 16 mió. kr |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 til xxxx |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | Ókent |

**Tilmæli**:
Trivnaðarstjórin, tekniski stjóri, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina, deildarleiðarin fyri Mentamáladeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at flyta 8 mió. kr. av LK41021 á nýggja løgukonto til endamálið.

At beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 11. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Trivnaðarnevndin 12. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Kristianna Winther Poulsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Samtykt at taka undir við trivnaðarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Fýra feløg vóru innboðin at geva tilboð uppá at skifta klimaskermin á gamla Argja skúla. Feløgini vóru Eysturlon, Búsetur, HVT og Valaverk. Øll fýra feløg lótu tilboð inn.
Lægsta tilboð átti HVT.

Umsitingin hevur kannað tilboðini, og lagt uppskot til sáttmála fyri HVT. Partarnir eru samdir um innihaldi í sáttmálanum og umsitingin mælir til at sáttmálin verður gjørdur.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 652<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, deildarleiðarin fyri Barna- og ungdómsdeildina, deildarleiðarin fyri Mentamáladeildina og deildarleiðarin fyri Bygningsdeildina mæla til at gera arbeiðstøkusáttmála við HVT og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. mai 2026:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bergur Robert Dam Jensen, atkvøður blankt.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2026:** Samtykt at taka undir við meirilutanum í mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 179/26 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum - 21/02924

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 04.06.2025 | 77/25 | 25/05986-1 |
| 2 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 90/25 | 25/05986-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 135/25 | 25/05986-1 |
| 4 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 184/25 | 25/05986-1 |
| 5 Býráðsfundur | 23.10.2025 | 220/25 | 25/05986-1 |
| 6 Mentamálanevndin | 23.02.2026 | 36/26 | 25/05986-1 |
| 7 Fíggjarnevndin | 25.02.2026 | 53/26 | 25/05986-1 |
| 8 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 68/26 | 25/05986-1 |
| 9 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 76/26 | 25/05986-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 99/26 | 25/05986-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 60/26 | 25/05986-1 |
| 12 Mentamálanevndin | 18.05.2026 | 81/26 | 25/05986-1 |
| 13 Fíggjarnevndin | 27.05.2026 | 131/26 | 25/05986-1 |
| 14 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 179/26 | 25/05986-1 |

**Upprunin til málið**

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 654<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Tekstur og tilfar kemur áðrenn fundin.

**Mentamálanevndin 04. juni 2025:** Tikið av skrá.

**Ískoyti:**
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| | | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 2.251.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 2.251.000 |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 71.185.391,65 |
| Áður játtað | Upphædd: | 68.935.343,38 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Mál til viðgerðar: 25/05986 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum**
Fleiri avleiddar verkætlanir eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sum verða lýst niðanfyri. Talan er í høvuðsheitum um hesi arbeiði:

**Uttandura arbeiði**
*Stuðlaveggur,* sí skjal 1 & sí skjal A-C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6
*Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll,* sí skjal 2, j.nr. 25/05986-7
*Gøta, trappa í lendi og tvey portur til FIFA vøll,* sí skjal 2 j.nr. 25/05986-7 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-8
*Klæðing av rimaverki, sí skjal 2B, j.nr. 25/05986-9*
*Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum á Argjum, veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10*
*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður,* sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

**Innandura arbeiði í verandi stovni**
*Køkur*

*Umbygging í verandi stovni*
*Skilaveggir, ovnar, køliskáp o.a.*
*Hæve/sænkeborð – broyting av skiftirúmum*
*Annað*
*Stuðlaveggur*
Avbjóðingar hava verið við lendisviðurskiftum og uttanumøkinum á eystanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Stórur hæddarmunur hevur verið við ovara benið og vegin. Fyri at økið kann vera trygt og at arbeiðið ikki verður steðgað upp hjá báðum arbeiðstakarum á staðnum, Búsetur og RTS, hevur verið neyðugt gera eykaarbeiðið á stuðlavegg framvið vegnum mótvegis økinum við Dagstovnin á Hamrinum. Umsitingin hevur verið í samráðingum við arbeiðstakaran, RTS, um at gera stuðlaveggin við uttanumøkið hjá Dagstovninum á Hamrinum, tí stuðlaveggurin liggur á arbeiðsøkinum hjá RTS. RTS hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið at gera stuðlavegg á 50 m, sum 2m høgur og 20cm tjúkkur, íroknað fundament til stuðlavegg 50 m x 0,4 m x 0,4 m. Verkætlanin L31011 hevur fyribils fíggjað hetta arbeiðið, sí skjal 1, skjal 1A, skjal 1B, skjal 1C, j.nr. 25/05986-3, 25/05986-4, 25/05986-5 og 25/05986-6.

Samlaður prísur fyri at hava gjørt hesi arbeiðið er áljóðandi tls.

| | |
|---|---|
| Tilboð á stuðlavegg (RTS) | 349.260,00 u/mvg |
| Prosjektering (LBF) | 20.366,75 u/mvg |
| Kvalitetsikring/eftirlit (LBF) | 5.205,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **374.831,75 u/mvg** |

*Umbygging og nýtsla av FIFA vølli við Dagstovnin á Hamrinum.*
Dagstovnurin á Hamrinum hevur tørv á at fáa eina loysn viðvíkjandi málinum um FIFA vøllin.
Manglandi atgongd til sparkivøllin skapar eina ótrygga støðu, tá skúlabørn skulu á vøllin í fríkorterum og tá børn í frítíðini spretta net meskarnar í málinum upp fyri at fáa atgongd. Tí er bráðfeingistørvur at fáa loysn á málinum.

Skúlin á Argjahamri hevur havt tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum.

Børnini í grannalagnum hava eisini tørv á eini høgligari leið inn á sparkivøllin, sum er trygg í mun til virksemi hjá dagstovninum. Byggiprosjekt er sum nú er á staðnum, har byggihegn er sett rundanum vøllin og spælisplássið hjá dagstovninum er flutt, soleiðis at eingin atgongd er til vøllin, uttan gjøgnum høvuðsportrið til dagstovnin.

Umsitingin hevur verið í samskifti við Eigarafelagið á Hamrinum, sum FIFA vøllurin av fyrstani tíð hevur verið bygdur/ætlaður til. Loysnin á málið verður, at tá ið byggiprosjektið er liðugt verður rás, trappa í lendi og tvey portur eystanfyri FIFA vøllin gjørt til børnini á dagstovninum og hjá børnum í grannalagnum annars at nýta um kvøldarnar og í frítíðini sum heild, tá ið stovnurin er stongdur, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8

Eigarafelagið uppi á Hamrinum hevur viðmerkingar at bøta skaðan á verandi hegn rundanum og gera tvey portur, rás, trappu í lendi, sum framvíst, er ein nøktandi loysn.
Eigarafelagið viðmerkir kortini, at vøllurin ikki er í góðum standi, og at vøllurin tíðum er dekkaður við sandi í pørtum av vøllinum, soleiðis at mann ikki kann brúka vøllin. Ynskið er at fáa nýtt graslíki á vøllin og at ein betri loysn verður funnin við at eingin sandur kemur á vøllin, ella í munandi minni mát. Umsitingin hevur kannað málið saman við arbeiðstakaranum og er komin til ta loysn at skerma vøllin betri av frá plássinum við at klæða rimaverkið, soleiðis at børnini ikki sleppa at koyra sand inná vøllin, sí skjal 2B_Klæðing av rimaverki, j.nr. 25/05986-9.

Umsitingin somuleiðis biðið um tilboð á veiting og álegging av graslíki/undirlendi íroknað, sí skjal 2C, j.nr. 25/05986-10.

*Afturbøting av verandi hegni við FIFA vøll*
Verandi hegn rundanum FIFA vøllin varð skatt í vetur. Umsitingin hevur biðið Búsetur kannað málið, hvat ið skilabest er at gera. Búsetur boða frá, at hegnið rundanum er sera høgt og viðbrekið og tað ber illani til at dimensionera og uppbyggja eitt fundament, sum tolir føroyska veðurlagi, tá ið hegni er somikið høgt. Fyri stoyping stórum fundamentum mugu gerast størri inntriv á vøllin og økið annars. Búsetur leggur upp til at seta skrástívarar í, afturbøta verandi pelar og at lækka hegni í til 4 metrar, sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

*Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki við garði/stakitti*
Ynski er frá stovninum at fáa avskerma vøggustovuøkið og barnagarðsøkið við garði. Hetta hevur ikki verið við í prosjektinum. Búsetur hevur veitt tilboð á hetta arbeiðið, áljóðandi 76.053,00 u/mvg, sí skjal 3, j.nr. 25/05986-11

Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur at veita eitt samlað tilboð á ymisk arbeiðið við FIFA vøllin, sí sí skjal 2 & skjal 2A, j.nr. 25/05986-7 og 25/05986-8.

| | |
|---|---|
| Gera gøtu, trappu í lendi og tvey portur til FIFA vøll: | 106.024,00 u/mvg |
| Skifta brotnar pelar og lækka hegn til 4 m. við FIFA vøll: | 108.000,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | **261.614,24 u/mvg** |

**Innandura arbeiði**
Umsitingin hevur verið í samráð við Búsetur um at gera eina samlað loysn og heildartilboð á tilbygging av køki og goymslu í verandi stovni, veiting og montering av nýggjum av køki, ymiskum eykaarbeiði í verandi stovni. Hetta arbeiðið umfatar:

- Verandi veggur við køk verður niðurtikin og berandi límdrakari verður bygdur ístaðin
- Nýggjur køkur sum víst í prinsippi í hjáløgdu skitsu. Ovnar (1 industri + 1 vanligur), 2 kóki plátur á 80 cm uml, og avtrekk verður á somu síðu uttan til høgru, sum verandi.
- Eymhetta/ur skulu monterast í loft.
- Industri vaskimaskina - flutt út mótvegis útiveggi. Vask verður eftir flutt út mótvegis útveggi.
- Rustfrí borðpláta.
- Niðurtøku av verandi foldiveggi og umgerð av goymslurúmi.
- Nýggj høg skáp úr góðari góðsku v/foldivegg.
- Avmontering og eftirmontering av radiatori v/rørføringum.
- Í køkstilboðnum skal prosjektering av køkim´samskifti skal gerast av professionellum køksveitara - alt neyðugt samskifti til brúkarans krøv og ynski (eftirjusteringar) av hyllum skáp við øllum, sum hartil hoyrir - skal verða íroknað
- Yvirskáp ynskjast ikki men heldur góðar hyllar og høgskáp(serliga í trýkantinum, har sum ovnar eru)
- Eitt køliskáp skal vera undir borðinum nær við oynna
- 4 nýggj frystiskáp
- Køliskáp og ovnar í stovunum í verandi stovni
- Fleiri gardropur í verandi stovni í sambandi við, at stovnurin verður broyttur frá vøggustovu til barnagarðsstovu
- Broytingar av borðum og vøskum o.a.
- Veiting og montering av skilaveggjum millum w.c. kummur. BH ynskir tilboð á avmontering/flyting av vaski(flutt-stillað hægri), veiting og montering av nýggjum kranum í vøskum, burturtakan av einum skiftiborð við vaski og veiting og montering av nýggjari borðplátu.

- Broytingar í skiftirúmum. 2 hæve/sænkeborð til 4 vøggustovur, somuleiðis ynskir mann eyka funktiónir inn í skiftirúmini fyri 4 vøggustovur.
- Skilaveggir / spanskveggir
- Nýggj køliskáp og ovn í tveimum stovum í verandi stovni
- Starvsfólkarúm
- Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

Búsetur hevur veitt samlað tilboð á hesi arbeiði, sum er áljóðandi: 975.776,00, sí skjal 4, j.nr. 25/05986-12

**Samlað fígging**
Samlað fígging til avleiddar verkætlanir, ið eru íkomnar rundanum økið við Dagstovnin á Hamrinum, sí skjal 5, j.nr. 25/05986-13.

**Uttandura arbeiði**

| | |
|---|---|
| Stuðlaveggur | 374.831,75 u/mvg |
| Ymiskt við FIFA vøll | 261.614,24 u/mvg |
| Avskerming av vøggustovuøki og barnagarðsøki, garður | 86.153,00 u/mvg |
| Skjal 2B_Klæðing av rimaverki | 30.000,00 u/mvg |
| Skjal 2C_Tilboð Graslíki á Dagstovninum á Hamrinum | 196.800,00 u/mvg |
| Til samans uttan mvg. | 949.398,99 u/mvg |

**Innandura arbeiði**
*Skiftirúm – puslirúm*
*Starvsfólkarúm*
*Klárgera rúm til nýggjan køk*
*Nýggjur køkur*
*Hvítvørur til nýggjan køk*
*Barnagarður í verandi stovni*
*Flyta gardropuskáp*
*Nýggj gardropuskáp*
*Flyta vaskirennur*
*Nýggj w.c. kumma*
*Spanskveggir*
Tilhoyrandi timburarbeiði, el arbeiði, hvs arbeiði, málaraarbeiði.

| | | |
|---|---|---|
| Til samans uttan mvg. | 975.776,00 | u/mvg |

| | | |
|---|---|---|
| Samlað fyri innandura og uttandura arbeiði u/mvg | 1.925.174,99 | u/mvg |
| Ókendar útreiðslur | 192.517,50 | u/mvg |
| Til samans uttan mvg | 2.117.692,49 | u/mvg |
| **Til samans við mvg (6,25%)** | **2.250.048,27** | **v/mvg** |

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- at tikið verður undir við fyriliggjandi tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri

- At játtaðar verða 2.251.000 kr. á Løgukonto L31011, Útbygging – Dagstovnurin á Hamrinum. Fíggjað av tøkum peningi frá 2024.
- at tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum við tí nágreining, at fíggingin verður játtað av meirinntøkum fyri 2024.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Býráðsfundur 23. oktober 2025:** Kári Johansen skjýtur upp at bjóða arbeiðið út.

Fyrst varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Kára Johansen.

Fyri atkvøddu: Sunnuva Dahl Høgfeldt, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen, Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Í móti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk og Guttormur í Skála.

5 atkvøddu fyri og 8 atkvøddu ímóti málinum, sum sostatt fall.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Annita á Fríðriksmørk, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Sunnuvá Dahl Høgfeldt.

Í móti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson og Kári Johansen.

Málið varð sostatt samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

## Ískoyti :
## Parkeringsøki

Upprunaliga var ætlað, at parkeringsøkið sunnanfyri Dagstovnin á Hamrinum skuldi verða boðið við verkætlanini Bónus og íbúðir á Hamrinum. Tilboðsveitarin á hesari verkætlan hevur boðað frá, at tey standa ikki við tilboð sítt. Hendan verkætlanin skal bjóðast út av nýggjum seinni. Parkeringsøkið er planerað og hevur verið nýtt sum skúrpláss og atkomu hjá Búsetur í byggitíðini í verkætlanini Dagstovnurin á Hamrinum. Nú sum Dagstovnurin á Hamrinum er um at vera liðugur, er neyðugt er at taka støðu til leist at gera eina fyribils loysn til parkeringsøkið sunnanfyri Dagstovnin á Hamrinum. Verkætlanin Dagstovnurin á Hamrinum má hava í minsta lagi 26 parkeringsbásar afturat, til tess at hava nøktandi parkerings- og somuleiðis atkomuviðurskifti.

Umsitingin hevur verið í samráðingum við verandi arbeiðstakara, P/F Búsetur, at standa fyri arbeiðnum at gera eitt fyribils parkeringspláss. Talan er um eitt tilboð á fínplanering, asfaltering av berilagi á økið og fyrireika avvatning og uppstriking av parkeringsbásum. Av tí at tung ferðsla kemur at virka til eina komandi verkætlan á Bónus og íbúðir á Hamrinum - og harvið slíta hetta økið verður bíðað við at asfaltera ovara slitlagið til seinni.

Búsetur hevur veitt tilboð at gera hetta arbeiðið áljóðandi:

**1.042.348,50** u/mvg

Ì hesum kostnaði eru soljóðandi postar:

Klárgering av p-øki við 0-32 skervur t=50mm:
Asfaltering av p-øki við Ab16, t=50 mm:
Avvatning
Garður 40 m
Kantsteinar uml. 80 m

**Fjarhiti**
Í verkætlanini er ikki settur kostnaður av til fjarhita. Umsitingin hevur funnið ein  leist at knýta fjarhitan í glyvursvegin. Umsitingin hevur fingið tilboð á fjarhita fingið tilboð á Grevstur og tyrving av fjarhita innføring frá glyvursvegnum til Dagstovnin á Hamrinum áljóðandi 149.480 u/mvg. Afturat hesum varð grivið frá fýrrúminum á nýggja Dagstovninum á Hamrinum og lagt fjarhitarør út í uttanumøki, soleiðis at kundi fáa ræsarúm at arbeiða. Avtalað er at Búsetur og TK deila kostnað 50/50 tí at byggskrá ikki fevndi um fjarhita, áljóðandi 29.328,00. Samlaður kostnaður á Fjarhita er áljóðandi:

149.480 u/mvg,
29.328 u/mvg
178.808 u/mvg

**Innbúgv**
Umsitingin hevur boðið út innbúgv til verkætlanina Dagstovnurin á Hamrinum.
3 tilboð komu inn:

| | |
| --- | --- |
| ELDING ELRISIN | 2.333.468,17 u/mvg. |
| INNVENTARTÆNASTAN | 1.760.014,40 u/mvg. |
| STOKHOLM | 1.617.197,12 u/mvg. |

Eftir sáttmálasamráðingar við vinnandi arbeiðstakara Stokholm vóru nakrar tillagingar gjørdar á verkætlanina. Endaliga tilboðið var áljóðandi: 1.695.815,92 u/mvg.

Ì útboðnum er somuleiðis øll leys útgerð, smá køksútgerð og allar smáar leikur íroknaðar. Hetta seinasta varð ikki við í upprunaligu kostnaðarmetingini. Settar vóru av 1.282.195,00. Munurin er sostatt 413.620,92 kr u/mvg, sum resta í.

**Ymiskt**
Ynski frá stovninum at fáa gjørt ymiskar tillagingar í verkætlanini Dagstovnurin á Hamrinum:

| | |
| --- | --- |
| KT Ùtgerð | 69.669,83 |
| Eyka leikur uttanumøki | 271.586,77 |

| | |
|---|---|
| Kurvar til garderobur | 11.340,00 |
| 6 Stk Quooker | 64.084,50 |
| Ymisk El eykaarbeiði | 87.985,52 |
| Samlað | 504.666,62 |

**Prís og lønarvøkstur**
Umsitingin hevur í sáttmálasamráðingum við Búsetur gjørt avtalu um, at Búsetur og Tórshavnar kommuna deila prís og lønarvøksturin í verkætlanini.

Ì heildararbeiðstakarasáttmála millum Tórshavnar kommuna og Búsetur stendur:
*Samlaða prísjavnanin frá 3. ársfjórðingi 2022 og frameftir, verður býtt við eini helvt til byggiharran, og eini helvt til arbeiðstakaran, bæði um javningin hevur við sær, at prísurin hækkar ella lækkar.*

Samlaða talið á prís og lønarvøkstur í verkætlanini er mett til áljóðandi 4.800.000 u/mvg. Hetta svarar til eina upphædd áljóðandi 2.400.000 u/mvg., sum Tòrshavnar kommuna skal gjalda í prís og lønarvøkstri í verkætlanini.

**Fígging**
Samlaði kostnaður á parkeringsøkið og prís og lønarvøkstur:

| | |
|---|---|
| Parkeringsøkið | 1.042.348,5 u/mvg |
| Fjarhiti | 178.808 u/mvg |
| Innbúgv – munur | 413.620,92 u/mvg. |
| Ymiskt | 504.666,62 u/mvg. |
| Prís og lønarvøkstur | 2.400.000 u/mvg |
| Samlað | 4.797.096 u/mvg |

Við 6,25% mvg er samlaði kostnaðurin at gera hetta arbeiðið:

4.823.159,29 v/mvg.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eyka játtan | ☐ |
| Lokað verkætlan | ☐ |

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 5775 | LK57047 | FC Hoyvík Felagshús og skýli | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 3.000.000 |

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 6875 | LK68999 | Kloakkir | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 1.050.000 |
| 2775 | L31020 | Tillagingar á dagstovnaøkinum | 3175 | L31011 | Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum | | 800.000 |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 4.850.000 mió |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 76.008.550,94 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

Ì mun til verkætlanina Dagstovninum á Hamrinum mælir umsitingin til, at uttanhýsis frágreiðing verður gjørd av byggi prosessini og galdandi reglugerðum og mannagongdum í samband við bygging.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin, mentamálaleiðarin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At tikið verður undir við fyriliggjandi kostnaðum og tilboðum, og at byggiarbeiðið verður sett í gongd eftir leisti, sum lýst omanfyri.
- At játtaðar verða 4.850.000 kr. til verkætlan L31011 á henda hátt:
    a. 3 mió. kr. verða játtaðar av Løgukarmi LK57047 FC Hoyvík Felagshús og skýli, undir konto 5775
    b. 1,05 mió. kr. verða játtaðar av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875
    c. 0,8 mió. kr. verða játtaðar av verkætlan L31020, Tillagingar á dagstovnaøkinum, undir konto 3175

- At umsitingin fær heimild at gera arbeiðssetning við uttanhýsis ráðgeva í samband við at gera eina frágreiðing í hesum málinum.

- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 23. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum, við tí broyting at fíggja verður við 1 mió. kr. av 3175 Dagstovna, frítíðarskúla og ungdómstilboð og 2 mió. kr. av 3175 Tillagingar á dagstovnaøkinum og 1 mió. kr. av Løgukarmi LK 57047 FC Hoyvík Felagshús og skýli, undir kontu 5775 og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 25. februar 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, samtykti at taka undir við mentamálanevndini, við tí broyting at

a. verður fíggjað við 1 mió. kr. av 2775 Eldradepilin í Kollafirði, 1 mió. kr. av kontu 3175 Tillagingar á dagstovnaøkinum, 1 mió kr. av kontu 6109 røkt av bygningum

b. 1,05 mió. kr. verða fíggjað av Løgukarmi LK68999 Kloakkir, undir konto 6875, men arbeiðið verður boðið út.

c. og 0,8 mió kr. av kontu 6275, LK62999 Fríðkan í býnum.

Útreiðslurnar nevndar a, b og c verða játtaðar aftur á kontu í sambandi við fíggjarætlan 2027.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, ið varð samtykti við 11 atkvøðum fyri, 2 atkvøðum í móti og ongar blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Elin Heðinsdóttir Joensen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen.

**Ískoyti**
Kunnað verður um málið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarligar avleiðingar: ☒ Ja ☐ Nei**
**Játtan:**

**Vanlig játtan** ☐
**Eyka játtan** ☒
**Lokað verkætlan**☐

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Umbiðið hesa ferð | Upphædd: | 7.900.000,00 |
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 72.253.000,00 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2023-2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Mál til viðgerðar: 25/05986 Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum**

## Ískoyti

Tríggjar verkætlanir hava lænt pening frá verkætlan L31011 Dagstovnurin á Hamrinum í byggitíðini. Hóast tað í málslýsingunum stendur, at talan er um eitt lán, sum skal berast verkætlanini aftur í samband við fíggjarætlanina fyri 2026, so er tað vegna ósketni ikki gjørt, tá fíggjarætlanin fyri 2026 varð samtykt. Talan er um hesar verkætlanir, sum hava fingið fígging frá L31011 Dagstovnurin á Hamrinum, men sum ikki er afturgoldið:

| Verkætlan | Upphædd |
|---|---|
| 118/24 Nýggjur durur til fimleikahøllina í skúlanum á Argjahamri | 1.018.000,00 |
| 153/24 Skipan av nýggjum frítíðartilboðum til 3. - 6. flokk | 4.000.000,00 |
| 189/24 Serstøk nevnd at fyrireika nýggjan svimjihyl | 2.830.000,00 |
| Tilsamans | 7.848.000,00 |

### Fígging
Møguleiki er at fíggja omanfyristandandi kostnað av løgukarmi LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Upphæddin á 7.900.000 verður afturgoldin á løgukarm LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Hetta verður gjørt í fíggjarætlanini 2027.

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| **2775** | **LK27012** | **Nýtt røktarheim við røktaríbúðum** | **3175** | **L31011** | **Útbygging - Dagstovnurin á Hamrinum** | | **7.900.000,00** |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ **Ja** ☐ **Nei**

### Tilmæli:
Trivnaðarstjórin, leiðarin á mentamáladeildini, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini, leiðarin á bygningsdeildini og býarverkfrøðingurin mæla til:

- At tikið verður undir við at fyriliggjandi leisti, sum lýst omanfyri.
- At játtaðar verða 7.900.000,00 kr. til verkætlan L31011 á henda hátt:
    a. at 7.900.000,00 verða játtaðar av løgukarmi LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum undir konto 2775.
    b. at fíggjardeildin stendur fyri, at 7.900.000 kr. verða afturgoldnar á løgukarm LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Hetta verður gjørt í fíggjarætlanini 2027.
- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.
- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Mentamálanevndin 18. mai 2026:** Ein meiriluti, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið til tvær viðgerðir um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Bergur Robert Dam Jensen, atkvøður blankt, av tí at vantandi haldføri er í skjølunum, sum liggja við.

**Ískoyti:**
**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, stjórin fyri Heilsu- og umsorganartænastuni og verkætlanarleiðarin mæla til:

At tikið verður undir við at fyriliggjandi leisti, sum lýst omanfyri.

- At játtaðar verða 7.900.000,00 kr. til verkætlan L31011 á henda hátt:
    a. at 7.900.000,00 verða játtaðar av løgukarmi LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum undir konto 2775.

- b. at 7.900.000 kr. verða afturgoldnar á løgukarm LK27012 Nýtt røktarheim við røktaríbúðum. Hetta verður gjørt í fíggjarætlanini 2027.

- At tikið verður undir við fyriliggjandi samlaðu fíggingini.

- At beina málið í býráðið til tvær viðgerðir umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 665<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 180/26 Víðkan av kirkjugarðinum í Kollafirði

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 25/25 | 25/02390-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 26.02.2025 | 24/25 | 25/02390-2 |
| 3 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 56/25 | 25/02390-2 |
| 4 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2026 | 125/26 | 25/02390-2 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 112/26 | 25/02390-2 |
| 6 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 180/26 | 25/02390-2 |

**Upprunin til málið**
Kirkjugarðurin í Kollafirði er um at verða fullur – einans uml 40 tøk pláss eru eftir í garðinum, og tískil er neyðugt at fara undir at víðka um garðin, soleiðis at garðurin verður framtíðartryggjaður nøkur áratíggju afturat.

**Lýsing av málinum**
Kirkjugarðurin var upprunaliga gjørdur í 1980, og síðani varð hann útbygdur í 1995 og aftur í 2010.

Í dag eru 236 gravir brúktar í kirkjugarðinum, umframt at um 50 gravir eru umbidnar. Einans 40 gravir eru tøkar í kirkjugarðinum, og tískil er tað av alstórum týdningi, at kirkjugarðurin verður víðkaður sum skjótast.

Talið av jarðarferðum í Kollafirði liggur árliga á umleið 8. Harafturat skal vísast á, at makar vanliga fáa grøv setta av ella umbidna samstundis, og tískil verða umleið 16 gravir upptiknar hvørt ár.
Hetta hevur við sær, at innan 2-3 ár, so eru eingi tøk pláss eftir í kirkjugarðinum.

Mælt verður til, at víðkanin verður innan fyri verandi kirkjugarð, og at arbeiðið somuleiðis kemur at fevna um gøtugerð, ljósseting og annað, sum verður mett at eiga at verða raðfest fyri at fáa kirkjugarðin at virka á fullgóðan hátt.

Arbeiðið at víðka kirkjugarðin krevur, at farið verður undir eina tilgongd at prosjektera víðkanina, og at arbeiðið eftirfylgjandi verður boðið út í arbeiðstøku.

Tá arbeiðið at víðka kirkjugarðin er liðugt, so skal lendið liggja í 1-2 ár, áðrenn fólk kunna verða jarðað í garðinum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í byggisamtyktini sum D1 øki lagt til almenning, náttúrufriðingar og mentunarlig endamál.

Allir kirkjugarðar í kommununi eru staðsettir í D1 øki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Heitt er á tveir ráðgevarar um at geva tilboð upp á prosjekteringina. Ætlanin er at fara undir prosjekteringina so skjótt málið er samtykt og fígging er sett av til at seta arbeiðið í gongd.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
-

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
-

**Skjøl**

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 666 |
| | Forkvinnunnar merki: |

-

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6575 | LK65007 | Kirkjugarðar í Kollafirði | 6575 | x | Víðkan av kirkjugarði í Kollafirði | x | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | ókent |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | Summar 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til:
- at farið verður undir at víðka kirkjugarðin í Kollafirði,
- at játtaðar verða kr. 1.000.000 av LK65007 á nýggja verkætlan við heitinum Víðkan av kirkjugarði í Kollafirði
- at heimila umsitingini at seta prosjekteringina í gongd og eftirfylgjandi at bjóða arbeiðstøkuna út, og at seta arbeiðið í gongd,
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kostnaðurin fyri at projektera víðkanina av kirkjugarðinum kemur at liggja millum kr. 200.000-250.000. Neyðugt er tí í fyrstu atløgu einans á játtan til projekteringina, og verður komið aftur í nevnd tá kostnaðurin fyri útbyggingina er kendur.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at farið verður undir at víðka kirkjugarðin í Kollafirði,
- at játtaðar verða kr. 250.000 av LK65007 á nýggja verkætlan við heitinum Víðkan av kirkjugarði í Kollafirði,
- at heimila umsitingini at seta prosjekteringina í gongd og eftirfylgjandi at bjóða arbeiðstøkuna út,

- tá kostnaðurin fyri útbyggingina er kendur, at málið verður lagt fyri nevnd aftur at játta írestandi fíggingina av útbyggingini,
- at beina málið í býráðið

**Fíggjarnevndin 26. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum til fíggjarnevndarfundin 26. februar 2025 og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 27. februar 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Arbeiðið varð boðið út á almennum útboði umvegis útboðsportalin 8. apríl 2026.
Freistin at lata inn tilboð var 12.04.2026 kl. 13.00.
Inn komu 5 tilboð.
Øll tilboðini eru góðkend.

**Innkomin tilboð:**

| Arbeiðstakari | Tilboð íroknað eykaveitingar | Tilboð uttan eykaveitingar | Viðmerking |
|---|---|---|---|
| Articon | 3.884.704,03 kr | 3.541.690,19 kr | ABF er galdandi |
| HHansen | 4.973.667,00 kr | 4.510.792,00 kr | |
| J&K Petersen | 5.265.408,31 kr | 4.612.056,41 kr | |
| Maskingrevstur | 7.564.350,00 kr | 7.113.350,00 kr | Príshækkingar |
| Við Sjógv | 4.609.136,00 kr | 4.322.886,00 kr | |

Articon átti lægsta tilboðið, og verður mælt til at fara í samráðingar við Articon um at gera arbeiðið.

Tilboðið frá Articon íroknað kommunalt mvg er áljóðandi **kr. 3.763.046**

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6575 | LK65007 | Kirkjugarðar í Kollafirði | 6575 | L65007 | Víðkan av kirkjugarði í Kollafirði | | 750.000 |
| 6575 | LK65999 | Kirkjugarðar | 6575 | L65007 | Víðkan av kirkjugarði í Kollafirði | | 3.550.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 4.300.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026-27 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500.000 |

Afturat tilboðnum kemur eisini gjald fyri mold á moldgoymslu, møgulig ráðgeving og eykaarbeiði. Umframt tær 170.000,-kr sum eru eftir av upprunaligu játtanini, verður mælt til at játta 500.000,-kr til óvæntað.

**Skjøl**
25/02390-22 útbjóðing víðkan av kirkjugarðinum í Kollafirði

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at farið verður undir samráðingar við Articon um at gera arbeiðið,
- at heimila umsitingini at gera sáttmála við arbeiðstakara,
- at tilboðsupphæddin áljóðandi kr. 3.763.046 umframt eykaarbeiði og óvæntað verður játtað soleiðis:
    - kr. 750.000 av LK65007, Kirkjugarður í Kollafirði
    - kr. 3.550.000 av LK 65999 Kirkjugarðar

  á *L65007, Víðkan av kirkjugarðinum í Kollafirði*
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 181/26 Nýggjur skrivstovubygningur til Moldgoymsluna í Húsahaga

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2026 | 126/26 | 26/03062-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 114/26 | 26/03062-6 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 181/26 | 26/03062-6 |

**Upprunin til málið**
Tørvur er á nýggjum skrivstovubygningi til starvsfólkini á mold- og avgrevstrarplássinum í Húsahaga.

**Lýsing av málinum**
Endamálið við verkætlanini er at skapa nøktandi hølisviðurskiftir til starvsfólkini, ið starvast á mold- og avgrevstrarplássinum í Húsahaga.

Í Húsahaga starvast 3 starvsfólk, 1 starvsfólk røktar skrivstovuuppgávurnar, meðan tveir mans arbeiða við avgrevstrinum. Verandi starvsfólkaumstøður eru út av lagi vánaligar. Í Húsahaga er eitt skapilsi av eini gamlari bingju, sum virkar sum skrivstova og starvsfólkarúm við vesi. Bingjan er gomul og í sera vánaligum standi. Bingjan er staðsett heilt innast Undir Húsareyni, og so statt er verandi staðseting heldur ikki við til at stuðla undir virkseminum á staðnum, har tað er tørvur á at fylgja við, hvørjir bilar koma á staðið við útgrevstri.

Neyðugt er tí at fara undir at byggja ein nýggjan bygning til virksemið, sum verður staðsettur heilt við byrjan av vegnum Undir Húsareyni, tætt við Oyggjarvegin. Sí valdu staðsetingina til nýggja bygningin, sí skjal nr. *26/03062-7, Staðseting skrivstovubygningur í Húsahaga*.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 4. grundumráðið í Almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum ásetur:

1. 4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.
2. Loyvt verður einans at byggja fjós, úthús og annað, sum hevur við vanligt traða- og jarðarbrúk at gera.
   a) Loyvt er at umvæla verandi sethús og byggja somikið afturat teimum, at tey eru hóskilig til nútímans nýtslu sum sethús.
   b) Á jarðarstykkjum omanfyri 5.000 m$^2$ er í mesta lagi loyvt at byggja 60 m$^2$ í gólvvídd harav kunnu verða eini frítíðarhús í sjálvstøðugum bygningi, ið er í mesta lagi 30 m$^2$ gólvvídd.
   c) Á jarðarstykkjum undir 5.000 m$^2$ er í mesta lagi loyvt at byggja 30 m$^2$ gólvvídd, sum eisini kann vera frítíðarhús.
   d) Loyvt er at gera byggingar, sum neyðugar eru fyri alment gagnligar veitingar.
   e) Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. grundumráði.
   f) Øll bygging í 4. grundumráði sambært § 26, stk 2, litra d og e, skal gerast sambært serstakari byggisamtykt.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Áðrenn Býarskipanardeildin yvirtók Moldgoymsluna og setti nýggja rakstrarstovnin, Lendis- og kirkjugarðstænastuna á stovn, hevði býráðið samtykt í septembur 2025 at játta kr. 1.000.000 til nýggjan skrivstovubygning til virksemið. Sí mál nr. *25/03238, Raðfestingar á løgukonto 7175, Renovasjón – 2025*.

Nú er tíðin búgvin at seta tilgongdina og eftirfylgjandi arbeiðið viðv. skrivstovubygninginum í gongd.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 670<br>Forkvinnunnar merki: |

Í hesum sambandi hevur Býarskipanardeildin heitt á ráðgevarafyritøkuna Fjalar um at hjálpa við fyrireiking av verkætlanini, at standa fyri prosjektering og útboði av verkætlanini, harumframt at hava eftirlit við byggingini. Ætlanin er at bjóða arbeiðið út í høvuðsarbeiðstøku.

Bygningsdeildin saman við starvsfólkum á Lendis- og kirkjugarðstænastuni hava gjørt innleiðandi arbeiðið við at lýsa tørvin og gera uppskot til staðseting og innrætting av skrivstovubygninginum, sí skjal nr. *26/03062-8, Skrivstovubygningur idéupplegg.*

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*25/03238, Raðfestingar á løgukonto 7175, Renovasjón – 2025*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Málið er heilt stutt umrøtt við Byggimálsdeildina, og verður mælt til, at tá talan er um bygging av bygningi, sum hoyrir til verandi virksemið á staðnum í 4. grundumráði, at søkt verður um frávik frá ásetingunum, tá søkt verður um byggiloyvi. Slík fráviksmál verða løgd fyri Byggi- og býarskipanarnevndina til støðutakan í hvørjum einstøkum føri.

Býarskipanardeildin hevur somuleiðis ætlanir um at fáa gjørt serstaka byggisamtykt fyri økið, har Mold- og avgrevstrarplássið í Húsahaga verður lýst.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
*26/03062-7, Staðseting skrivstovubygningur í Húsahaga*
*26/03062-8, Skrivstovubygningur idéupplegg*

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
Tá tilboðini verða tøk, verða fíggjarligu avleiðingarnar lýstar nærri, og verður komið aftur í nevnd eftir nøktandi fígging til arbeiðið.
Í fyrstu atløgu verður játtanin á rakstrarkonto 6212, áljóðandi kr. 1.000.000 flutt á nýggja verkætlan undir kt. 6275.

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 6212 | | Fríðkan av býnum, Lendisliðið | 6275 | | | Skrivstovubygningur í Húsahaga | 1.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | Ókent |
| Áður játtað | Upphædd: | 1.000.000 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 12.000 |

**Tilmæli**:
Tekniskur stjóri, býararkitekturin og leiðarin á Lendis- og kirkjugarðstænastuni mæla til at:

- heimila umsitingini at prosjektera og bjóða byggingina av skrivstovubygninginum í Húsahaga út í høvuðsarbeiðstøku,

- umsitingin kemur aftur í nevnd, tá tilboðini eru innkomin,
- beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina til tvær viðgerðir.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2026:** Samtykt við tí viðmerking, at henda orðing gerst partur av tilmælinum:

"At játtanin á kr. 1 mió verður flutt av rakstrarkontu 6212, Fríðkan av býnum, Lendisliðið, á nýggja verkætlan Skrivstovubygningur í Húsahaga, undir kontu 6275 Fríðkan av býnum (íløgur)."

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

# 182/26 Spælipláss í Nólsoy, matr. nr. 107c

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2026 | 121/26 | 25/06251-6 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 115/26 | 25/06251-6 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 182/26 | 25/06251-6 |

**Upprunin til málið**
Eigarafelagið í Nólsoy ynskir at gera spælipláss á matr. nr. 107c.

**Lýsing av málinum**
Í Nólsoy hava tey leingi saknað eitt spælipláss í bygdini, og tí hevur eigarafelagið søkt kommununa um stuðul at gera spælipláss á fríøkið miðskeiðis í bygdini, matr. nr. 107c.

Nógv børn eru í Nólsoy, og eisini nógvir dagstovnar, skúlabørn og barnafamiljur ferðast út til Nólsoyar at uppliva oynna. Tí hevði verið kærkomið við einum spæliplássi, bæði til spæl og uppihald, og til ferðandi at eta matpakka, í lívd fyri vindi og regni. Eigarafelagið vísir á hagtøl, sum siga, at nærum 100.000 fólk ferðast út til Nólsoyar árliga.

<u>Verkætlanin</u>
Eigarafelagið lýsir verkætlanina við eini skrivligari umsókn, skitsu av skipan av spæliplássinum, tilfarslista, kostnaðarmeting, hagtølum um ferðandi, og viðmæli frá lærara í Havn.
Sí uppskot til skipan av spæliplássi, skjal nr. *25/06251-7, Skipan av spæliplássinum.*

Timburfyritøkan úr Nólsoy P/F Snittar við Nicolaj Falck og Óla Svein Lutherusson standa fyri arbeiðinum í samstarvi við bygdarfólki.

Grannar at matrikkul nr. 107c eru kunnaðir um verkætlanina, og taka undir við at arbeiðið verður sett í gongd.

Eigarafelagið upplýsir, at verkætlanin kemur at kosta kr. 614.300. Sí tilfarslista og kostnaðarmeting, sí skjal nr. *25/06251-8, Kostnaðarmeting.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ongar ásetingar eru, sum forða fyri hesari verkætlan.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin tekur undir við uppskotinum frá eigarafelagnum í Nólsoy um at gera spælipláss í bygdini. Góðir býarskipanarligir hentleikar sum eitt spælipláss eru við til, at fólk hava hug at støðast og trívast úti í bygdunum í kommununi.

Spæliplássið er væl staðsett miðskeiðis í bygdini, og liggur tætt at øðrum hentleikum so sum handlinum, heimavirkinum, Ovasavninum, bryggjuni, wc og øðrum, og somuleiðis er tað eitt veðurgott stað til uttandura uppihald.

Bygdafólkini hava sjálvi tikið stig til spæliplássið og somuleiðis fara tey at taka lut í arbeiðinum.

At stuðla verkætlanini er við til at stuðla lokalum átøkum í Nólsoy, og við til at menna luttøku frá fólki í bygdini. Somuleiðis hevði eitt spælipláss verið eitt gott tilboð til barnafamiljur, sum á hvørjum ári vitja oynna.

| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 673 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

Umsitingin mælir til at seta kr. 600.000 av til spæliplássið av løgukarmi LK62998, Fríðkan, bygdir og økir, undir kt. 6275, Fríðkan av bygdunum.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
*25/05857 Áheitan um at betra um umstøðurnar á fótbóltsvøllin í Nólsoy*

Vøllurin er ikki nýtiligur í verandi løtu, og støða skal takast til saman við staðbundnu nevnd um hann skal umvælast og tillagast til verandi økið ella flyta staðseting.

Spælipláss nærhendis hevði bøtt um verandi støðu, at mangul er á fótbóltsvølli.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Skjøl**
*25/06251-7, Skipan av spæliplássinum*
*25/06251-8, Kostnaðarmeting*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan | Upphædd |
| 6275 | LK62998 | Fríðkan, bygdir og økir | 6275 | L62052 | Fríðkan av bygdunum | | 600.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 600.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026-2027 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at:
- spælipláss í Nólsoy verður sett í verk.
- kr. 600.000 verða játtaðar av løgukarmi LK62998, Fríðkan bygdir og økir, á L62052 Fríðkan av bygdum, undir konto 6275.
- málið verður beint í býráðið umvegis fíggjarnevndina og til kunningar í staðbundnu nevndini.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 183/26 Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 58/25 | 25/00954-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 09.04.2025 | 71/25 | 25/00954-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 14.05.2025 | 93/25 | 25/00954-1 |
| 4 Býráðsfundur | 22.05.2025 | 131/25 | 25/00954-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 89/26 | 25/00954-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 126/26 | 25/00954-1 |
| 7 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 160/26 | 25/00954-1 |
| 8 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 183/26 | 25/00954-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av mál nr 24/03527.
Í 2006 varð skráseting gjørd av bygningum, sum eru bygdir áðrenn 1958. Bygningarnir fingu ásett varðveitingarvirði, og arbeiðið er skjalfest í Tórshavnar Býaratlassi. Býaratlassið verður brúkt sum eitt vegleiðandi býarskipanarligt amboð, men virkar ikki sum ítøkilig heimild í viðgerðini av t.d. byggimálum, har ætlanin er at broyta bygningar móti tilmælunum í Býaratlassinum. Til tess at varðveita býarumhvørvið tørvar Tórshavnar kommunu amboð, ið kunnu nýtast til at verja serstøku byggilistina, býarskipanina og mentunarsøguligu virðini í kommununi, áðrenn ov seint er.

12. desembur 2022 samtykti byggi- og býarskipanarnevndin, at umsitingin arbeiðir við at skráseta og raðfesta varðveitingarverd øki við at gera serstakar byggisamtyktir fyri hesi (sí mál nr. 22/06945). Í sama máli nevnir umsitingin fleiri økir í býnum, har varðveitandi byggisamtykt eigur at verða gjørd, av tí at hesi økini hava serstakt byggilistarligt, býarskipanarligt og søguligt virði. Ovarlaga á listanum er Rabarbukvarterið.

Tá ið matr.nr 828 varð keyptur í 2023, og nýggi eigarin hevði ynski um at sundurmatrikulera, soleiðis at umleið 315 $m^2$ stóri matrikulin á Tvørgøtu í framtíðini kundi rúma tveimum ognum, lat hetta seg ikki gera, tí galdandi byggisamtykt fyri økið, krevur grundstykkjavídd á minst 500 $m^2$ fyri stakhús (sí mál nr. 23/04734). Í býlinginum, sum upprunaliga varð útstykkjaður í 1920'unum, eru stórt sæð allar grundstykkjavíddirnar undir 500 $m^2$. Umsitingin metir, at galdandi ásetingar eru óhóskandi, og at varðveitandi byggisamtykt eigur at verða gjørd fyri Rabarbukvarterið. Í hesum sambandi bjóðaði eigarin av matr.nr 828 sær til at gera uppskot um eina varðveitandi serstaka byggisamtykt.

**Lýsing av málinum**
26. juni 2024 móttók umsitingin uppskotið til varðveitandi byggisamtykt, og hevur eftirfylgjandi tillagað tilfarið, við íblástri frá bæði útlendskum byggisamtyktum, serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn, og í góðum og tøttum samstarvi við Tjóðsavnið. Uppskotið, skjal *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25,* hevur hesar týðandi broytingar við sær:

- Heimild verður fyri lutfalsliga smáum grundstykkjavíddum, og hóskandi ásetingar verða nágreinaðar fyri mest loyvdu hædd og byggi- og nýtslustig, við støði í siðbundnu húsunum í økinum.
- Krav verður um at varðveita garðar og byggilinjur, til tess at varðveita eyðkenda býarprofilin.
- Krøv verða sett til tilfarsnýtslu, snið og litir, sum samstundis tryggja, at húsaeigarar kunnu seta neyðugt viðlíkahald í verk og tillaga ognir til broyttar tørvir.

- Umsitingin mælir til stuðulsskipan, sum vit kenna frá Tinganesi og Reyni, har kommunan letur stuðul á 35% av upphæddini fyri siðbundið tilfar, sum serstaka byggisamtyktin krevur.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í A1 øki í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu, sum er ætlað Bústaðarbygging, har ásetingarnar eru:

**§ 5. Ásetingar fyri umráðispart A1 í 3. grundumráði**

1) Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av, at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur, og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.

2) Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu.

3) Grundstykkini skulu vera í minsta lagi 500 $m^2$ fyri stakhús og 300 $m^2$ fyri hvønn partin av tvíhúsum ella raðhúsum. Fyri raðhús kann ein partur av minstuvíddini verða lagdur sum felagslendi, tó í mesta lagi 100 $m^2$ fyri hvørt grundstykki.

4) Útstykking verður einans loyvd sambært útstykkingarætlan fyri eitt natúrliga avmarkað øki.

5) Byggistigið skal ikki fara upp um 0,3.

6) Nýtslustigið skal ikki fara upp um 0,6 fyri stakhús og 0,7 fyri tvíhús, raðhús og íbúðir. Tó kann tað fyri grundstykkir til stakhús, sum eru 200 $m^2$ ella minni, fara upp til helvtina hægri, og fyri stykkir millum 200 $m^2$ og 500 $m^2$ verða sett javnt minkandi, soleiðis sum mynd 3 vísir.

7) Hús skulu ikki verða bygd við meira enn tveimum hæddum umframt nýttum lofti. Kjallari verður roknaður sum húsahædd.

8) Hús við vanligari mønureising skulu ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og 9 m til mønuna.

9) Verða hús bygd við einvegis takhalli ella sløttum taki, skal tann lægra síðan ikki vera hægri enn 6 m til hægsta punkt við útvegg og tann hægra síðan ikki vera hægri enn 7,5 til hægsta punkt við útvegg.

10) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at byggja íbúðir.

11) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt, at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 $m^2$, tó í minsta lagi 400 $m^2$.

12) Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, verða loyvt at víkja frá ásetingunum í stk. 8 og 9.

Samsvar er ikki millum § 5, stk. 11 í galdandi almennu byggisamtyktini, ið ásetir at grundstykki ikki kunnu vera minni enn 400 $m^2$, og § 4, stk. 2 í uppskotinum til nýggja serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið, ið sigur, at grundstykki í økinum skulu vera millum 150 og 250 $m^2$ til víddar. Fyri at fremja rætta dámin í hesum, og í líknandi økjum, er tískil neyðugt at broyta § 5, stk. 11 í almennu byggisamtyktini, soleiðis at

tað gerst gjørligt, at hava grundstykkir, ið eru minni 400 $m^2$. Tað hevur tó týdning at tryggja, at henda ásetingin einans kann nýtast í verandi økjum, har tað er neyðugt fyri at tryggja dámin í økinum.

Tískil verður mælt til, at nýtt stk. 12 verður sett inn í § 5 í almennu byggisamtyktina, ið er soljóðandi:

"Í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað býarumhvørvi, verða loyvt at grundstykkini til stakhús eru minni enn 500 $m^2$, hetta fyri at varðveita dámin í økinum."

**Upplýsingar frá umsitingini**
Umsitingin hevur afturvendandi mál, sum snúgva seg um, hvussu ávís økir í kommununi kunnu mennast uttan at missa søgulig og byggilistarlig virðir. Ætlanin við hesi byggisamtyktini er, at hon kann virka sum ein fyrimynd, tá líknandi byggisamtyktir skulu orðast aðrastaðni í býnum.

Av øðrum býarpørtum, har varðveitandi byggisamtykt kann verða gjørd, eru til dømis Jóannesar Paturssonargøta, Tinghúsvegurin, Tórsbyrgi, Tróndargøta/Bøgøta, Kilarakanalin, søguligir býlingar í bygdunum osfr.

Eitt annað skjal, ið er gjørt í sambandi við ynskið um at varðveita ávís býarøki í kommununi, er vegleiðingin "Heimbýlið títt", sí skjal *Heimbýlið títt*. Hetta er ein vegleiðing til, hvussu farast skal fram, tá støða skal takast til umvælingar, umbyggingar og/ella nýbyggingar í økjum, ið eru varðveitingarverd. Í vegleiðingini er ein yvirskipað lýsing og frágreiðing um, hví vit varðveita, hvat vit skulu leggja til merkis, tá vit umvæla ella umbyggja og tílíkt. Harumframt verður komið nærri inn á ymisku húsasniðini í teimum ymisku varðveitingarverdu økjunum, og frágreiðing er um, hvat er serstakt við ymisku húsasniðunum. Í fyrsta umfari eru tey trý húsasniðini, sum í størstan mun myndað økið í Rabarbukvarterinum, traðarmannahús, skiparahús og stoypt hús, lýst, men ætlanin er, at vegleiðingin verður víðkað og húsasnið verða løgd afturat, so hvørt sum varðveitandi byggisamtyktir verða gjørdar fyri onnur varðveitingarverd øki í kommununi. Ynskið er, at vegleiðingin við tíðini fer at hava frágreiðing um øll tey ymisku húsasniðini, sum eru í kommununi.

Í serstøku byggisamtyktini fyri Rabarbukvarterið verður víst til vegleiðingina "Heimbýlið títt" og lýsingin av teimum viðkomandi húsasniðunum verður lagt sum fylgiskjal til serstøku byggisamtyktina. Vegleiðingin og lýsingin av teimum trimum húsasniðunum "traðarmannahús", "skiparahús" og "stoypt hús" er ikki endaliga liðug, men verður klár áðrenn býráðsfundin 24. apríl 2025 og áðrenn uppskotið til serstaka byggisamtykt verður lagt til almenna og grannahoyring.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *Varðveitingarverd øki og bygningar í kommununi,* journal nr. 22/06945.
- *Umsókn um sundurbýti av matr. nr. 929. Tvørgøta 4. Tórshavntil ummælis,* Journal nr. 23/04734.
- *Nýggj serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvaterið,* journal nr. 24/03527

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Uppskotið til serstaka byggisamtykt verður sent eigarum av ognunum í økinum til hoyringar.

Vegleiðingin "Heimbýlið títt" er gjørd í samstarvi við Tjóðsavnið.

**Skjøl**
- *Kap. II, § 5 í almennu byggisamtyktini,* journal nr. 25/00954-2.
- *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25,* journal nr. 25/00954-4.
- *Heimbýlið títt,* journal nr. 25/00954-3.

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | X | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

Mælt verður til at stuðulsskipan, sum vit kenna frá Tinganesi og Reyni, har kommunan letur stuðul á 35% av upphæddini fyri siðbundið tilfar, sum serstaka byggisamtyktin krevur, somuleiðis verður gjørd fyri økið, sum serstaka byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið er galdandi fyri.

Ilt er at meta um, júst hvussu stórar fíggjarligar avleiðingar ein tílík skipan fer at hava, av tí at hetta velst um, nær – og hvussu stórar umvælingar eigarar av ognunum fara undir í framtíðini.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at samtykkja uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið sambært skjalinum "*Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.03.25*." Fylgiskjølini "Traðarmannahús", "Skiparahús" og "Stoypt hús" verða endaliga liðug áðrenn býráðsfundin.
- at samtykkja uppskotið til nýggja áseting í almennu byggisamtyktini, ið við serstakari byggisamtykt loyvir, at grundstykki kunnu vera minni enn 500 m$^2$, hetta fyri at varðveita ein ávísan dám, sí skjal *Kap. II, § 5 í almennu byggisamtyktini*.
- at líknandi stuðulsskipan, sum er galdandi fyri Tinganes og Reyn, eisini verður galdandi fyri økið, sum varðveitandi byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið fevnir um, soleiðis at kommunan fær heimild at lata eigarum stuðul, svarandi til 35 % av upphæddini fyri tilfarskostnað, ið lýkur treytir fyri nýggj krøv um siðbundið tilfar, og at *konta 6211 Aðrar útreiðslur*, í hesum sambandi verður tillagað, til at eisini at umfata Rabarbukvarterið umframt Tinganes og Reyn.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 09. apríl 2025:** Málið útsett.

**Fíggjarnevndin 14. mai 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála, tekur undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini við tí nágreining, at stuðul á 35% verður veittur fyri kostnaðarmunin ímillum siðbundið tilfar og tilfar, sum verður ynskt nýtt í Rabarbukvarterinum. Málið verður beint í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við at beina málið til hoyringar, men tekur ikki undir við at seta stuðulsskipanina í verk.

**Býráðsfundur 22. mai 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini við hesi broyting viðvíkjani stuðulsskipanini:

*Stuðul á 35% verður veittur til kostnaðarmunin ímillum vanligt tilfar og tilfar, sum verður ynskt nýtt í Rabarbukvarterinum.*
*Stuðulin verður avtikin stigvíst yvir 15 ár soleiðis:*
*- 5 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 25%.*
*- 10 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 15%.*
*- 15 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin avtikin.*

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Kári Johansen og Tróndur Sigurðsson

Ongin atkvøða var blonk.

Uppskotið varð samtykt við 8 atkvøðum fyri, 5 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti**
Í sambandi við almennu hoyringina av serstøku byggisamtyktini fyri Rabarbukvarterið, sum var 1. oktober til 12. november, komu fimm viðmerkingar – allar frá íbúgvum í økinum, sí skjøl *Viðmerking – Anfinn Frederiksen, Viðmerking – Hannes Gislason, Viðmerking – Kristjan Eiriksson, Viðmerking – Sigurd Christiansen* og *Viðmerking - Spf Petri*. Fleiri av viðmerkingunum snúgva seg um somu viðurskifti, og tískil eru viðmerkingarnar niðanfyri bólkaðar eftir evni, og eru viðmerkingarnar hesar:

1. <u>Varðveita økið</u>

- Taka yvirskipað undir við, at mest møguligt verður gjørt fyri at varðveita hetta serliga økið.
- Orsøkin til hesa byggisamtyktina er, at eigarin av matr. nr. 828 ynskir at sundurmatrikulera ogn sína, soleiðis at byggjast kunnu tvey smærri hús, heldur enn tað frammanundan størra húsið, ið frammanundan stendur á ognini. Hetta er ikki í samsvari við § 1, stk. 2a um at varðveita søguliga umhvørvið. Hetta er ei heldur í samsvari við § 7, stk. 6 um at endurbyggjast skal og byggjast skal við somu umvídd sum niðurtikin hús. Verandi hús standa við skjøldri javnfjart markalinju, og væl møguligt er at byggja við somu umvídd og á sama stað, sum tey niðurtiknu húsini.

<u>Viðmerkingar frá umsitingini</u>

- Tað er eitt politiskt ynski at varðveita nøkur av eldru grannaløgunum í býnum, og varð tað samtykt í byggi- og býarskipanarnevndini 12. desember 2022, at umsitining skuldi skráseta og raðfesta varðveitngarverd øki í býnum fyri at gera serstakar byggisamtyktir fyri hesi, sí mál *22/06945, Varðveitngarverd øki og bygningar í kommununi*. Serstaka byggisamtyktin fyri Rabarbukvarterið er tann fyrsta í røðini.
- Serstaka byggisamtyktin viðger ikki ítøkilig byggimál, men skapar karmarnar fyri tað, ið mett verður hóskar seg til økið – t.d. grundstykki, ið eru millum 150 og 250 $m^2$ til víddar og um ummatrikuleringar skulu/kunnu gerast, skal tað verða í samsvari við fylgiskjal 2 í serstøku byggisamtyktini. Ummatrikuleringar kunnu einans gerast, um

byggingin eftir ummatrikulering rúmast á ognini, tað merkir t.d., at byggistig og nýtslustig framvegis er undir tí, ið loyvt er.

2. Ferðsla og parkering:
- Ringt at finna parkeringspláss.
- Mælir til at steingja Sjúrðargøtu uppi við Heygsbreyt, so eingin gjøgnumkoring verður, og hava innkoyring til Heygsbreyt frá Dalavegnum, og innkoyring til Brekkugøtu og Tvørgøtu verður frá Tróndargøtu inn í Sjúrðargøtu, sum tað er í dag. So kunnu íbúgvar parkera í gøtunum og gøturnar kunnu pyntast við blomsturkassum og spæliplássum v.m.
- Eigur at verða møguligt hjá fólki at fáa sær bilpláss á stykkinum.
- Parkeringsviðurskiftini eru ótíðarhóskandi og ótrygg. Parkeraðir bilar fram við gonguteigunum gera økið ótrygt. Tí er avgerandi, at byggisamtyktin framvegis loyvir einum parkeringsplássi á grundstykkjum, har tað er møguligt, at grundstykki ikki missa byggirætt grundað á hetta, og at kommunan skipar smærri felags parkeringsøki, t.d. við gomlu brandstøðina.
- Fer at vera munur á byggirætti og møguleikum hjá íbúgvum innan fyri sama kvarter. Øll skulu hava somu møguleikar til smærri útbygging og parkeringsloysnir. Nú verður tað tey, ið bygdu út áðrenn og eftir serstøku byggisamtyktina.

Viðmerkingar frá umsitingini
- Ásetingin um, at parkeringspláss ikki skulu vera inni á ognunum, er gjørd grundað á ynskið um at varðveita grøna dámin í økinum. Tá grundstykkini eru so lítil, og parkeringspláss skulu gerast, er ikki nógv rúm fyri vøkstri. Umsitingin metir tó, at loyvi kann gevast til 1 parkeringsplássi inni á ognini, um so er at tey kunnu vísa, at § 6, stk. 1 um, at í minsta lagi 50% av óbygda økinum á ognini ikki er álagt hátún, verður hildið.
- Ongar ætlanir eru um at broyta ferðslumynstrið í Rabarbukvarterinum. Um Sjúðrargøta uppi við Heygsvegin verður stongd, broytir tað munandi um ferðslumynstrið, og mugu neyðugar kanningar gerast, áðrenn ein tílík avgerð kann takast.

3. Vinnuligt virksemi í økinum:
- Rabarbukvarterið var eitt arbeiðarakvarter – ikki eitt urtagarðskvarter. Hetta eigur at verða varðveitt í byggisamtyktini.
- Spurnartekin verður sett til, um endamálið at varðveita siðsøguligu virðini í økinum verður rokkið, tá forboð verður sett fyri virksemi, sum hevur verið partur av økinum í eina góða øld – helst líka frá byrjan.
- § 3 og § 5 eiga at verða broyttar, soleiðis at parkeringsøki á privatum matrikli og virkir í umhvørvisflokki 1 og 2 framhaldandi verða loyvd í økinum, í samsvari við ásetingarnar í Almennu byggisamtyktini. Hetta tryggjar, at gjørdar íløgur í verandi vinnubygningar og parkeringsøki ikki missa virði, og at økið heldur fram at vera virkið og livandi.
- Verandi uppskot setur forboð fyri næstan øllum vinnuvirksemi og privatari parkering í økinum.
- Verandi uppskot fer at taka burtur møguleikan at nýta verandi vinnubygningar, um fyritøkan flytur ella eigarin broytist. Óvissa verður fyri framtíðar íløgur og avmarkar vilja at betra um atkomu, t.d. hjá fólki við skerdum førleikum.

Viðmerkingar frá umsitingini

- Tikið verður undir við at broyta ásetingarnar fyri vinnuligt virksemi í økinum, soleiðis at tær verða tær somu sum tær vóru áðrenn, og í vanligum sethúsaøkjum, A1 økjum, annars.
  "Í sambandi við bústaðarøki kann byggivaldið geva serloyvi til annað virksemi sum handlar, smærri vinnuvirki og stovnar, ið natúrliga hoyra býlinginum til, treytað av at hetta ikki er til ampa ella spillir dámin á økinum sum sethúsabýlingur og sum lúka treytirnar í flokking av vinnuvirkjum í Tórshavnar kommunu.
  Virkini skulu kunna flokkast í umhvørvisflokki 1-2 sambært reglum hjá Tórshavnar kommunu."
- Viðvíkjandi viðmerking um parkering verður mælt til, at hildið verður fast í, at einans 1 parkeringspláss kann skipast á hvørjari ogn sambært nýggja uppskotinum til § 6, stk. 2, hetta fyri at tryggja grøna dámin í økinum.

4. <u>Reinhaldið</u>
- Skapa ójavnvág, tí kommunan sjálv rekur vinnu á matr. nr. 808d (gamla brandstøðin), ið er tikið burtur úr samtyktini, hóast virksemið har hevur hægri umhvørvisávirkan (flokkur 3-5).
- Gamla Brandstøðin og økið hjá Reinhaldinum eiga at verða fevnd av byggisamtyktini. Virksemið virkar sera illa saman við gamla býliginum við illa ljóðisoleraðum húsum. Fyrr lógu bústaðir út til vegin.
- Virksemið hjá Reinhaldinum elvir til stóran larm, støv, sápulukt og óreinleika. Kundið verið flutt t.d. til Vestaru bryggju, og harvið betrað munandi um fagurfrøðiligu heildarmyndina av Rabarbukvarterinum.
- Gamla brandstøðin eigur at verða umvæld til bústaðarendamál, ella møguliga parkeringsøki, um ætlanin er at avmarka tann møguleikan hjá íbúgvunum í økinum.

<u>Viðmerkingar frá umsitingini</u>
- Henda serstaka byggisamtyktin snýr seg fyrst og fremst um at skipa sethúsabyggingina í Rabarbukvarterinum við traðarmannahúsunum, fiskimannahúsunum og stoyptu húsunum. Mett verður ikki, at gamla brandstøðin er partur av tí økinum.
- Býarskipanarliga metir man, at virksemið hjá Reinhaldinum í gomlu brandstøðini er óheppið staðsett, eisini í mun til ynskta dámin í økinum sum heild. Flyting av verandi virksemi í Brandstøðini hevur fleiri ferðir verið viðgjørt, tó uttan at ein haldgóð loysn er funnin. Nærleikin til innara part av býnum hevur avgerandi týdning fyri virksemið hjá Reinhaldinum, og tað er ikki eydnast at finna aðra staðseting til hetta virskemið. Bygningsdeildin hevur í 2025 latið gjørt uppskot um høvuðsumvæling og betran av umstøðunum í Brandstøðini, við m.a. innandura vaskiplássi. Um uppskotið verður framt í verki, hevði tað hjálpt munandi um árinini av virkseminum.

5. <u>Matriklar, byggi- og nýtslustig</u>
- Tað, at tað ber til at deila summi grundstykki í tvey (fylgiskjal 2) ger, at byggistig fyri verandi hús á hesum grundøkjum verður hækkað munandi.
- Ætlanin leggur upp til sersømdir ella undantaksloyvir fyri sera fáar eigarar í Rabarbukvarterinum, fyri at kunna gjøgnumføra lýstu ætlanina um sundurbýting av grundøkjum smb. § 4, stk. 3 og fylgiskjali 2.
- Broytingar eiga at vera gjørdar í mest loyvda byggistigi, sum gagna øllum í Rabarbukvarterinum, eisini teimum við smáum grundstykkjum. At loyva teimum lítlu húsunum at byggja hús síni eitt sindur størri, fer ikki at broyta dámin á økinum munandi.
- Ynskja byggistig á 0,4.

- Byggisamtyktin nevnir grundstykkjavíddir á 158 $m^2$ við húsum, ið hava grundvíddir á 60 $m^2$. Hetta gevur byggistig á 0,38. Fleiri hava eisini munandi hægri byggistig enn 0,4.
- Mett verður ikki, at byggisamtyktin gevur eigarum við smærri húsum á smáum grundøkjum nóg góðar møguleikar at innrætta rímiligar bústaðir.

Viðmerkingar frá umsitingini
- Tað fer einans at bera til at býta sundur grundstykki, um so er, at byggistigið á teimum sundurbýttu grundstykkjunum somuleiðis verður yvirhildið, eftir at sundurbýtið er farið fram. Hetta verður viðgjørt í teimum ítøkiligu málunum.
- Skráseting av bygdum fermetrum í økinum vísir, at flestu ognirnar eru við hægri byggistigi enn 0,3 – av 68 ognum. Um byggistigið verður hækkað til t.d. 0,4, kunnu 42 av ognunum gera tilbyggingar, og verður mett, at hetta fer at broyta dámin á økinum munandi. Endamálið við serstøku byggisamtyktini er at varðveita dámin á økinum, og er broyting av byggistiginum so statt ikki í samsvari við endamálið.
- Nevnast kann, at á ognum, sum eru 158 $m^2$ ber, við einum byggistigi á 0,3, til at byggja 47,4 $m^2$ í grundvídd. Nýtslustigið á ognum, sum eru 158 $m^2$ er 0,9, og er tí møguligt at byggja 142,2 $m^2$ í alt. Hendan støddin verður mett, sum ein rímiligur bústaður til eina vanliga familjustødd.

6. Fíggjarligur stuðul
- Fíggjarligi stuðulin átti ikki at verið avtikin eftir 15 ár, men verið óavmarkaður, eins og úti á Reyni. Annars verður mismunur.

Viðmerkingar frá umsitingini
- At avtaka fíggjarliga stuðulin yvir ár er ein politisk avgerð, og hevur býráðið samtykt, at fíggjarligi stuðulin verður avtikin stigvíst yvir 15 ár soleiðis:
  *- 5 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 25%.*
  *- 10 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin 15%.*
  *- 15 ár eftir at byggisamtyktin er komin í gildi, verður stuðulin avtikin.*

7. Ymiskt
- Manglar áseting um mest loyvdu hædd á trøum. Hetta í mun til trygd og sólargang. Ynskja greiðar ásetingar um viðlíkhald av urtagørðum, so trø ikki kunnu vaksa óavmarkað stór.
- Marghháttligt, at banna sólpanelum á húsatekjum, sum eru ein skjótt vaksandi partur av grøna orkuskiftinum.

Viðmerkingar frá umsitingini
- Býarksipan og byggisamtyktir eru fevndar av býarskipanarlógini, og í hesari er ikki heimild at áseta mest loyvdu hædd á trøum í byggisamtyktum. Kommunan hevur gjørt vegleiðingina “Plantið eitt træ í góðum grannalag”, sum lýsir, hvussu trø og runnar mest skynsamt verða plantað og hildin í grannaløgum.
- Sólpanel verða loyvd á úthúsum, skúrum og líknandi. Mett verður, at um sólpanel verða løgd á tekjur á meginhúsum, fer hetta at gera seg ov nógv inn á søguliga sniðið, sum serstaka byggisamtyktin roynir at varðveita.

Umframt almennu viðmerkingarnar, hevur umsitingin hesar innanhýsis viðmerkingar.

Stórigarður
Stórigarður gongur fram við norðara marki av byggisamtyktarøkinum og lutvíst vestara marki. Stórigarður er ikki friðaður við lóg, men Tórshavnar kommuna lat í 2018/2019 gera eina støðulýsing og heildarætlan

fyri garðin, við tí fyri eyga at varðveita hann, sí mál *18/01974, Stórigarður* . Stórigarður verður ikki umrøddur í áður framlagda uppskotið, og mett verður, at áseting, ið varðveitir Stóragarð, eigur at verða í nýggja uppskotinum, sí § 6, stk. 6 í skjalinum *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 21.01.26*.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
- *22/06945, Varðveitngarverd øki og bygningar í kommununi*
- *18/01974, Stórigarður*

**Skjøl**
- *Viðmerking – Anfinn Frederiksen,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Hannes Gislason,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Kristjan Eirksson,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Sigurd Christiansen,* journal nr. 25/00954-30
- *Viðmerking – Spf Petri, journal nr. 25/00954-30*
- *Serstøk byggisamtykt fyri Rabarbukvarterið 05.03.26,* journal nr. 25/00954-32

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til serstøku byggisamtyktina fyri Rabarbukvarterið 05.03.26, við m.a. hesum broytingum í mun til áður framlagda uppskot:
- Loyvi til 1 parkeringspláss inni á ognunum, um so er at § 6, stk. 1 verður hildið.
- Loyvi til vinnuligt virksemi í umhvørvisflokki 1-2.
- Áseting, ið verjir Stóragarð.
- Og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Birgir Nielsen og Kári Johansen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Heðin Mortensen

# 184/26 Broyting av serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.06.2025 | 101/25 | 25/01086-2 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 160/25 | 25/01086-2 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 93/26 | 25/01086-2 |
| 4 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 128/26 | 25/01086-2 |
| 5 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 161/26 | 25/01086-2 |
| 6 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 184/26 | 25/01086-2 |

**Upprunin til málið**
Í 2017 móttók umsitingin umsøgn um byggiloyvi til hotellíbúðir Undir Bryggjubakka. Byggiloyvið varð útskrivað 7. juli 2021. Nærmastu grannarnir kærdu avgerðina, og 1. november 2022 fekk Tórshavnar kommuna skriv frá Føroya Kærustovni við avgerðini at ógilda byggiloyvið.

Skal byggingin lata seg gera við tí nýtslu, sum søkt er um, so er neyðugt at broyta serstøku byggisamtyktina.

**Lýsing av málinum**
Galdandi sertaka byggisamtykt er upprunaliga frá 1972 og hevur til endamáls at varðveita dámin, sum sermerkir Tinganes og gomlu Havnina, og at byggja og endurbyggja á ein hátt, sum ikki stríðir ímóti tí gamla.

Økið Undir Bryggjubakka (kallað D1 í sersøku byggisamtyktini), hevur síðani 1972 verið lýst sum byggilendið. Ætlaða byggifeltið til hotellíbúðirnar fer tó út um linjunar, soleiðis sum tær eru lýstar í fylgiskjali 4 (sí Fylgiskjal 4 - Galdandi). Byggiøkini eru upprunaliga tillagað táverandi sjólinju, men í dag er bryggjan útbygd og plássið er betur millum bygningar og bryggjukantin. í viðgerð av byggiloyvinum (sí mál 17/01760), metti byggimálsdeildin, at tað er natúrligt, at bygd verður út um byggiøki í mun til grannabygningarnar og verandi bryggju, og at byggingin fylgdi verandi bygging á staðnum.

Í mun til nýtstluna í økinum loyvir galdandi byggisamtykt, vinnulívsendamálum og ítøkiliga: skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera (sí SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 - Galdandi.pdf). Vinnuliga er tað serliga ferðavinnnan, ið er vaksin nógv síðani hesa áseting, og Tinganes og gamla Havnin teljast millum høvuðsferðmál í Føroyum. Umsitingin metir tað vera hóskandi at broyta ásetinginarnar fyri D eindirnar, soleiðis at hesar eisini loyva bústøðum, og at loyva gistingarhúsum í D1. Umsitingin metir, at hetta kann menna ein meira fjølbroyttan og livandi býarpart.

Málið snýr seg tí um at broyta omanfyri standandi lutir, soleiðis at ætlanir fyri hotellíbúðir undir bryggjubakka kunnu fremjast. Hetta krevur tekstligar broytingar í serstøku byggisamtyktini, sí broytingarnar við reyðum/grønum á síðu 3 í skjalinum *Eindirnar D - Við rættingum.* Hetta krevur eisini eina dagføring av fygliskjali 4 (sí *Fylgiskjal 4 - Dagført*).

**Lógir, ásetingar o.a.**
Økið liggur í 2. grundumráði í almennu byggisamtyktini og í eindini D1 í serstøku byggisamtykt nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina.

<u>Í almennu byggisamtyktini er ásett í kap. 4, § 3:</u>

*2. grundumráði verður alt, sum tað er, lagt til blandaða bústaða- og miðstaðabygging. Miðstaðabyggingin má einans vera hús, sum heilt ella lutvís verða innrættað til handlar, smáhandverk, skrivstovur, stovnar, samkomuhús, heilsubótarhøli og tílíkt.*

<u>Í serstøku byggisamtyktini nr. 4 fyri Tinganes og gomlu Havnina er ásett fyri eindina D2:</u>

2. gr. Nýtsla økisins, eindirnar D: Vinnulívsendamál:

a. Eindirnar D1 og D2 skulu við teimum undantøkum, ið niðanfyri eru nevnd, einans verða nýttar til vinnulívsendamál og byggingin skal vera kannað skrivstovu-, umsitingar-, og handilsvirksemi, serstakliga tílíkum, ið hevur við havnina og fiskivinnu at gera. Eisini kann býráðið loyva at byggingin verður nýtt til goymslur og pakkhús. Uttandura goymslur kunnu bert verða gjørdar við serloyvi frá býráðnum.
b. Í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir.
c. Á ognunum kann ikki verða framt nakað slag av virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum ella sum við útsjónd síni, ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa.
d. Í D1 økinum skal niðasta hædd í bygninginum hava útvent virksemi, t.d. kafé, matstova, handil v.m.

5. gr. Stødd og staðseting húsanna o.a., Eindirnar D

a. Byggingin skal verða løgd í tey á fylgiskjalið IV strikumerktu byggiøkini og skulu bygningarnar innan byggiøkini verða samanbygdir. Byggiøkini skulu, er tað gjørligt, byggjast fult.
b. Í eindini D1 skal hæddin á bygninginum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgrindina (har húsasíðan og tak koma saman, skjøldrar ikki íroknaðir) ikki vera minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.
c. Í eindini D2 skal hæddin á bygninginum, roknað frá bryggjuni til yvirgrindina ikki vera meira enn 9 m.
d. Í eindini D1 skulu yvirgrindir og mønur vera javnfjarar við vegin a-b. Í báðum endunum D skal reisingin vera millum 30° og 45° reyst. Loyvt er at seta kvistar um so er at teir samsvara við vegleiðandi skurðir, sum sýndir eru á fylgiskjalið IV.
e. Ikki er loyvt á ognunum at byggja bilskúrar, úthús og onnur tílík smáhús.
f. Leiðingaløg skulu sum meginregla verða løgd í samsvari við vegleiðandi skipanina, sum sýnd er á fylgiskjalið III, ið er til skjals hjá býarverkfrøðingarskrivstovuni.

6. gr. Útsjónd húsanna

a. ......Allar lýsingar, eisini í eindunum D skulu vera góðkendar av serstaka byggiráðnum.
e. Í eindunum D1 og D2 skulu til framsíður, skjøldrar og tekjur ikki nýtast litir og tilfar, ið eftir meting serstaka byggiráðsins kann lýta økið.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Umsókn um byggiloyvi til bygning á matr. nr. 168a og 156, Tórshavn. undir Bryggjubakka og Rektaragøta journal nr. 17/01760*
- *Kæra um avgerð hjá hjá TK um givið byggiloyvi á matr. nr. 168a, Tórshavn (hotellíbúðir undir Bryggjubakka/Rektaragøta)* Journal nr. 21/04171

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

- *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 - Galdandi.pdf,* journal nr. 23/03101-5

- *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Rættað 28.02.2024,* journal nr. 23/03101-5
- *Eindirnar D - Við rættingum ,* journal nr. 23/03101-3
- *Fylgiskjal 4 - Galdandi,* journal nr. 23/03101-4
- *Fylgiskjal 4 - Dagført,* journal nr. 23/03101-6

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:** Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta serstøku byggisamtykt nr. 5 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Dagført 28.02.2024*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. apríl 2024:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2024:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Broytingaruppskotið til serstøku byggisamtyktina lá til hoyringar í tíðarskeiðinum 3. mai 2024 til 14. juni 2024.

Tá ið hoyringsfreistin var farin, 14. juni, hevði kommunan móttikið trý hoyringsskriv. Tvey eru frá grannum búgvandi á Reyni, og eitt er frá Tjóðsavninum. Heilt yvirskipað verður mælt frá, at byggja á matr. nr. 168a og at ein meira ítøkilig heildarætlan við árinskanningum verður gjørd í samstarvi við grannar og serstaka byggiráðið.

Tey trý hoyringsskrivini mótmæla ítøkiliga hesum viðurskiftum:

1. <u>Partar eru ikki hoyrdir/tiknir við í viðgerina</u>

Ført verður fram, at tað vil ikki vera rætt at gera størri broytingar í serstøku byggisamtyktini, uttan at serstaka byggiráðið verður uppi í hesum arbeiðinum.
Somuleiðis verður víst á, at serstaka byggiráðið varð hoyrt í samband við byggimálið, og í 2017 høvdu tey hesar viðmerkingar til byggimálið:

- *Serstaka byggiráðið metir ikki at intentiónirnar í byggisamtyktini og tilhoyrandi fylgiskjølum verða fylgdar.*
- *Serstaka byggiráðið ynskir at ein árinskanning verður gjørd í mun til øki á Reyni og tey ið har búgva viðv. sólarljós/skugga, innilokan av bústaðarøkinum, økt ferðsla, larmur o.a.”*

Funnist verður at, at hesar viðmerkingarnar ikki eru tiknar við, í mun til uppskotið um broyting av serstøku byggisamtyktini.

2. <u>Hæddin á bygninginum er ov høg</u>

Hotellíbúðarbygningurin, sum broytingarnar í serstøku byggisamtyktini fyrihalda seg til, er ikki lýstur alment í hesum málinum. Á kunnandi fundum og eftir at hava umbiðið innlit, hava partar sæð fyriliggjandi tekningar. Hæddarásetingin er ógreið, men fer væl upp um lýsingina í Fylgiskjali IV, sambært mótmæli.

3. Økt ferðsla

Virksemið í nýggja bygninginum fer sannlíkt at økja um bilaferðsluna. Í hoyringskrivunum verður gjørt vart við, at hetta fer at hava neiliga ávirkan á íbúgvar. Rektaragøta verður mett ov smøl til inngongd til nýggja bygningin, og økta ferðslan fer at minka um ferðslutrygdina. Ynskið er tí um at fáa ferðsluviðurskifti greinaði nærri.

4. Ynskja ikki gistingarhús

Mótmælt verður eisini at broyta endamálið við D1 eindini, so tað í framtíðini eisini kann nýtast til hotellvirksemi. Sambært mótmælunum uppliva íbúgvar á Reyni og Tinganesi longu neiligt trýst av øktari ferðavinnu. Tá ið nýtslan framyvir fer at loyva gistingarhúsum, er vandi fyri, at virksemið í økinum verður einsháttað og einans nýtt til ferðavinnulig endamál.
Víst verður somuleiðis á, at verandi byggisamtykt ikki loyvir virki, sum við roki, royki, deymi, gangi ella ristingum....ella á annan hátt eftir meting býráðsins kann vera teimum, sum uttanum búgva, til ampa. Og ført verður fram, at hotelíbúðirnar fara at hava hesar neiligu ávirkanir á tey sum grannar.

5. Byggilinjan skal varðveitast

Mælt verður frá, at broyta byggilinjuna, tí henda er ein týðandi partur av skapinum á Tinganesi. Víst verður eisini á, at sambært upprunaligu byggisamtyktini var ætlanin ikki at D-økini skuldu vera fult útbygd, soleiðis sum ætlanin nú fyriliggur, har bygningurin er breiðari enn upprunaligu tekningarnar á fylgiskjalið IV vísa. Eisini verður viðmerkt at upprunaliga byggifeltið framvið bryggjubakka vísir trýggjar bygningsrondir, og somuleiðis trýggjar passagur millum Rektaragøtu og Bryggjubakka. Av tí at verandi bygging í økinum ikki hevur fylgt hesi ætlan fer talið av passagum at minka frá 3 til 1, og úrslitið at Reyn verður “sperra inni”.

**Umsitingin hevur hesar viðmerkingar til hoyringsskrivini:**

Til nr 1: Partar eru ikki hoyrdir/tiknir við í viðgerina

Serstaka byggiráðið, sum er sett við umboði fyri Tórshavnar kommunu, Føroya Fornminnissavn/Føroya landsstýri og grannum í økinum, hevur til uppgávu at vegleiða býráðið, tá mál verða viðgjørd, ið koma inn undir fyriskipanir í serstøku byggisamtyktini.

Talan er sostatt um eitt ráð, sum verður hoyrt og skal vegleiða í samb. við byggimál.
Umsitingin hevur ikki mett, at serstaka byggiráðið eigur at verða hoyrt, tá serstaka byggisamtyktin verður broytt – ei heldur hevur hetta verið siðvenja at gera, tá serstaka byggisamtykt nr. 4 er broytt áður.

Viðv. at gera árinskanning av sólarljós/skugga, innilokan av bústaðarøkinum, øktari ferðslu, larmi o.ø, so metir kommunan ikki at neyðugt er at gera eyka kanningar hesum viðvíkjandi, tá talan er um bygging á einum matrikkli, sum longu er byggilendi, og tá mett verður, at byggingin annars í støðd og vavi fylgir teimum ásetingum, sum eru galdandi fyri økið.

Til nr. 2: Hæddin á bygninginum er ov høg

Í byggimálinum, mál nr 17/01760, hevur Føroya Kærustovnur tikið støðu til at hæddarásetingarnar eru í lagi í mun til tað sum byggiloyvi er givið til.
Somuleiðis hevur byggiharrin eftir áheitan frá kommununi lækkað byggingina síðani Føroya Kærustovnur tók støðu til málið.

Yvirskipað samsvara verandi fylgiskjøl í byggisamtyktini frá 1972 ikki tí bygda undir Byggjubakka, og fer kommunan í næstum at dagføra hesi skjøl, soleiðis at tey samsvara verandi umstøður.

Til nr. 3: Økt ferðsla

Umsitingin er vitandi um at verandi vegir í økinum eru smalir og lúka ikki vegastandardir fyri vegir, sum verða gjørdir í dag. Og umsitingin er somuleiðis vitandi um, at serliga undir Bryggjubakka er ferðslurok um sumrarnar, tá fólk og bilar ferðast í økinum hvørt um annað. Hetta er allarhelst eisini galdandi fyri Rektaragøtu.

Matr. nr. 168a er í dag óbygdur og verður brúktur til parkering av 13 akførum. Hotelíbúðarvirksemið kemur helst at økja nakað um ferðsluna í økinum, av tí at meira lív kemur í økið, og fólk fara at ferðast til og frá hotelíbúðunum.
Byggimyndugleikin hevur sett sum krav, at niðasta hædd skal innrættast við fýra parkeringsplássum, tvs. at ferðsluliga í mun til akfør, so verður minni bilaferðsla út undir Bryggjubakka, tá tað verða munandi færri parkeringspláss í økinum, og tá hesi 4 parkeringsplássini verða partur av ítøkiliga hotelvirkseminum.

Umsitingin arbeiðir áhaldandi við átøkum fyri tryggja trygdina í økinum, t.d. kann vísast á átakið við pullertum fyri at minka um bilaferðsluna út undir Bryggjubakka.
Helst eiga ferðsluviðurskiftini at verða nærri nágreinaði, soleiðis at hóskandi ferðsluátøk fyri trygdina í økinum kunnu verða sett í verk, men hóast ynskiligt er at fara undir hesa greining av økinum, so kann hon ikki forða eini bygging á matr. nr. 168a, tí økið er lagt út til bygging í núverandi byggisamtykt, og tá ítøkiliga virksemið ikki verður mett at økja meir um ferðsluna í mun til um okkurt annað virksemið verður bygt á økinum. Umsitingin vil vísa á, at øll bygging í økinum vil økja nakað um ferðsluna.

Til nr. 4: Ynskja ikki gistingarhús
Í verandi byggisamtykt verður loyvt virksemi til vinnulívi, so sum skrivstovu-, umsitingar- og handilsvirksemi. Eisini kann býráðið loyva goymslur og pakkhús.

Umsitingin metur ikki, at nýtslubroytingin til somuleiðis at fevna um bústaðir og gistingarhús í øki D1, fer at hava meiri neiliga ávirkan á grannalagið í mun til verandi loyvda virksemi. Hinvegin framleiðir gistingarhús helst minni ferðslu enn bústaðarbygging og skrivstovuvirksemi.

Í mun til rok, royk, deym, gang ella ristingar, so verður víst á, at talan er um hotelíbúðir, sum kunnu samanberast við vanligar bústaðareindir, tó at tey búgvandi verða ferðafólk.

Til nr. 5: Byggilinjan skal varðveitast
Umsitingin hevur tikið støðu til at broyta byggilinjuna samsvarandi verandi bygningar í økinum. Hesir eru ikki bygdir samsvarandi verandi byggisamtykt og fylgiskjali IV.

Tjóðsavnið førir fram, at innvikið her er ein týðandi partur av sjálvum skapinum av Tinganesi, og eigur ikki at kámast burtur við at flyta byggilinjur út.

Fylgiskjal 4 í galdandi byggisamtykt sýnir ikki at byggingin upprunaliga skuldi fylgja verandi matrikkulmarkið, heldur sýnir fylgiskjalið eina bygningsrond, sum leggur seg uppat Rektaragøtu og fyriheldur seg til upprunaliga bryggjukant. Hendan bygningsrondin er rættiliga greið og markant, og vildi tað verið óheppið at broti hetta við at kravt eitt innvik í ætlaðu byggingina á matr. nr. 168a.

Verandi matrikkul nr. 168a hevur eitt heldur óheppið skap í mun til verandi byggisamtykt, tí um bygt verður eftir núverandi matrikkulmarki, so kemur endamálið við verandi byggisamtykt við at skapa eina bygningsrond framvið Rektargøtu og upprunaliga bryggjukantinum ikki at kennast aftur. Somuleiðis er bryggjukanturin broyttur síðani byggisamtyktin upprunaliga varð gjørd, og tískil gevur innvikið ikki meining í mun til núverandi bryggjukant.

Sambært tekningunum av hotellbygninginum verður trappa bygd, og tí verður sambandið millum Rektaragøtu og Bryggjubakka fyri gongufólk økt.

**Viðmerkingar frá umsitingini:**

Byggiloyvið varð upprunaliga givið umsøkjara, grundað á, at umsitingin metti, at umsóknin fyrihelt seg til verandi ásetingar í serstøku byggisamtyktini.

Tá Føroya Kærustovnur broytir hesa niðurstøðu, og tá umsitingin annars hevur hildið og viðgjørt umsóknina út frá metingini, at virksemið býarskipanarliga hóskar seg á staðnum, og at tað tænir økinum býarskipanarliga at bygningsrondin verður inntakt, so verður mett neyðugt at broyta ásetingarnar í serstøku byggisamtyktini, soleiðis at bygningsrondin undir Bryggjubakka kann byggjast fult út.

**Nýggj skjøl**
Ummæli til Tórshavnar kommunu.pdf, journal nr 23/03101-9.
Hoyringssvar í sambandi við ætlaða broyting av byggisamtykt nr 1839563_1_1.PDF, journal nr 23/03101-10.
20240614-Braev_ut-TSF_t_Tk-Hoyringssvar_broyting_serstaka_byggisamtykt_nr_4.docx 1839781_1_1.PDF, journal nr 23/03101-11.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:

- at staðfesta ætlaðu broytingarnar í serstøku byggisamtykt nr. 4 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2022 – Rættað 28.02.2024*,
- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. juni 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum við tí broyting, at punkt d. undir eindunum D. verður strikað.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Borgarstjórin setti fram soljóðandi broytingaruppskot:

Tikið verður undir við byggi- og býarskipanarnevndini við teirri viðmerking til D økið, at har tað stendur at mest loyvda hædd til yvirtrom er 3-4 metrar, skal hetta vera 3 metrar, umframt at smogur verða uttan tak og sjónligar í fylgiskjalinum.

Fyri broytingaruppskotinum atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Astrið Breckmann og Guttormur í Skála

Ímóti broytingaruppskotinum atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Hildur Eyðunsdóttir og Kári Johansen.

Soleiðis broytt varð sostatt samtykt at taka undir við tilmælinum frá byggi- og býarskipanarnevndini við 9 atkvøðum fyri, 4 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Ískoyti**
Broytingaruppskotið (sí skjal sí *Serstøk byggisamtykt nr 4 - D1 og D2 broytingar 04.09.2025* og *Fylgiskjal 4 - Broytingaruppskot 04.09.2025*) lá frammi til almenna hoyring millum 4. september og 16. oktober 2025. Tá ið hoyringstíðarskeiðið var farið hevði kommunan móttikið 3 mótmælir og broytingaruppskot,

umboðandi 16 grannar, Tjóðsavnið og Jónas Tór Næs, advokat, umboðandi tveir eigara. (sí skjal *Viðmerkingar og broytingaruppskot, 2025*).

Í skrivunum verður funnist at fleiri viðurskiftum, sum vóru viðgjørd eftir fyrra hoyringstíðarskeið. Harímillum at partar ikki hava verið hoyrdir, byggifeltið eigur at varðveitast, og at talið av passasjum/smogum eigur at vera varðveitt. Harafturat verður m.a. mælt til ikki at byggja upp um veghædd á Rektaragøtu, at dagføra heildarætlan fyri økið, og at greiningar av ferðslu, ljósviðurskiftum og volumenkanningar verða gjørdar.

Umsitingin ásannar, at ein heildardagføring av serstøku byggisamtyktini fyri Tinganes og Reyn hevði verið ynskilig at framt. Mett verður, at hetta arbeiðið eigur at vera framt í serskiltum máli, og at umsitingin í hesum málinum tekur støðu út frá viðmerkingunum, sum ítøkiliga snúgva seg um broytingarnar fyri D1 eindinar.

Niðanfyri er samanumtøka av viðmerkingum og svar frá umsitingini:

<u>1. Bygging á D1 økinum skal ikki byggjast uppum veghæddina á Rektaragøtu</u>
Grannar (16 undirskriftir) mótmæla bygging omanfyri veghæddina á Rektaragøtu. Orsøkin er at bygningurin fer at byrgja fríøkið og spæliplássið inni. Bygningurin fer at virka sum ein múrur, ið forðar sjónliga sambandið millum gomlu Havnina og økið kring Vestaruvág, og er harvið í andsøgn við endamálið við byggisamtyktini, sum er at varðveita sermerkta dámin í økinum.

*<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:</u>*
*Umsitingin er ikki samd í, at bygging omanfyri veghæddina á hesum økinum er í andsøgn við endamálið við byggisamtyktini. Orsøkin er at økið í upprunaligu byggisamtyktini hevur verið lýst sum byggiøki, við møguleika at byggja upp um veghædd. Bygging í hesum økinum og omanfyri veghædd, verður mett at skapa eina samanhangandi rond og andlit út móti Vestaruvág, sum er í samsvari við galdandi serstøku byggisamtykt.*

<u>2. Byggingin verður ov høg</u>
Bygningurin verður ov høgur í mun til intentiónina í galdandi byggisamtykt. Grundgivið verður út frá serstakari byggisamtykt við Húsabrúgv, sum somuleiðis hevur til endamáls at varðveita dámin. Framvið Áarvegnum ásetur byggisamtyktin at mest loyvda hædd javnt lækkar, tess tættari bygd verður móti Reyn. Tískil stríðir hæddarásetingin framvið Bryggjubakka ímóti hesi grundhugsan, við at loyva hækkandi bygging, út móti Tinganesi.

Víst verður á, at tá eigarar av matr.nr. 156 løgdu saman teir matriklar, sum eina ferð vóru fleiri í tali, gjørdist ein avleiðing, at møguliga hæddin á bygningi á samanløgdu matriklunum kann hækka 1,8 m í mun til støðuna áðrenn. Orsøkin er, at byggisamtyktin ásetur, at hædd á bygningum í D1 skal roknast frá hægsta jørðildi móti vegnum til yvirgrindina. Heitt verður á kommununa um at broyta tekstin í byggisamtyktini, soleiðis at orðingin “hægsta jørðildi” ikki verður brúkt, men ístaðin “miðal jørðildi” ella annað sum ger, at andlitið úteftir Vestaruvág verður javnt og í samsvar við byggingina innast undir Bryggjubakka, og á tann hátt sambært upprunaligu ætlanini við byggisamtyktini.

*<u>Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:</u>*
*Í mun til serstøku byggisamtyktina fyri Húsabrúgv verður henda samanberingin ikki mett at vera viðkomandi. Orsøkin er, at onki byggisamtyktarkrav er um, at bygging sum heild skal vera lækkandi, tess nærri bygt verður móti Tinganesi.*

*Tað er rætt, at samanlegging av matriklum, tá støði verður tikið í hægsta jørðildi heldur enn miðaljørðildi, í hesum førinum elvir til nakað hægri loyvda bygging í støðum. Av tí at Rektaragøta er eitt vet hægri enn Bryggjubakki, so verður byggingin loyvd hægri enn elstu bygningarnir Undir Bryggjubakka. Umsitingin metir, at hetta er ein fyrimunur í mun til galdandi byggiteknisk krøv, tí byggingin verður, eins og elsti bygningurin móti Vágsbotni, í fýra hæddum, íroknað loftshæddina.*

*Somuleiðis er hæddin lækkað nakað, tá býráðið 18. juni 2025 samtykti at broyta hæddarásetingarnar undir Eindunum D, stk. 2, har upprunaliga kravið var, at hæddin á bygningum, roknað frá hægsta jørðildi móti vegnum a-b til yvirgrindina ikki at verða minni enn 3 m og ikki meira enn 4 m.*

*Núverandi uppskot ásetur, at bygningar í mesta lagi kunnu byggjast 3 m til yvirgrindina. Samanumtikið verður mett, at byggingin ikki lækkar virðið á samlaðu framsíðuni móti havnarlagnum, men heldur hækkar um virðið.*

3. Krøv um bústaðarskyldu
Mælt verður til, at bústaðarskylda verður ásett, og mælt verður frá at byggja gistingarhús og hotellíbúðir á hesum økinum. Kommunan verður biðin um at svara, um ætlanin er at loyva hotellíbúðum í økinum og hvat allýsingin fyri hesum er.

Mælt verður eisini til at halda fast við galdandi áseting fyri punkt b, um at tað í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir, ella at leggja nýggja orðing afturat, sum t.d. sigur: “Ovara helvtin av samlaðu hæddunum er loyvt at innrætta til bústaðir”. Orsøkin er, at skurðir, sum vísa møguliga innrættan fyri eindirnar D, hava vísa eina góða dispositión, sum ásetingin skal fyrihalda seg til.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Kommunan hevur ikki heimild at krevja bústaðarskyldu í privatum byggiverkætlanum sambært § 5a í býarskipanarlógini. Í galdandi ásetingum verður útvent virksemi kravt í niðastu hædd móti havnarlagnum. Mett verður, at tað er óneyðugt at hava ásetingar sum krevja, at “í ovastu húsahædd er loyvt at innrætta íbúðir”, tá ið nýtslan fyri D eindirnar framyvir verður kannað* vinnulívsendamáli og bústaðarendamáli.

*Hotellíbúðir veita meira pláss og fleiri hentleikar enn vanlig gistingarhús, sum ikki eru loyvd í D1 eindunum. Endamálið er at veita umstøður til fólk, sum vitja í eitt longri tíðarskeið, og gerst málbólkurin tískil einstaklingar ella familjur, sum ferðast í arbeiðisørindum. Møguleiki verður at byggja og nýta bygning til hetta endamálið, sambært uppskotinum um byggisamtykt.*

4. Væntandi atlit til útsjónd og krav um at dagføra heildarætlan
Galdandi fylgiskjal IV lýsir væntaða útsjónd móti Vestaruvág, tá økið er fult bygd. Uppskotið er frá 1972 og lýsir bygging har yvirgrindir og mønur eru javnfjarar við vegin. Mælt verður til at broyta byggisamtyktina, soleiðis at fyri partin av eindini D1, kunnu mønir liggja uppá tvørs, um hetta gevur snøggari bygningsloysnir og er til fyrimuns fyri økið frammanfyri og aftanfyri. Grundgevingin fyri hesum er við íblástri frá Tyske Bryggen í Bergen, og at sambært gomlum tekningum hava bygningar staðið við takrygginum uppá tvørs av Tinganesi. Hetta kann eisini skapa betri ljósviðurskifti á Rektaragøtu og í passasjuni millum Rektaragøtu og Vestaruvág.

Spurt verður, um kommunan ætlar sær at gera eina heildarætlan, og um ikki, verður kommunan biðin um at grundgeva fyri hesum. Víst verður á manglandi tilfar, sum lýsir útsjónd við støði í dagførdum árinskanningum, volumenstudie og sólargangskanningum, til tess at lýsa væntaðar avleiðingar fyri økið og fyri íbúgvarnar, tá bygging verður framd sambært uppskotinum um broyting í byggisamtyktini.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Upprunaliga uppskotið, sum fekk byggiloyvi í 2021 (sí mál 17-01670) hevði takmønur ið vendu vinkulrætt við Rektaragøtu, og ikki javnfjart, sum serstaka byggisamtyktin krevur. Mett var tá, eins og mótmæli omanfyri vísir á, at frávikið viðv. mønu hevði verið viðvirkandi til at bøta um ljósviðurskiftini á staðnum.*

*Eftir at byggimálið varð kært og Føroya Kærustovnur hevði tikið avgerð, varð m.a. staðfest at mønurnar ikki vóru í samsvari við ásetingar í serstøku byggisamtyktini. Ráðgevar hava síðani broytt uppskotið við at minka kvistar á eystursíðuni, lækka yvirgrindina 1 m á eystursíðuni og gjørt tekjuna javnfjara við Rektaragøtu. Viðkomandi tekningar og skuggadiagrammir, sum lýsa upprunauppskotið eru at finna í skjølunum HUB uppskot við kvistum og longsgangandi mønu 230224_A3 liggjandi og Skuggadiagramm kl 09, 12, 15, 18.pdf*

*Umsitingin ásannar at fleiri serstakar byggisamtyktir, harímillum serstaka byggisamtyktin fyri Tinganes og Gomlu Havnina, treingja til eina heildardagføring. Vegna væntandi starvsfólkatilfeingi og raðfesting er hetta arbeiðið ikki sett í gongd. Umsitingin metir at fyriliggjandi uppskot er í samsvari við intentiónina í serstøku byggisamtyktini og at ein størri dagføring av heildarætlanini er óneyðug, áðrenn støða verður tikin til hetta málið. Mælt verður tí til at halda fast í hesi broyting, grundað á at vavið og nýtslan eru í samsvari við galdandi byggisamtykt.*

5. Ikki nøktandi hoyring
Mótmælið førir fram, at ein uppgáva hjá serstaka byggiráðnum er at vegleiða kommununa um byggisamtyktina við tí fyri eyga at varðveita dámin í Tinganesi og gomlu Havnini. Um broytingar verða gjørdar í byggisamtyktini uttan at taka Serstaka Byggiráðið við upp á ráð, so verður uppgávan hjá ráðnum ómøgulig. Tá ið søkt verður um bygging eftirfylgjandi, er tað ov seint og kravt verður tí, at serstaka byggiráðið verður hoyrt.

Serstaka byggiráðið varð hoyrt í sambandi við upprunaliga byggimálið, og á fundi tann 5. juli 2017 mælti serstaka byggiráðið frá verkætlanini m.a. vísandi til, at ferðsluviðurskiftini ikki eru lýst, og at hetta tykist at vera í andsøgn við verandi hugburð hjá kommununi, har kommunan heldur roynir at avmarka ferðsluna í økinum. Harafturat hevur serstaka byggiráðið viðmerkt, at "bústaðarøkið á Reyni kemur at liggja í skugganum av ætlaðu høgu byggingini, og at fatanin av, at býlingurin liggur á einum reyni, hvørvur."

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Víst verður svar Til nr 1: Partar eru ikki hoyrdir/tiknir við í viðgerina í fyrra hoyringsumfarinum:*
*Serstaka byggiráðið, sum er sett við umboði fyri Tórshavnar kommunu, Føroya Fornminnissavn/Føroya landsstýri og grannar í økinum, hevur til uppgávu at vegleiða býráðið, tá mál verða viðgjørd, ið koma inn undir fyriskipanir í serstøku byggisamtyktini.*
*Talan er sostatt um eitt ráð, sum verður hoyrt og skal vegleiða í sambandi við byggimál.*
*Umsitingin hevur ikki mett, at serstaka byggiráðið eigur at verða hoyrt, tá serstaka byggisamtyktin verður broytt – ei heldur hevur hetta verið siðvenja at gera, tá serstaka byggisamtykt nr. 4 er broytt áður.*

*Í mun til niðurstøðuna frá 2017 og kravið um at lýsa ferðsluviðurskiftini nærri, verður somuleiðis víst til svar til Til nr. 3: Økt ferðsla í fyrra hoyringsumfarinum, tá umsitingin svaraði soleiðis:*

*Viðv. at gera árinskanning av [...] øktari ferðslu, larmi o.ø, so metir kommunan ikki at neyðugt er at gera eyka kanningar hesum viðvíkjandi, tá talan er um bygging á einum matrikkli, sum longu er byggilendi, og tá mett verður, at byggingin annars í støðd og vavi fylgir teimum ásetingum, sum eru galdandi fyri økið. Umsitingin er vitandi um at verandi vegir í økinum eru smalir og lúka ikki vegastandardir fyri vegir, sum verða gjørdir í dag. Og umsitingin er somuleiðis vitandi um, at serliga undir Bryggjubakka er ferðslurok um sumrarnar, tá fólk og bilar ferðast í økinum hvørt um annað. Hetta er allarhelst eisini galdandi fyri Rektaragøtu.*

*Matr. nr. 168a er í dag óbygdur og verður brúktur til parkering av 13 akførum. Hotelíbúðarvirksemið kemur helst at økja nakað um ferðsluna í økinum, av tí at meira lív kemur í økið, og fólk fara at ferðast til og frá hotelíbúðunum.*
*Byggimyndugleikin hevur sett sum krav, at niðasta hædd skal innrættast við fýra parkeringsplássum, tvs. at ferðsluliga í mun til akfør, so verður minni bilaferðsla út undir Bryggjubakka, tá tað verða munandi færri parkeringspláss í økinum, og tá hesi 4 parkeringsplássini verða partur av ítøkiliga hotelvirkseminum.*

*Umsitingin arbeiðir áhaldandi við átøkum fyri at tryggja trygdina í økinum, t.d. kann vísast á átakið við pullertum fyri at minka um bilaferðsluna út undir Bryggjubakka.*
*Helst eiga ferðsluviðurskiftini at verða nærri nágreinað, soleiðis at hóskandi ferðsluátøk fyri trygdina í økinum kunnu verða sett í verk, men hóast ynskiligt er at fara undir hesa greining av økinum, so kann hon ikki forða eini bygging á matr. nr. 168a, tí økið er lagt út til bygging í núverandi byggisamtykt, og tá ítøkiliga virksemið ikki verður mett at økja meir um ferðsluna í mun til um okkurt annað virksemið verður bygt í økinum. Umsitingin vil vísa á, at øll bygging í økinum vil økja nakað um ferðsluna.*

6. Byggifeltið eigur at vera varðveitt
Tjóðsavnið metir ikki, at víðkaða bryggjan er haldfør grundgeving fyri at víðka og broyta byggifeltið, og at tað er skeivt at rætta út bygningslinjuna. Innvikið, sambært galdandi byggisamtykt, er ein týðandi partur av søguliga skapinum av Tinganesi, og eigur ikki at kámast burtur við at flyta byggilinjuna. Strekkið millum innasta bygning í Vágsbotni og ytsta bygningin undir Rektaragøtu er um 170 m, og er økið við Tinganes og Reyn ov gott til einsrætting og beinar strikur og beinar kaikantar.

Við hesi broyting víðkar kommunan breiddina á komandi bygging, so at talan um ein stóran og óhóskandi bygningsmassa í ytra partinum av Bryggjubakka.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Um byggifeltið framyvir skal fyrihalda seg til bryggjuskapið í dag ella søguliga innvikið, er ein grundleggjandi spurningur, um byggisamtyktin skal taka støði í galdandi umstøðum ella søguligum sporum. Sum víst hevur verið á, er endamálið við byggisamtktini at varðveita, men samstundis hevur byggisamtyktin eisini upprunaliga havt til endamáls at menna økið.*

*Ein einføld og bein byggilinja umboðar skynsama nýtslu av byggilendinum, og fyriheldur seg til núverandi bryggjukant og byggilinju. Av tí at byggifeltið verður víðkað kann bygningur á matr. nr. 168a byggjast við somu breidd sum grannabygningarnir, og metir umsitingin hetta vera hóskandi.*

7. Tal av passasjum fer frá 3 til 2:
Talið av passasjum (smogum) millum Reyn og bryggjuna verður sambært uppskotinum, samanborið við galdandi fylgiskjal IV, lækkað úr trimum til tvær. Hetta sperrar íbúgvarnar frá økinum Undir Bryggjubakka og haldast skal fast við uppruna talið av passasjum. Ein skal í hesum sambandi leggja til merkis orðingar í viðmerkingunum til byggisamtyktina um at hugsa langsiktað og gera broytingar, tá hús verða endurnýggjaði.

*Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:*
*Smogan, ið sipað verður til, er staðsett millum elsta partin av Bryggjubakka og matr. nr 178a, har Føroya Fiskimannafelag húsast í dag. Hesin bygningurin er sambært býaratlasinum bygdur um 1930.*

*Fylgiskjalið frá 1972 lýsir tískil eina skipan, sum enn ikki er framd, og er umsitingin samd í viðmerkingini og upprunaligu intentiónini, um at ein møgulig passasja á hesum staðnum hevði verið hóskandi. Orsøkin er, at hon hevði brotið longsta bygningsmassan sundur, sum er umleið 80 m. Tí er møguliga skilagott at varðveita hesa ætlan í eini dagførdari heildarætlan fyri økið. Í mun til uppskotið og fyri ytra partin av bryggjubakka tekur broytingin útgangstøði í verandi skipan, og verður talið av passasjum sambært byggiætlanini í veruleikanum økt frá einari til tvær (ella frá 3 til 4, um gongusambandið í ytru endunum telur við), Bygningsrondin í ytra partinum av Bryggjubakka verður tá ongastaðni longri enn umleið 40 m, og hetta verður mett hóskandi.*

**Nýggj skjøl:**
- j.nr. 25/01086-7 - *Serstøk byggisamtykt nr 4 - D1 og D2 broytingar 04.09.2025*
- j.nr. 25/01086-7 - *Fylgiskjal 4 - Broytingaruppskot 04.09.2025*
- j.nr. 25/01086-13 - *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2026 – Rættað 04.09.2025*
- j. nr. 25/01086-12 – *Viðmerkingar og broytingaruppskot, 2025*
- j. nr. 17/01760-108 - *HUB uppskot við kvistum og longsgangandi mønu 230224_A3 liggjandi*
- *j.nr. 17/01760-5 - Skuggadiagramm kl 09, 12, 15, 18.pdf*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til:
- at staðfesta ætlaðu broytingarnar í serstøku byggisamtykt nr. 4 sambært skjalinum *SB_Tórshavn_TinganesReyn_1972_4_2026 – Rættað 04.09.2025*

- at málið verður beint í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Kári Johansen tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í byggi- og býarskipanar-nevndini, ið fall við seks atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og einariblankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Birgir Nielsen

# <u>185/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22/00590</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 21.11.2025 | 183/25 | 25/01100-7 |
| 2 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 275/25 | 25/01100-7 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2026 | 122/26 | 25/01100-7 |
| 4 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 185/26 | 25/01100-7 |
| 5 Kirkjubøar/Velbastaðarnevndin | 11.06.2026 | 7/26 | 25/01100-7 |

**Upprunin til málið**
Hetta málið snýr seg um at endurskoða byggisamtyktina fyri Kirkjubø og hevur sín uppruna í máli um Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri allar bygdirnar í kommununi, sí *45/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 12.02.2024 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*

Fyri fleiri av bygdunum, harímillum Kirkjubø, eru byggisamtyktirnar ikki vorðnar endurskoðaðar í síni heild, síðani tær eru blivnar partur av Tórshavnar kommunu, og tí er ósamsvar millum byggisamtyktirnar fyri bygdirnar og almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu. Harumframt er munur á, hvat loyvt verður í teimum ymisku bygdunum, og hetta ger byggisamtyktirnar torskildar og truplar at umsita og viðførir ójavnvág í kommununi.

Í málinum Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar eru yvirskipað viðurskifti viðgjørd við tí endamáli at fáa eins ásetingar í byggisamtyktunum fyri bygdirnar, tó við nøkrum frávikum, tá talan er um staðbundin viðurskifti, serstakan bygdadám og tílíkt.

Hetta málið er harumframt eitt framhald av málinum *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø,* j.nr. *22/00590,* sum ítøkiliga snýr seg um endurskoðanina fyri byggisamtyktina í Kirkjubø, sí *Upprunalig málslýsing, Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22-00590*

**Lýsing av málinum**
Kirkjubøur er saman við Velbastað fevnt av byggisamtyktini fyri Kirkjubø/Velbastað, ið varð gjørd í 1987. Í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar verður mælt til, at bygdirnar Kirkjubøur og Velbastaður fáa hvør sína almenna byggisamtykt.

Tær ymisku ásetingarnar fyri allar bygdirnar eru samanbornar, og funnið er fram til nakrar felags ásetingar, ið hóska til allar bygdirnar.

Áðrenn endurskoðanina av byggisamtyktini fyri Kirkjubø, eru hesi ymisku økini í bygdini:

B: Sethús
C: Vinnuendamál
C1A: Vinnuendamál
D: Havnarøki
D 1: Ferjuhavn
E: Almennir stovnar
F: Almenn frítíðarøki
G: Neyst og bátapláss
H: Frílendi
H 1: Friðað øki
J: Bóndahús
K: Landbúnaður

Niðanfyri eru ásetingarnar í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø, sum sambært uppskotinum eru tær somu fyri allar bygdirnar:

A: Bústaðarøki
B1: Havnarøki
B2: Vinnuøki
C: Miðstaðabygging
D1: Frílendi
D2: Almennir stovnar og mentan
E: Neyst
F: Frítíðarhús
G: Bóndahús
4. gr.: Landbúnaður

Sum sæst, so eru tað færri øki í uppskotinum til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø.

- B: Sethúsaøki er broytt til A: Bústaðarøki
- Tey bæði vinnuøkini C: Vinnuendamál og C1A: Vinnuendamál eru broytt til B2: Vinnuøki.
- Tey bæði havnarøkini D: Havnarøki og D 1 : Ferjuhavn, eru broytt til B1: Havnarøki.
- Tey bæði almennu økini E: Almennir stovnar og F: Almenn frítíðarøki eru broytt til D2: Almennir stovnar og mentan.
- G: Neyst og bátapláss er broytt til E: Neyst.
- Tey bæði almennu grønu økini H: Frílendi og H 1 : Friðað øki eru broytt til D1: Frílendi.
- J: Bóndahús er broytt til G: Bóndahús.
- K: Landbúnaður er broytt til 4. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

Tær ítøkiligu broytingarnar í økjum og ásetingum eru nærri lýstar í skjalinum *Kirkjubøur – áðrenn og eftir broyting* og *Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025.*

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Upprunaliga uppskotið (sí skjal *25/01100-14, Upprunaligt uppskot, 21.11.2024*) varð samtykt í býráðnum 21. mars 2024 og lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum millum 22. novembur og 29. januar 2025. Kommunan móttók fimm hoyringarskriv (sí *Viðmerkingar og broytingaruppskot)* umboðandi borgarar í Kirkjubø og Tjóðsavnið, og verða allar viðmerkingarnar viðgjørdar niðanfyri.

Samanumtikið snúgva viðmerkingar seg um at verja dámin, og at leggja fleiri økir út til sethúsaøki. Eitt møguligt neystaøki eigur at endurhugsast í øðrum staði. Mótstríðandi sjónarmið eru um miðstaðarøkið í bygdini, har ynskið annaðhvørt er, at økið skal mennast til ferðavinnuendamál, ella nýtast sum nýtt bústaðarøki. Tjóðsavnið vísir á týdningin, at møgulig bygging í Kirkjubø verður framd varliga og í samráð við friðingarmyndugleikar.

- **Øki C og øki G, sambært uppskotinum, skal kunna nýtast sum ferðavinnuligt øki**

Bygningsleivdir o.a. vitjunarvert í økinum skal kunna gagnnýtast av festinum í ferðavinnuligum samanhangi bæði nú og framyvir. Øki C, sambært uppskotinum, er egnað til útbygging og nýbygging av ferðvinnuvirksemi. Víst verður á, at gamla fjósið (í uppskotinum í øki G) ikki longur er egnað til landbúnaðarligt virksemi, og at tað er meira skynsamt, at bygningurin verður dagførdur við ferðavinnuligum endamálum. Byggisamtyktin skal stuðla og ikki forða framtíðar útbygging og umvæling av bygningum til hesi endamál.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***

*Eftir nærri viðgerð í umsitingini verður mett óhóskandi at útbyggja bøin omanfyri Gamla veg. Mett verður, at fløtan eigur at verða varðveitt, soleiðis at dámur og sýnið heim í gomlu bygdina verður tryggjað.*

*Umsitingin er samd í, at gamla fjósið kann mennast og endurnýtast til ferðavinnuligt endamál, og hevur gjørt eitt nýtt uppskot, har ásetingar fyri miðstaðarøkið vera galdandi millum fjósið og havnarlagið. Partur av óbygda bønum eystanfyri verður broyttur til D1 øki (frílendi).*

**Til tess at tryggja, at bygging í øki C verður framd við fyriliti til serstaka økið, metir umsitingin, at tað er neyðugt at rætta punkt 2 í øki C, sum nú sigur:**

*“Bygging verður einans loyvd sambært eini byggiætlan, sum byggivaldið hevur góðkent fyri eitt natúrligt avmarkað øki. “*

soleiðis at tað ístaðin stendur:

*“Bygging verður einans loyvd sambært heildarætlan, sum sýnir, hvussu økið verður skipað, og sum verður góðkend sum serstakt skjal av býráðnum og avvarðandi myndugleikum.”*

- **Fleiri bústaðarøkir**

Í broytingaruppskotið (10 undirskriftir) verður grundgivið fyri at leggja fleiri nýggj bústaðarøkir afturat. Sambært viðmerkingini er tað av alstórum týdningi at veita møguleika at byggja fleiri bústaðir skjótt, soleiðis at yngri fólk leggjast afturat og bygdin verður framtíðartryggjað. Hesi ítøkiligu broytingaruppskot verða nevnd:

- **Mælt verður til at øki C (miðstaðarøki) sambært uppskotinum verður broytt til øki A (sethús).**

Hetta økið kann sambært viðmerkingini leggjast til bústaðarbygging á ein skjótan og ómakaleysan hátt, av tí at tekniskar leiðingar liggja tætt við. Víst verður eisini á, at nógv orka hevur verið løgd í at menna ferðavinnuna í Kirkjubø seinastu árini, og er hendan broytingin tískil ein tiltrongd umraðfesting.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Vísandi til viðmerking omanfyri metir umsitingin, at økið hevur týdning sum óbygt frílendi, og verður frámælt at byggja nýggjar bústaðir so tætt at søguliga økinum, ið telist millum mest vitjanarverdu býlingar í landinum.*

- **Fleiri sethús í Lágabø**

Mælt verður til, at sethúsaøkið í Lágabø verður økt, soleiðis at møguleiki verður at byggja eitt hús hvørjumegin vegin, við innkoyringina til býlingin, umframt at vegurin verður longdur, soleiðis at pláss verður fyri umleið fýra sethúsum vestanfyri.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin er jalig fyri møguleikanum at víðka sethúsaøkið, og hevur tillagað uppskotið samsvarandi broytingaruppskotinum, soleiðis at býlingurin hevur møguleika at veða víðkaður í framtíðini. Byggisamtyktarøkið verður víðkað sambært eini ætlan, har mælt verður til grundstykkjavíddir á uml. 400m$^2$, umframt at pláss verður lagt av til parkering.*

- **D1 økið millum Geilina og Ovaraveg skal broytast til A (sethús)**

Mælt verður frá at áseta frílendi, har galdandi F økið sambært uppskotinum verður broytt til D1 (partur av matr. nr 25b). Spælipláss við fótbóltsvølli er staðsett nærhendis, og sambært grundgevingini er bygdin mestsum eitt stórt frílendi. Ístaðin átti hetta økið at verið broytt til sethúsaøki.

Síðani hoyringsfreistin er farin, hevur kommunan samskift við eigarar av matr. nr. 25b, (sí mál mál nr. J.nr. 25/06086) og ynskja tey somuleiðis, at byggisamtyktin verður broytt, soleiðis at fríøkið framyvir verður broytt til sethúsaøki.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Staðsetingin av matr. nr 25b er miðskeiðis í bygdini, har fleiri vegir renna saman, og er eingin beinleiðis atkomuvegur til økið. Tískil eru umstøður, ið tala fyri, at økið verður ment sum fríøki ella spælipláss fyri bygdina. Hóast ásetingar fyri F-alment fríøki hava verið galdandi síðani áðrenn kommunusamanleggingina, er henda ætlanin ongantíð framd, og ístaðin er spælipláss staðsett á matr. nr 20c.*

*Mælt verður til at ganga viðmerkingini á møti, so at sethúsaøkini omanfyri Geilina og Ovaraveg hava møguleika at verða knýt saman í framtíðini. Sambært matrikkullógini § 17 stk 8, kunnu matriklar ikki býtast frá, uttan við atgongd til almennan veg, og er menning av økinum tískil treytað av, at eigari tryggjar nøktandi vegatkomu.*

- **A økið vestan fyri "Inni á Fjósi 6" verður broytt til C øki**

Ynskið er ikki, at Kirkjubøur skal mennast sum ein long og "óbygdaslig" bygd. Økið vestan fyri Inni á Fjósi 6 eigur heldur at verða lagt av til íbúðarbygging, sum kann tryggja, at eldri borgarar í Kirkjubø fáa møguleika at selja hús og flyta í minni íbúð. Hetta kann skapa umstøður, so yngri familjur fáa gagnnýtt hús í bygdini.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum um endurskoðan er omanfyri 300 m langur geiri avsettur til sethúsabygging omanfyri grúsvegin vestan fyri Inni á Fjósi 6. Henda ásetingin hevur verið galdandi síðani 80'ini, uttan at útstykking er framd. Umsitingin er samd í, at tað ikki er ynskiligt at menna kirkjubø sum eina avlanga og smala bygd.*

*Umsitingin metir tó ikki, at íbúðarbygging hóskar til dámin í Kirkjubø, og mælir tískil frá at leggja økið av til C-miðstaðarbygging. Ásetingar til miðstaðarbygging hava til endamáls at skipa tætta og fjølbroytta bygging miðskeiðis í bygdini.*

*Mælt verður til at strika nevnda byggilendið, og at støða kann takast til nýtslu, snið o.a. í samband við eina ítøkiliga bygdaætlan.*

- **Leggja áseting afturat, sum tryggjar, at sethús hava mønureising, eru svørt/myrk og hava hvít ella reyð vindeygu.**

Ynskið er at gera ásetingar, sum tryggja dámin, tá bygdin í framtíðini verður ment.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Verandi dámur, har flestu sethúsini hava mønureising, eru svørt, hava reyð ella hvít vindeygu, er staðbundin siður, ið hevur ment seg uttan treytir í byggisamtyktini. Av tí at talan er um serstakt arkitektoniskt brigdi fyri Kirkjubø, sum umsitingin metir er vert at verja, er uppskot um áseting lagt afturat, sum hevur til endamáls at verja henda dámin framyvir.*

*Umsitingin gongur viðmerkingini á møti við at strika møguleika at byggja sethús við einvegis takhalli, og leggur niðanfyristandandi orðing afturat ásetingum galdandi fyri umráðispart A:*

*"10. Dámurin skal varðveitast í samsvari við føroyskan byggisið. Framsíður og skjøldrar skulu vera úr viði og skulu vera svørt ella myrk. Vindeygu skulu vera hvít ella reyð. Tekjur skulu vera svartar, grønar ella flagaðar."*

- **Óheppin hæddarbroyting í sethúsaøki**

Mest loyvda hædd til mønu í sethúsaøkjum hækkar úr 8 m upp í 9 m, og hetta kann føra til óhóskandi hús í bygdarmyndini.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Av tí at galdandi áseting tekur útgangstøði í miðaljørðildi, so merkir tað í veruleikanum, at hús í bróttum lendi, og í ávísum førum kunnu byggjast upp um 9 m. Dømir eru um, at hús eru bygd hægri enn 8 m í*

*Kirkjubø. Uppskotið tekur útgangstøði í, at mátað verður frá planeringskotu, og er betri í samsvari við bygging, har innleggingar so sum ventilatión er millum hæddirnar.*

*Broytingin merkir tó, at í sløttum lendi sleppa hús hægri enn í verandi áseting, men av tí at onki nýtt sethúsaøki er lagt út upp at søguligu húsunum, metir umsitingin ikki at henda ásetingin viðførir týðandi broytingar í bygdamyndini.*

- **Ynskið um at tryggja íbúgvum úr Kirkjubø fyrsta rætt til nýggj grundstykkir**

Ynskið er, at skipan verður sett í verk, sum hevur til endamáls at tryggja, at borgarar búsitandi í Kirkjubø koma í fyrstu røð, tá ið nýggj grundstykkir vera útlutaði. Lagt verður afturat, at borgarar við tilknýti til bygdina (t.d. tey, ið eru uppvaksin í Kirkjubø) koma í aðru røð.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Treytir í sambandi við útlutan av grundøkjum hoyra ikki til ásetingar í byggisamtykt.*

*Býráðið hevur í 2023 samtykt reglugerð fyri útlutan av grundøkjum til sethús, og stríðir broytingaruppskotið ímóti reglugerðini, sum raðfestir borgarar við skrásettum bústaði í Tórshavnar kommunu, umframt føroyingar í lestrarørindum. Ynskjast aðrar treytir fyri Kirkjubø, verður mælt til at taka málið upp í serstøkum málið, sum í fyrstu atløgu skal takast upp í staðbundnu nevnd.*

- **Bústaðarskylda**

Bygdin er lítil og tað hevur stóran týdning, at hús ikki standa tóm. Mælt verður til bústaðarskyldu, og at tryggja langtíðarleigumál, soleiðis at hús ikki vera bygd ella keypt við stutttíðarútleigu (summarhús) sum endamáli.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Ein býarskipanarlig avbjóðing í allari kommununi er at fyribyrgja, at býlingar standa tómir, og er tað ynskiligt, at hetta framyvir í størri mun verður skipað í summarhúsaøkjum (F øki í byggisamtyktini). Umsitingin hevur í hesi løtu ikki heimild at seta krøv um bústaðarskyldu í byggisamtykt, men hevur áður heitt á landsmyndugleikar at fáa møguleikar til tess. Umsitingin hevur eisini heitt á landsmyndugleikar um at fáa heimild at avmarka stutttíðarleigu.*

- **Staðseting og ásetingar fyri neystaøkið**

Eigari av neystagrund matr. nr 17 vísir á, at økið sambært uppskotinum verður innan fyri øki C, har byggi- og nýtslustigi er ávikavist 0,25 og 0,5, og ynskir at hendan ásetingin verður broytt, soleiðis at byggjast kann út í mark, sum vanligt er í neystagrundum.

Í einum øðrum hoyringsskrivi sigur sami borgari, at staðseting av neystaøkinum sambært galdandi byggisamtykt og uppskotinum er óheppin, tí at um økið verður nýtt til nýggja neystabygging fer tað at hava neiliga umhvørvisliga ávirkan á fugla- og djóralívið.

Mælt verður ístaðin til at leggja neystaøkið á Gomlurætt, har tað er somuleiðis er møguleiki at menna eitt øki til frítíðarlív kajakk/seyðaberg o.a.

Tjóðsavnið vísir somuleiðis á, at tað sambært uppskotinum verður møguligt at byggja neyst upp í 7 m, og at hendan hæddin er alt ov dominerandi. Sambært Tjóðsavninum er tað er óheppið, um frítíðarhús verða bygd fram við fjøruni – serliga í Kirkjubø.

Tað verður **staðfest**, at tað helst er **ein feilur**, at uppskotið loyvir frítíðarhús í neystum, tí býráðið samtykti tað øvugta, sí mál mál (*J.nr. 22/00590 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø*).

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin er samd í viðmerkingini frá Tjóðsavninum viðv. neystabygging, ið loyvir frítíðarbústøðum í Kirkjubø, og er talan um ein feil, tá útgávan við hesi áseting varð løgd til almenna hoyring. Umsitingin*

*gongur mótmælunum frá borgara og Tjóðsavninum á møti við at gera nýtt uppskot, har neysatøkið fram við fjøruni verður broytt til D1-frílendi.*

*Gomlu neystagrundirnar (matr. nr. 17, 11, 14 og 26) kunnu annaðhvørt flytast í einum møguligum makaskifti, ella byggjast uppaftur í verandi staðseting, men um tað seinna verður gjørt er, sum víst á í viðmerking omanfyri, neyðugt at loyva bygging út í mark (tvs. eitt byggistig á 1), og eitt tilsvarandi nýtslustig. Umsitingin mælir til, at varðveita C øki, men at leggja viðkomandi áseting og tabel afturat, sum loyvir einum øktum nýtslu- og byggistigið í takt við minkandi matrikkulvídd. Tá ið matrikkulvíddin er 50m$^2$ ella minni, verður byggistigið og nýtslustigið 1. Endamálið við tílíkari áseting er, at møguleiki verður at byggja bygningar við íblástri frá gomlu neystarøðini upp aftur, og at hesir í framtíðini eisini kunnu brúkast til miðstaðar endamál. Áseting um, at bygging einans verður loyvd sambært góðkendari heildarætlan í øki C, hevur til endamáls at tryggja, at ein møgulig bygging á matr.nr 17, 11, 14 og 26, verður framd við virðing fyri søguliga nærumhvørvinum.*

*Møguleiki er at skipa neystabygging í leingjan av einum frítíðardepli á Gomlurætt. Tó metir umsitingin, at tað er skilabest, at møgulig byggisamtyktarbroyting í hesum sambandi eigur at veða gjørd, eftir at umstøður fyri hesum eru betri kannaðar, og ein møgulig ætlan fyriliggur.*

- **Óheppin broyting av lendingini til byggiøki (B1)**

Sambært uppskotinum verður **lendingin og grótkastið broytt til B1-øki**, og er **møguleiki at byggja á økinum**. Hetta verður mett sum **óhóskandi**, hóast 12 m frástøða frá bryggjutrom er ásett.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar***
Sambært uppskotinum kann ikki byggjast nærri enn 12 m frá bryggjutromini, og verður tískil fyribyrgt at byggjast kann í økinum. Tó staðfestir B1 ásetingin at økið verður tilskilað virksemi, ið hevur við havnarøki at gera, og metir umsitingin at ásetingin tískil er hóskandi.

- **Ógreið og mótsigandi áseting um landbúnaðarøki (G)**

Gamla J-økið ("Bóndahús") er broytt til G-øki, men **ásetingin er ógreið**. **Stóra fjósið** frá 1800-talinum liggur í hesum øki og hevur mentanarligan týdning**.**

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Vísandi til fyrstu viðmerking og svar frá umsitingini, er ásetingin í fyrsta uppskotinum sannlíkt ikki hóskandi, og verður økið í nýggjum uppskotið lagt til C miðstaðarbygging, sum rúmar møguleika fyri meira fjølbroyttum virksemi.*

- **Avtøka av friðaðum øki (H1) – uttan samráð við Tjóðsavnið**

Verandi **H1-øki (friðað fornminnaøki)** verða sambært uppskotinum tikin burtur og løgd sum D1-øki (frílendi).

Hetta er **óhóskandi**, tí H1-økini vóru gjørd í samstarvi við Tjóðsavnið fyri at tryggja fornminni. Slík broyting **eigur at verða viðgjørd saman við Tjóðsavninum** áðrenn. Tá fornminnaøkini **ikki eru sjónlig á kortinum**, er vandi fyri, at tey **verða yvirsædd í framtíðar byggiplanum**.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin hevur atgongd til kort, sum lýsa fornminnir, og er tað týdningarmikið, at hesi eru dagførd, almenn og eftirfarandi, í sambandi við viðkomandi málsviðgerð av byggisamtyktum og broytingum av býarplanum. Umsitingin metir ikki, at tørvur á at áseta friðað økir í serligum umráðisparti, sum nágreinar orsøk fyri, at eitt øki verður lagt til frílendi, tá ið D1 økið lýkur hesa treyt.*

*Umsitingin ásannar tó, at serlig lendiseyðkennir og fornminnir kunnu gerast meira sjónlig á talgiltum kortum, til tess at gera tað lættari at síggja, hvørji og hví ávís økir í framtíðini krevja viðgerð og hoyring hjá friðingarmyndugleikum.*

- **Ov víðgongd bygging í miðstaðarøki (C)**

Verandi E-øki (almennir stovnar) verður víðkað og broytt til **C-øki (miðstaðarbygging)** heilt oman í fjøruna. Ásetingin loyvir **handlum, gistingarhúsum og matstovum**, sum **ikki hóskar til bygdina ella til fornminnaøkið**.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Umsitingin metir, at virksemi so sum handil, matstova og gistingarhús kann hóska til bygdina, um hetta verður bygt og umsitið við serligum atliti til søguliga dámin og verandi virksemi. C økisparturin verður mettur at hóska til bæði farstøðina og parkeringsplássi, sum tænir gomlu bygdini og øllum virkesminum har.*

- **B2 økið hóskar ikki á matr. nr 3b og part av matr. nr. 3a**

Økið við vakstrarhúsið norðan fyri Gomlurætt, sum í løtuni er lagt av sum C1A øki, vinnuvirki, ið hevur við matvøruframleiðslu at gera, verður broytt til B2 øki, vinnuvirki, verksmiðjur og tílíkt. Tjóðsavnið viðmerkir, at talan er um eina stóra broyting, har farið verður frá landbúnaðarvirksemi til vinnuvirksemi yvirhøvur.

Náttúrufriðingarnevndin (og síðani yvirfriðingarnevndin) kann geva loyvi til bygging uttangarðs í sambandi við landbúnaðarvirksemi. Um økið verður broytt til at kunna rúma annað virksemi, má hetta í øllum førum til viðgerðar sambært náttúrufriðingarlógini. Tjóðsavnið heldur tað vera skeivt at leggja vinnuligt virksemi úti í náttúruni. Sambært uppskotinum kann byggjast upp til 10 m hædd í B2 økjum, og er hetta sambært Tjóðsavninum alt ov nógv í einum tílíkum lendi. Tað eigur ikki at vera loyvd hægri bygging enn verandi. Tjóðsavnið skjýtur upp, heldur at broyta ásetingina fyri økið til at vera 4. grundumráði.

***Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:***
*Viðkomandi øki verður nýtt til vinnuligt virksemi, og er B2 samsvarandi áseting í uppskotinum um at endurskoða byggisamtyktina. Umsitingin ásannar, at um alt økið, soleiðis sum tað er ásett í uppskotinum, verður víðkað til vinnuligt virksemi, umframt at bygt verður í 10 m hædd, er talan um eitt ógvusligt inntriv.*

*Í nýggjum uppskotið verður markið broytt til økið kring bygningin, og tryggjar hetta, at tað ikki verður møguligt at byggja hægri enn verandi bygning.*

- **Ógreiðleikar og ósamsvar í byggisamtyktini og býarskipanini**

At enda vísir Tjóðsavnið á, at umráðispartar (D2 og F) eru **nevnd í byggisamtyktini**, men **síggjast ikki á kortinum (býarplaninum)**. Hetta ger tað **torført at fáa greiðu á, hvat í veruleikanum verður broytt.**

***Umsitingin hevur hesar viðmkeringar:***
*Tað er rætt, at ásetingar verða nevndar í uppskotinum um nýggja byggisamtykt, sum ikki eru at síggja í kortinum (býarplaninum), og ásannar umsitingin, at hetta kann tykjast ógreitt. Orsøkin til hetta er, at tað verður mett hóskandi, at nýggja byggisamtyktin fevnir um møguligar ásetingar, sum eru galdandi fyri aðrar bygdir í kommununi, soleiðis at tað er møguligt at brúka hesar ásetingar til hóskandi økir í býarplaninum í framtíðini, um tørvur er til tess. Hetta er leisturin, sum varð samtyktur í samband við málið um at endurskoða allar bygdirnar í kommununi (mál nr: 20/04243).*

***Samanumtikið***
Nýtt uppskot um byggisamtykt fyri Kirkjubø er orðað og sæst í skjalinum *Uppskot um almenna byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025*. Samanumtikið eru sethúsaøkini (A) á kortinum broytt: Geirin vestanfyri inni á Fjósi 6 er strikaður. Bústaðarøkir eru løgd afturat fram við Lágabø og millum vegirnar Í Geilini og Ovara veg, samsvarandi við hoyringsskrivum. Og ein nýggjur geiri er teknaður í matr. nr. 15a oman fyri Ovaraveg. Staðbundna nevndin hevur borið mál fram um at finna fleiri sethúsastykkir (sí mál 25/04052), og eru hesar broytingar í samsvari við hetta mál.

Treytir um, at nýggj sethús skulu hava sama dám, eru skrivaðar í byggisamtyktina. Neystaøkið (E) og Bóndahús (G) økini eru tikin burtur úr uppskotinum, og eru ásetingar fyri miðstaðarøki (C) broyttar, soleiðis

at markið er rættað og fevnir um gamla fjósið, meðan bøurin millum spæliplássið og bussterminalin í stóran mun er lagdur sum frílendi.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *J. nr. 20/04243 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*
- *J.nr. 22/00590 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø*
- *J.nr. 21/03382 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*
- *J.nr. 25/06086 Umsókn um broyting av fríøkið matr. nr. 25b, Ovarivegur 16, Kirkjubøur*
- *J.nr. 25/04052 Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø*

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið, og vóru eftirfylgjandi gjørdar hesar broytingar:

1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlan eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III §3)

Byggimálsdeildin setti eisini spurnatekin við, um heimild er at loyva/sýta ávísa vegetatión, soleiðis sum orðað í innleiðandi tekstinum undir yvirskriftini “Endamál”. Innleiðandi teksturin í byggisamtyktini er tikin úr galdandi byggisamtykt, og er ynskiligt at varðveita tekstin, áðrenn ein nýggj bygdaætlan er dagførd fyri Kirkjubø. Upprunaliga brotið, sum sipar til planting av trøum og runnum kring vegir og býlingar er tó fyribils tikið úr, vísandi til viðmerking um væntandi heimild at kunna krevja/sýta ávísa vegetatión.

At enda viðmældi byggimálsdeildin at talmerking av greinum ikki byrjar umaftur undir hvørjum kapitli, men ístaðin er kronologiskt fyri alla byggisamtyktina. Hetta er vanligur bygnaður í kunngerðum og lógum, og sambært byggimálsdeildini, eisini lættari at umsita.

Býarskipanardeildin vil tó fyribils ikki at broyta bygnaðin, av tí at verandi bygnaður er galdandi í øllum byggisamtyktunum í Tórshavnar kommunu, og er m.a. eitt av endamálunum í hesi endurskoðan at javnstilla byggisamtyktirnar í bygnaði. Býarskipanardeildin vil taka hesa viðmerking til eftirtektar í eini komandi dagføring av byggisamtyktini.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☒ Nei ☐**

**Skjøl**

- *J.nr. 20/04243-1 45/24 Samtykt Byggi- og býarskipanarnevndin, 12.02.2024 Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar*
- *J.nr. 25/01100-14 - Upprunalig málslýsing, Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Kirkjubø - 22-00590*
- *J.nr 25/01100-14 – Upprunaligt uppskot, 21.11.2024*
- *J. nr. 25/01100-8 - Viðmerkingar og broytingaruppskot*
- *J.nr. 25/01100-13 - Kirkjubøur kort - áðrenn broyting*
- *J.nr. 25/01100-13 - Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025*
- *J. nr. 25/01100-13 Almenna byggisamtyktin - Kirkjubøur - Við markeraðum broytingum*
- J.nr. 25/01100-13 *Kirkjubøur – áðrenn og eftir broyting*
- *j.nr. 25/01100-13 Uppskot almenn byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025*

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |

| Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar | | | | |
|---|---|---|---|---|

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kirkjubø sambært skjølunum *Uppskot almenn byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025* og *Kort - Kirkjubøur eftir broyting, dagf. nov. 2025*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 21. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, eini atkvøðu ímóti og eini blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen og Rúni Reginsson Hammer.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddi: Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti:**
Uppskotið lá til almenna hoyring frá 19. desember 2025 til 3. februar 2026. Kommunan móttók fimm hoyringarskriv, sí skjal nr. *Viðmerkingar og broytingaruppskot jan. 2026, j.nr. 25/01100-24,* umboðandi Búnaðarstovuna, festarar, borgarar í Kirkjubø og Bóndafelag Føroya.

Niðanfyri verða allar viðmerkingarnar viðgjørdar og svaraðar av umsitingini.

- **Ov stutt hoyringsfreist**

Í viðmerkingunum verður funnist at væntandi tíð at viðmerkja uppskotið, og at festibóndir ikki hava verið hoyrdir í tilgongdini.

***Svar frá umsitingini:***
*Fyrsta uppskotið lá til almenna hoyring millum 22. novembur 2024 og 29. januar 2025. Sambært § 6 í byggi- og býarskipanarlógini skal hoyringstíðarskeiðið vera 6 vikur, men varð freistin longd vegna almennan borgarafund um uppskotið 22. januar 2025. Dagførda uppskotið hevur somuleiðis verið lagt til almenna hoyring í 6 vikur. Viðmerkingar hjá festibóndum hava verið viðgjørdar í fyrsta uppskotinum eins og tær vera viðgjørdar niðanfyri.*

- **Landbúnaðarlendið minkar**

Búnaðarstovan frámælir bygging á teimum økjunum, sum sambært uppskotinum í framtíðini kunnu mennast til sethúsaútstykkingar, og vísir á týdningin at varðveita landbúnaðar- og matvøruframleiðslulendi. Grundgivið verður eisini út frá sáttmálanum um kommunusamanlegging, sum staðfestir at Kirkjubøur skal varðveitast sum landbúnaðarbygd. Harumframt vísir Bóndafelagið á, at sambært landbúnaðarpolitikkinum hjá landinum skal góð landbúnaðarjørð framyvir ikki takast til byggilendi, og tískil stríðir byggisamtyktaruppskotið ímóti løgtingsins vilja.

***Svar frá umsitingini:***
*Umsitingin tekur undir við at landbúnaðarlendið eigur at virðast og verjast eins og samleikin hjá Kirkjubø sum landbúnaðarbygd. Byggisamtyktaruppskotið hevur samstundis til endamáls at víðka møguleikar at*

*seta búgv, vísandi til mál um Bústaðarviðurskifti í Kirkjubø (mál nr 25/04052), har stabundna nevndin ynskir raðfestan av fleiri sethúsaøkjum í Kirkjubø.*

*Hesi ynskir umboða mótstríðandi áhugamál, og avbjóðingin gerst ikki minni fløkjaslig av tí stóra siðsøguliga virðinum sum Kirkjubøur hevur, og sum menningarætlan fyri ferðavinnu staðfestir.*

*Byggisamtyktaruppskotið kemur at umboða ymisk áhugamál og kann elva til neyðsemjur. Umsitingin metir tað vera tørv á eini bygdaætlan, sum lýsir áhugamálini nærri og tekur støðu til, hvussu ein framtíðar menning skal fyrihalda seg til hesi. Í dagførdum uppskotið verður nýtt byggilendi til sethús avmarkað til økið eystan fyri verandi útstykking Í Lágabø, niðanfyri Í Geilini og fyri matr. nr 25b millum Geilina og Ovaraveg. Uppskotið verður broytt, soleiðis at øki við matr. nr. 15a, fram við Ovaraveg og matr. nr 8a, t.e. leingjan av vegnum Í Lágabø, verður varðveitt sum bøur, vegna landbúnaðarliga virðið.*

- **Matr. nr 21a niðanfyri Í Geilini skal varðveitast sum bøur**

Búnaðarstovan mótmælir ítøkiliga bygging á hesum økinum, og er hetta einasti partur av innangarðsjørðini hjá festara inni í Dølum. Tískil hevur økið týdning fyri bóndavirksemi og møguleikar at reka festið skynsamt.

***Svar frá umsitingini:***
*Á fundi 09.03.2026 við umboð fyri festara í Dølum, varð semja funnin um eina semju, sum bæði rúmar víðkaðum bóndavirksemi, á matr. nr. 20a, samstundis sum sethús kunnu byggjast á matr. nr. 21a niðanfyri Í geilini. Hildið verður so statt fast við uppskotið við teimum broytingum, at markið fyri sethúsaøkið verður tillagað eini møguligari útstykking, umframt at sethúsaøkið verður víðkað til allan matr. nr. 20a í sambandi við bygging av einum bygningi/hjalli til búnaðarvirksemið. Umsitingin metir, at økið hóskar seg væl til sethúsabygging, og hevur lendið niðanfyri vegin í Geilini verið lagt av til endamálið síðani áðrenn kommunusamanleggingina í 2004.*

- **Matr. nr. 8a. Leingjan av í Lágabø (Garðajørð) skal varðveitast sum bøur**

Búnaðarstovan mótmælir ítøkiliga bygging á hesum økinum og sambært hoyringarskrivi frá festara og frá Bóndafelag Føroya er hetta besti slátturbøur í bygdini. Ein tílík broyting er eitt inntriv í raksturin av festunum, og hevur tað stórar fíggjarligar avleiðingar bæði nú og framyvir, um veltur bøur verður tikin til endamáls uttan um festið.

***Svar frá umsitingini:***
*Umsitingin gongur viðmerkingini á møti.*

- **Matr. nr 15a Omanfyri Ovaraveg skal varðveitast sum bøur**

Búnaðarstovan mótmælir ítøkiliga bygging á hesum økinum.

***Svar frá umsitingini:***
*Umsitingin gongur viðmerkingini á møti við at varðveita økið á matr. nr. 15a til landbúnaðarjørð.*

- **Ásetingar fyri H (frílendi) skulu varðveitast**

Nýggj áseting fyri frílendi hevur avmarkandi ávirkan á landbúnaðarraksturin innangarðs. Í galdandi byggisamtykt eru H og H1 galdandi fyri bøin (H1 er serlig øki til varðveiting). Í uppskotinum eru øll økini broytt til D1, og verður ítøkiliga mótmælt, at galdandi ásetingarnar fyri H (ítøkiliga **stk 2 og 3**) vera strikaðar.

Talan er um soljóðandi ásetingar í verandi áseting:

> ***Stk 2****. Á teim í 1. stk. fyrr nevndu økjum mugu bert verða gjørdir vegir, gøtur, bilstøðlar, veitingar, garðar o.t. Á teimum einstøku økjunum kunnu verða reistir bygningar, sum skila til virðið á økinum.*

> ***Stk 3**. Loyvi kann gevast til at byggja einstøk úthús, sum eru neyðug fyri raksturin av garðsbrúkinum, t.d. seyðahús. Og uppdyrkingarvegir kunnu gerast, tá nýtingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt náttúrligt avmarkað størri øki.*

Sambært broytingaruppskotinum verður ásetingin soljóðandi:

*Stk 1. Umráðisparturin verður lagdur til frílendi, t.e. bøur og lendi, sum ikki má byggjast á. Tað eru lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka um bygdina og gera hana dámligari at búgva í.*

*Stk. 2. Útstykking má ikki fara fram.*

Harumframt verður aftur víst á, eins og viðgjørt var í fyrra hoyringsumfarinum, at tá ið H1 (fornminni) verður lagt saman við kringliggjandi frílendi D1, verður tað í byggisamtyktini ómøguligt at síggja, hvar fornminnir eru staðsett.

Borgari spyr eisini inn til, hvussu avmarkandi D1 ásetingar verða, tá tað verður galdandi fyri spæliplássið (20c), og viðv. atgongd til toftirnar í Árnanesi.

***Svar frá umsitingini:***
*Umsitingin ásannar avmarkandi ávirkan fyri bóndaskap, um H verður broytt til D1-frílendi, av tí at D1 ikki staðfestir, at økið verður tilskilað landbúnðarvirksemi. Umsitingin mælir tí til at broyta býarplanin, soleiðis at H økini í Kirkjubø vera broytt til 4. grundumráði*

*H1 økið, sum sambært galdandi byggisamtykt er lagt til friðað øki av mentunar- og søguligum grundum, verður sambært nýggjum uppskoti broytt til D1 øki, og á tann hátt lýsir byggisamtyktin meira nágreiniliga, hvørji økir í bygdini hava serligt fornfrøðiligt- og varðveitingarvirði. Her skal leggjast afturat, at ásetingar í D1 ikki forða lendisgøtuskipanum, og tí hóskar hetta til økir við fornfrøðiligum og vitjunarverdum virði. Samstundis verður matr. nr. 20c (spæliplássið) broytt til A-sethúsaøki, tí umframt lendisgøtur, kann væntast meira umfevnandi bygging. Tað er somuleiðis vanligt aðrastaðni í Tórshavnar kommunu, at spælipláss liggja í somu ásetingum sum sethús.*

- **Mótmælt at byggisamtykt fyri Heimaru Forar verður broytt frá E (almennir stovnar) til D1 (frílendi).**

Í uppskotinum verður byggisamtyktin fyri Heimaru Forar, t.e. bøurin miðskeiðis í bygdini omanfyri almenna parkeringsplássið, broytt, eftir at byggisamtyktin í 2022 varð broytt frá H1 frílendi til E (almennir stovnar). Endamálið var tá at byggja til ferðavinnuendamál. Ætlanin hevur verið at hýsa savnsvirksemi, matstovu, v.m. og at framtíðartryggja garðin. Í komandi byggisamtykt verður partur av økinum lagdur aftur til D1, og so statt fer ætlanin hjá festara fyri skeyti. Um økið verður broytt til frílendi, er av størsta týdningi, at byggisamtyktin loyvir bygging av landbúnaðarbygningum á økinum, so sum brunnar, køstur, maskinhøll, o.a.

Festarin leggur síðani afturat, at ein treyt átti at verið, at einans festið kann byggja á hesum lendi, og hevur í teldubrævasamskifti til málið lagt afturat, at onnur treyt kundi verið, at einans byggjast kann í fullari semju við festaran. At enda verður víst á, at onnur áhugamál ikki skulu takast fram um áhugamálini hjá festinum í D1 økjum, tað verði seg landbúnaðarlig, ella onnur viðurskifit, ið verða mett neyðug at reka festið.

***Svar frá umsitingini:***
*Umsitingin hevur móttikið uppskot uppá bygning á bønum, sum Tjóðsavið í viðmerking til málið frámælir vegna lutfalsligu stóru víddina. Í viðmerking dagf. 17 november 2025 skrivar Tjóðsavnið soleiðis:*

> "Samanumtikið kann sigast, at í nýggja uppskotinum er bygningurin alt ov dominerandi, hann tekur útsýni frá fornminnunum, hann lækkar mentanarligu upplivingina og virði av søguliga Kirkjubø sum heild. Verður byggingin framd, gerast fornminnini og søguligu bygningarnir

nakað, sum liggur aftanfyri ein stóran vitjanardepil og veitsluhøll. Aðrir bygningar eru á staðnum, har góðar alternativar loysnir kunnu fremjast."

*Mælt verður til at endurnýta fjósið, og metir Tjóðsavnið, at góðir møguleikar eru at hýsa tí virksemi, sum ætlanin er at hava í nýggju bygginigini. Ein loysn, har fjósið verður endurnýtt, hevði ikki tikið tign frá søguliga Kirkjubø, men heldur lagt afturat mentanararvinum á staðnum.*

*At avmarka byggiøkið á bønum var so statt ein roynd at tryggja ein ávísan dám og geva luft í bygdini, og hevði henda ætlanin undirtøku frá Tjóðsavninum.*

*Á fundi 19.03.2026 við festaran og í viðmerkingum til málið verður víst á, at sum støðan er í dag, og ikki minst um ferðavinnan veksur komandi 10 árini, verður tørvur á hægri ferðavinnukapasiteti. Festi mælir tí til, at byggisamtyktin ikki forðar bygging til hetta endamálið. Umsitingin metir, at byggjast kann á hesum økinum við ferðavinnuendamáli, men at vavið má avmarkast í mun til søguligu húsini.*

*Í nýggjum uppskoti verður nevndi bøurin lagdur aftur til byggiøki, undir ásetingunum C-miðstaðarøki, og verður bygging treytað av eini góðkendari heildarætlan. Endamálið við hesi loysnini er tryggja skynsama atkomu, hóskandi lutfall og fagurfrøðilig atlit, í og við at heildarætlanin skal fremjast í tøttum samráði við friðingarmyndugleikar.*

*Í mun til at seta treytir til tess at tryggja áhugamálunum hjá festinum, verður hetta ikki mett hóskandi í byggisamtyktini. Byggivaldið liggur hjá kommunala byggimyndugleikanum; ikki hjá bóndanum. Tað er ikki bóndin, sum játtar byggiloyvir; tað ger kommunan.*

*Endamáli við eini byggisamtykt er at regulera m.a. býarskipan og bygging. Byggisamtyktin tekur ikki støðu til, hvør kann byggja eina ávísa bygging. Tí er byggisamtyktin ikki rætta stað at áseta, hvør kann byggja hvat, hvar – herundir heldur ikki ásetingar um, at tað einans eru bøndur, sum kunnu byggja.*

*Í stk 2 fyri umráðispart C, er áseting, sum krevur at bygging fer fram sambært góðkendari heildarætlan av býráði og avvarðandi myndugleikum, og fevnir hetta um festið. Hetta er í uppskotinum ikki galdandi fyri D1.*

- **Umráðispartur fyri neyst verður tikin burtur**

Mótmælt verður, at ongin umráðispartur fyri neyst er galdandi fyri økið millum parkeringsplássið og kirkjuna, har tað í dag eru fýra neystagrundir. Biðið verður um, at øki í Kirkjubø framvegis verður sett av til neystagrundir í nýggju byggisamtyktini.

***Svar frá umsitingini:***
*Økið, har neystamatriklarnir eru, er í verandi støðu ikki eitt neystaøki, og er uppskotið so statt ikki ein broyting, sum avmarkar í mun til verandi byggisamtykt. Tó er áseting løgd afturat í øki C, sum hevur til endamáls at loyva neystalíknandi bygging á matriklunum, um hetta verður framt í samsvari við góðkenda heildarætlan fyri økið.*

*Verandi neystaøki, staðsett millum parkeringsplássið og fjøruna vestanfyri, verður tikið burtur, samsvarandi mótmæli í fyrra hoyringartíðarskeiði, har grundgivið var fyri at verja náttúru, og at neystabygging upp í 7 m hevði verið óhóskandi fyri dámin.*

*Umsitingin er sinnað at finna hóskandi neystaøki í Kirkjubø, og skal hetta gerast út frá einum tørvi ella eini bygdaætlan.*

- **J (bóndahús) áseting eigur at vera varðveitt**

Mótmælt verður at avtaka ásetingar fyri J-bóndahús, og spurt verður inn til, um hetta forðar fyri, at bygningar vera nýttir til fóður, seyðahald ella fletting. Sambært mótmælinum er hetta ikki í samsvari við

ætlanina um at varðveita serstaka dámin í bygdini, og víst verður á, at í uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað eru økir í bygdini framvegis sett av til bóndahús (øki G).

***Svar frá umsitingini:***
*Vísandi til viðmerking omanfyri verður J bóndaøki, oman fyri Ovaraveg, varðveitt undir nýggja heitinum G-bóndaøki. Hetta er somuleiðis í samsvari við viðmerking frá festara, um at varðveita møguleika at byggja.*

*Leggjast skal afturat, at bóndaskapur og viðkomandi bygging kann fara fram í 4. grundumráði, og smávegis bóndavirksemi (fóður, seyðahald og fletting) er loyvd í øllum umráðispørtum. Tískil er sambært uppskotinum rúm fyri bóndavirksemi bæði innan og uttan fyri bøgarðarnar, og metir umsitingin ikki, at ein avmarking av verandi økisparti, J bóndahús, broytir hetta munandi.*

- **Mótmæla at áseting fyri gamla fjósið verður broytt til C miðstaðarendamál**

Mótmælt verður, at økið verður broytt til miðstaðarbygging, stovnar og mentanarlig endamál, tí at ásetingin er grundleggjandi ósamsvarandi verandi og framhaldandi nýtslu av økinum.

***Svar frá umsitingini:***
*Nógv bendir á, at framtíðar nýtslan fer at víkja frá søguligu nýtsluni, tí sum staðfest í viðmerkingum til málið, hevur ferðavinnuvøksturin seinastu árini ført við sær ein tørv á møguligari bygging við Heimaru Forar og/ella umbygging av gamla fjósinum.*

*C økið umboðar eina fjølbroytta nýtslu, og um hetta verður galdandi fyri fjósið í framtíðini, avmarkar tað ikki verandi landbúnaðarliga virkseminum. Mett verður, at gamla fjósið bæði er søguliga og byggilistarliga áhugavert, og verður tað mett hóskandi at ásetingin loyvir eini framtíðarmenning, sum loyvir gestavinnu á hesum økinum. Mælt verður til at halda fast í uppskotinum.*

- **Broytingaruppskot frá borgara**

Mælt verður til sethúsabygging á ovaru síðu av Ovaravegi / Heima á Garði, av tí at hetta er traðir við avmarkaðum landbúnaðarligu gagni. Víst verður eisini á geiran fram við niðaru síðu av Gamlavegi.

***Svar frá umsitingini:***
*Dagførda uppskotið, sí Kirkjubøur kort eftir broyting, apríl 2026 loyvir bygging av umleið 10 nýggjum sethúsum, og verður hetta mett at vera hóskandi. Støða kann takast til, um fleiri økir skulu setast til sethúsabygging, eitt nú við økini, sum víst verður á í viðmerkingini. Umsitingin metir, at hetta eigur at verða tikið upp í samráð við bygdafólki og í samband við arbeiðið at gera eina nýggja bygdarætlan fyri Kirkjubø.*

**Nýggj skjøl**

- *Viðmerkingar og broytingaruppskot jan. 2026, j.nr. 25/01100-24*
- *Kirkjubøur kort eftir broyting, apríl 2026, j.nr. 25/01100-31*

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja nýggja uppskotið um byggisamtykt fyri Kirkjubø sambært skjølunum *Uppskot almenn byggisamtykt fyri Kirkjubø, dagf. nov. 2025* og *Kort - Kirkjubøur eftir broyting, apríl 2026*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð um at fáa málið aftur í nevnd, ið fall við við seks atkvøðum fyri, sjey atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Síðani varð atkvøtt um tilmælið frá byggi- og býarskipanarnevndini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Blankt atkvøddi: Súna Mørk.

## 186/26 Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.02.2025 | 30/25 | 25/01104-1 |
| 2 Býráðsfundur | 27.02.2025 | 63/25 | 25/01104-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | 31.03.2025 | 60/25 | 25/01104-1 |
| 4 Býráðsfundur | 24.04.2025 | 111/25 | 25/01104-1 |
| 5 Byggi- og býarskipanarnevndin | 12.01.2026 | 4/26 | 25/01104-1 |
| 6 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 11/26 | 25/01104-1 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 09.03.2026 | 63/26 | 25/01104-1 |
| 8 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 82/26 | 25/01104-1 |
| 9 Byggi- og býarskipanarnevndin | 13.04.2026 | 101/26 | 25/01104-1 |
| 10 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 129/26 | 25/01104-1 |
| 11 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 162/26 | 25/01104-1 |
| 12 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 186/26 | 25/01104-1 |

**Samanumtøka av málinum**
Hetta málið er eitt framhald av málinum Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað (21/03382), sí skjalið *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað*.

Í 2020 varð samtykt at endurskoða byggisamtyktirnar fyri allar bygdirnar í kommununi (20/04243). Upprunaliga var ætlanin at endurskoða tær galdandi serstøku byggisamtyktirnar, sum í fleiri førum ikki hava verið endurskoðaðar síðani kommunusamanlegging.

Endamálið er at broyta ásetingar, soleiðis at tær bæði samsvara betri millum bygdirnar í kommununi (javnseta bygdirnar) og við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu, harafturat verður í ávísum førum viðmælt at tillaga byggisamtyktarmørk. Á hendan hátt er tað bæði lættari at skilja og umsita byggisamtyktirnar fyri bygdirnar í kommununi.

Fyrsta uppskotið um at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Velbastað varð samtykt 28. oktober 2021 og lá til almenna hoyring millum 1. nov. 2021 til 13. des. 2021. Kommunan móttók 3 mótmælir og mælti umsitingin frá at ganga teimum á møti.

Málið varð samtykt og síðani sent landsmyndugleika til góðkenningar. Í skrivi frá Umhvørvis- og vinnumálaráðnum, dagfest 27. september 2022, verður heitt á kommununa, at bygdirnar í Tórshavnar kommunu framyvir vera reguleraðar í almennu byggisamtyktini, ella við hvør sínari almennari byggisamtykt. Umsitingin hevur síðani gjørt uppskot um almenna byggisamtykt fyri Velbastað, sí skjal *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað*.

**Lýsing av málinum**
Uppskotið varð samtykt í byggi- og býarskipanarvendini 12 februar í 2024, men varð av misgáum ikki lagt aftur fyri Velbastaðnevndini fyrr enn í desember 2024. Umsitingin sendi tilfarið umvegis teldupost og Velbastaðnevndin hevði hesar viðmerkingar:

**Viðmerkingar frá velbastaðarnevndini:**

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá.*
*Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

1) *Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*
2) *Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*
3) *Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*
4) *Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Umsitingin svaraði Velbastaðnevndini 16. desember 2024.

> *Til 1 og 2:*
> *Málið verður eftir ætlan lagt fyri býráðið í januar 2025, og fer síðani, eins og endurskoðanin av Kirkjubø, út til almenna hoyring í minst 6 vikur. Í hoyringstíðarskeiðnum er ætlanin at umsitingin leggur uppskotið fram, og borgarar fáa høvið at spyrja inn til og viðmerkja málið, á kunnandi borgarafundi í Velbastað.*
>
> *Til 3:*
> *Hesa viðmerking ynskja vit at fáa lýsta nærri, tí sambært viðmerkingini verður øki F í verandi byggisamtykt lagt til almenn fríøki, meðan verandi byggisamtykt lýsir F sum alment frítíðarøki (ítróttarvøllir, spæliplass útiveruplass o.t.).*
> *Sambært uppskotinum kemur D2 ístaðin fyri bæði E (almennir stovnar) og F (almenn frítíðarøki), og metir umsitingin at D2 (almennir stovnar og mentan) rúmar bæði endamál.*
>
> *Til 4:*
> *Orðingin "og tílíkt" er afturvendandi fyri allar almennu byggisamtyktirnar í Tórshavnar kommunu, umframt galdandi byggisamtykt fyri Velbstað og Kirkjubø. Endamálið er at avmarkað talið av økispørtum og at varðveita ein ávísan fleksibilitet í umsitingini, sum kann vera ein fyrimunur bæði í samband við byggimálsviðger og fyri menning av bygdini. Tað er tó lætt at ímynda sær at orðingin verður brúkt til at fevna um nýtslu, sum ikki hóskar, og verður viðmerkingin tikin til eftirtektar.*

Umsitingin mælir til at leggja uppskotið, sum lýst í hesum málinum fyri býráðið og síðani til almenna hoyring.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í málinum 25/00818, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður, frá E (almennir stovnar) til B (sethús) sambært galdandi serstøku byggisamtykt. Hetta er í sambandi við at frískúlin niðurleggur virksemið, og ynskið er at selja ognina.

Sambært uppskotinum um endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað, verður matr. 50ø broyttur frá E øki til D2 økið (almennir stovnar), og tískil kemur hetta ikki at samsvara við tilmælið í máli 25/00818, um broytingin til sethús verður góðkend.

Umsitingin mælir til, at atlit verður tikið til mál nr 25/00818, soleiðis at tilfarið sum verður sent til endaliga viðgerð, annaðhvørt lýsir matr. nr 50ø sum A bústaðarøki ella sum E almennir stovnar, treytað av endaligu viðgerðini av máli nr 25/00818.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 21/03382
- *Endurskoðan av byggisamtyktunum fyri bygdirnar,* journal nr. 20/04243
- *Fyrispurningur um broyting av byggisamtykt, galdandi fyri matr. nr. 50ø, Velbastaður - 24/08611,* journal nr. 25/00818

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**
- *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað,* journal nr. 25/01104-2.
- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 25/01104-2
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 25/01104-2.
- *Velbastað – áðrenn og eftir– Tekstur,* journal nr. 25/01104-2.
- *Upprunaliga málið – Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað,* journal nr. 25/01104-4

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli:**
Kommunustjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. februar 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.
Býráðsfundur 27. februar 2025: Atkvøtt varð um uppskot frá Tróndi Sigurðsson um at beina málið aftur í byggi- og býarskipanarnevndina.

Uppskotið varð einmælt samtykt.

**Ískoyti:**

**Viðmerkingar frá Kirkjubøar/Velbastaðarnevndini:**

*Viðmerkingar til mál 21/03382. Endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað.*

*Málið hevur verið fyri hjá okkum fyrr, og kunnu vit vísa til tær viðmerkingar sum eru gjørdar tá. Eisini hava vit hesar viðmerkingar at leggja afturat:*

*1) Vit ynskja at hetta málið verður viðgjørt eins og málið í Kirkjubø. Málið á Velbastað er sent til staðbundnu nevndina, meðan í Kirkjubø er sent til almenna hoyring.*

*2) Rættast hevði verið við einari almennari kunning í báðum bygdunum.*

*3) Í nýggju byggisamtyktini hevur man broytt økið F (Almenn fríøki) til D2 (Almennir stovnar og mentan). At taka fríøki úr samtyktini ger, at tú hevur møguleika at byggja á hesum økjum, og sostatt eru ongi almenn fríøki á Velbastað. Hesum mótmæla vit.*

*4) Í fleiri av ásetingunum verður orðingin «og tílíkt» nýtt, og meta vit at hetta er óheppið, tá tað hetta kann boyggjast og vendast, alt eftir hvørji áhugamálini eru.*

Á býráðsfundinum 27. februar 2025 gjørdu býráðslimir vart við viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini, og ivamál var, um byggi- og býarskipanarnevndin hevði tikið viðmerkingarnar til eftirtektar. Víst verður til viðmerkingarnar omanfyri.

Býráðslimir mettu, at av tí at talan er um ógreið viðurskiftir og stórar prinsipiellar broytingar, so var best, at uppskotið varð dagført samsvarandi viðmerkingunum frá staðbundnu nevndini, og at uppskotið harvið verður meira klárt, áðrenn uppskotið verður lagt til almenna hoyring.

Umsitingin ásannar, at broytingar av galdandi byggisamtykt krevja gjølla viðgerð, harímillum móttiknu viðmerkingarnar frá staðbundnu nevndini. Umsitingin viðmælir tó, at verandi uppskot, sum er lýst í hesum málinum, verður lagt fyri býráðið og síðani til almenna hoyring. Í hoyringstíðarskeiðnum verður almennur borgarafundur fyriskipaður á Velbastað, soleiðis at borgarar kunnu fáa neyðugt innlit í málið, og síðani viðmerkja. Á henda hátt verður møguleiki at samla so nógvar viðmerkingar og sjónarmið sum gjørligt, áðrenn endaliga viðgerðin av málinum verður gjørd og møguligar dagføringar av uppskotinum verða gjørdar.

Hetta er sami leistur, sum hevur verið nýttur í sambandi við endurskoðanina av byggisamtyktunum fyri Kirkjubø, Nólsoy, Hvítanes og Kaldbak.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at samtykkja uppskotið til endurskoðan av byggisamtyktini fyri Velbastað sambært skjølunum *Almenna byggisamtyktin – Velbastaður, rættað* og *Kort – eftir broyting*, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 31. mars 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 24. apríl 2025:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Uppskotið lá til almenna hoyring í tíðarskeiðnum 19. juni til 10. september 2025. Í hesum sambandi var kunnandi borgarafundur á Velbastað 3. september 2025. Tá ið freistin at viðmerkja var farin, hevði kommunan móttikið tvey hoyringarskriv (sí skjal *Viðmerkingar og broytingaruppskot*). Niðanfyri er ein samanumtøka av viðmerkingunum og svar frá umsitingini.

**Mótmæli frá Dánjal Paula í Búðini, Ólavi Brimnes og Sveini Zachariasen umboðandi part av staðbundnu nevndini:**

1. Frámælt at 5 F økir (alment frítíðarøki) verða broytt til D2 (almennar stovnar)

*Í galdandi byggisamtykt er munur á F-økið, (almenn frítíðarøkið) og E-økið (almennir stovnar). Í nýggja uppskotinum eru øll F-økini broytt til D2 (almennar stovnar, ítrótt, mentanarlig endamál v.m.). Hetta verður mett at vera óheppið og óhóskandi fyri fleiri av økjunum (ítøkiliga verður víst á 5 økir), og áttu hesi økini ístaðin fyri at verið broytt til D1 (frílendi), soleiðis at tey verða varðveitt sum frílendi. Sambært skrivinum*

*eru økini í dag virðismikil náttúruøkið sum børn og onnur hava gleði av, og er ynskið at tey vera varðveitt til hetta endamálið.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Ætlan er ikki at staðseta almennar stovnar í teimum 5 F-økjunum, sum víst verður til í hoyringsskrivinum. Umsitingin er tískil samd í, at D1 er hóskandi áseting fyri hesi økini, og verður uppskotið tillagað sambært tilmælinum.

2. K-økið (Landbúnaður) verður broytt til 4. grundumráði

*Mett verður, at tað ikki er rætt at broyta galdandi K-økið til 4. grundumráði. Orsøkin er at ásetingar fyri 4. grundumráði víðka um heimildirnar fyri hvat kann byggjast uttan fyri bøgarðarnar. Í nýggja uppskotinum verður 4. grundumráði lýst soleiðis:*

*"4. grundumráði verður lagt til landbúnað og alment frílendi og tílíkt.",*

*Orðið "tílikt" kann boyggjast í mun til hvør lesur tað, og funnist verður somuleiðis at hesi orðing:*

*"Onnur bygging og virksemi, sum ikki hóskar seg at liggja í bygdum øki, kann staðsetast í 4. grundumráði."*

*Mælt verður til, at halda seg til verandi áseting sum er galdandi fyri K, har tað er greitt at umráðisparturin er lagdur til landbúnað.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Umsitingin er samd í, at heimildin fyri nýtslu í 4. grundumráði er sera breið og tískil ikki lýsir nágreiniliga, hvat kann og hvat ikki kann byggjast. Munur er eitt nú á landbúnaðarvirksemi, smærri bygging í sambandi við ferðavinnu og vindmyllur, sum er alt virksemið sum sambært byggisamtyktini kann rúmast í umráðispartinum.

Tó verður mælt frá at varðveita ásetingarnar fyri K-øki í haganum kring Velbastað. Orsøkin er, at nýtslan í galdandi áseting somuleiðis er breið, og ein varðveitan av økispartinum K stríðir ímóti endamálinum um, at ásetingar, sum í størri mun samsvara við almennu byggisamtyktina fyri Tórshavnar kommunu og hinar bygdirnar í kommununi, skulu vera eins. Um hagin kring Velbastað hevur aðrar ásetingar enn hagin kring aðrar bygdir í kommununi, verður hetta í fyrstu atløgu umsitingarliga fløkjasligt at umsita og at dagføra í eini heild.

Mælt verður til, at umsitingin í nýggjum máli fer undir at lýsa og nágreina nýtsluna í 4. grundumráði í síni heild fyri alla kommununa, sambært eini lendisætlan. Í hesum málinum skulu viðmerkingarnar í sambandi við 4. grundumráði í hesum málinum, takast til eftirtektar.

3. Víðkan av D1 økinum við Mýandalsá

*Í galdandi byggisamtykt er økið við Mýandalsá H: Frílendi broytt til D1: Frílendi. Í broytingaruppskoti verður mælt til at víðka hetta økið norðureftir.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Mett verður, at náttúruvakra økið fram við ánni hóskar sum D1 frílendi, og er nýtt uppskot gjørt, har D1 økið er víðkað norðureftir sambært broytingaruppskotinum.

**Í mótmæli við 78 undirskriftum:**

1. F-økini skulu broytast til D1 heldur enn D2.

*Eins og í viðmerking 1 verður víst á, at fleiri D2 økir sambært uppskotinum, høvdu hóskað betur sum D1 økir.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Vísandi til viðmerking 1 hevur umsitingin gingið hesi viðmerking á møti.

2. Bústaðarøki sunnanfyri Mýandalsá

*Bústaðarøki sunnan fyri Mýandalsá (á matr 50a) er alt ov tætt við ánna og fossin, og eigur at verða minkað tilsvarandi, soleiðis at tað lýkur krøvini um frástøðu frá áum og fossum, og verður partur av D1 øki.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Stóra óbygda byggiøkið hevur mark við ánna, og hevur umsitingin í uppskoti rættað markið, soleiðis at byggiøkið verður flutt frá ánni eftir marki, sum verður mett hóskandi. Harafturat hevur umsitingin broytt E øki (almennur stovnur) til A øki, av tí at ongin útstykkingarætlan er fyri økið, og harvið er ikki greitt, júst hvar ein møguligur stovnur hevði hóskað seg, um tað eina ferð í framtíðini verður ústykkjað.

3. Mint verður á orðing í samanleggingarsáttmálanum millum Kirkjubøar og Tórshavnar kommunu

*Orðingin er soljóðandi:*
*"Kirkjubøur og Velbastaður verða varðveittar sum bóndabygdir og koma at bera dám av hesum. Dyrkað jørð, bæði innan og uttangarðs, eigur í hesum sambandi, í mest møguligan mun, at verða varðveitt sum landbúnaðarjørð. Fyrilit skal vísast fyri dyrkbærum lendi, sum, í mest møguligan mun, eigur at verða arðveitt sum lendi, ið kann dyrkast."*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Henda orðing hevur týdning fyri byggisamtykt, í mun til hvørt langtíðarendamálsynski er um at røkka, og mælir umsitingin til, at orðingin, frá samanleggingarsáttmálanum verður varðveitt undir innleiðandi brotinum «Endamál» í uppskotinum um byggisamtykt fyri Velbastað.

4. K økið skal varðveitast

*At enda verður, eins og í viðmerking 2, staðiliga mælt til, at § 10, áseting fyri 4. grundumráði skal strikast.*

*Trupulleikin við ásetingum fyri 4. grundumráði er, at møguliga nýtslan í økispartinum er víðopin, Víst verður til málið um matstovu/gistingarhús við Fossdalsgjógv, tá ið Tk gjørdi uppskot um serstaka byggisamtykt fyri Fossdalsgjógv vísandi til, at allar bygdir í Tórshavnar kommunu vóru í 4. grundumráði. Hetta hevði TK, sambært mótmælinum ikki heimild til, tí at byggisamtyktin fyri Velbastað er galdandi og harvið øki K.*

Umsitingin hevur hesar viðmerkingar:
Víst verður til viðmerkingarnar, sum umsitingin hevði til pkt. 2 í fyrra hoyringsskrivinum.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Byggimálsdeildin viðmerkti uppskotið um endurskoðan av Kaldbak og Kirkjubø, og hevur umsitingin í hesum sambandi gjørt fylgjandi broytingar í sambandi við endurskoðanina av Velbastað:
1) Byggi- og nýtslustigini eru broytt frá einum til tveir desimalar.
2) Upplýsingar til møguliga heildarætlan eru nágreinaðar og lagdar afturat í breddanum.
3) P-krøvini eru broytt, soleiðis at tey eru galdandi fyri bústaðarøkir burturav (Kap III § 3).

**Nýggj skjøl**
*j.nr. 25/01104-13 Kort – Velbastað eftir broyting, nov 2024*
*j.nr. 25/01104-11 Viðmerkingar og broytingaruppskot*
*j.nr. 25/01104-12 Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025*
*j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin fyri Velbastað, uppskot des 2025*
*j.nr. 25/01104-12 Almenna byggisamtyktin Velbastað uppskot des 2025 – við markeraðum broytingum*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, dagf. des. 2025* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

Mælt verður til, at umsitingin fær heimild at stovna mál, har farið verður undir at broyta ásetingar fyri 4. grundumráði fyri alla kommununa, har viðmerkingarnar í hesum málinum vera nærri viðgjørdar

**Byggi- og býarskipanarnevndin 12. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Annfinn Brekkstein legði fram broytingaruppskot um at beina málið aftur í nevnd.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri og seks ímóti.

Fyri atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Annfinn Brekkstein, Anja Weyhe og Bergur Robert Dam Jensen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Elin Heðinsdóttir Joensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Lilja Blaasvær.

**Ískoyti**
Býráðið samtykti at beina málið aftur í nevnd.
Viðgerðin í býráðnum vísti á, at møgulig broyting av galdandi K øki (landbúnaður) til 4. grundumráði, kann gerast óheppin, tá tað í verandi løtu ikki er greitt hvussu dagførdu ásetingarnar fyri 4. grundumráðið verða orðaðar, og tá tað í dag er møguligt við serstakari byggisamtykt at loyva øðrum virksemið í hesum økisparti.

Arbeiðið at dagføra byggisamtyktirnar fyri bygdirnar handlar um at gera eins ásetingar fyri allar bygdir. Býarskipanin fyri kommununa er soleiðis skipað, at ymiskar ásetingar eru galdandi fyri bygda økið, meðan hagin millum bygdir og bý er í økispartinum 4. grundumráðið.

Umsitingin metir at ásetingar fyri 4. grundumráði sambært uppskotinum eru hóskandi, tí hóast tær eru lutfalsliga víðfevnandi, so verður verandi landbúnaðarvirksemi kring bygdirnar varðveitt, umframt at møgulig umsókn um broytta nýtslu, í samb. við t.d. bygging av vindmyllum, grótbroti ella matstovu/gistingarhúsi, skal til politiska viðgerð, almenna hoyring og góðkennast av landsmyndugleikum, áðrenn tílík broyting verður galdandi.

Um umsitingin, í samband við endurskoðanina av Velbastað, skal fremja eina meira nágreinandi býarplan fyri nýtslu í haganum kring Velbastað nú og í framtíðini, er hetta arbeiðið at meta sum ein yvirskipaða lendisætlan, og hóast tað verður mett neyðugt at fremja, fer tað sannlíkt at seinka málið um endurskoðan munandi.

Umsitingin hevur tískil 3 møguleikar:
- At varðveita K økið (verandi áseting)
- At broyta til K til 4. grundumráði (sambært uppskotinum)
- At gera eina lendisætlan fyri hagan kring Velbastað.

Av hesum møguleikum mælir umsitingin til at halda fast í uppskotinum, har verandi K øki verður broytt til 4. grundumráði, grundað á áðurnevnda aðalmál, um at javnstilla byggisamtyktirnar fyri Tórshavnar kommunu, og tí at ásetingin fyri 4. grundumráði varðveitir verandi nýtslu, og krevur serstaka byggisamtykt, sum skal ígjøgnum drúgva tilgongd, um annað virksemið skal loyvast í hesum økispartinum.

**Aðrar viðmerkingar frá umsitingini**

Umsitingin hevur í málinum um byggisamtykt fyri Kirkjubø móttikið viðmerkingar frá Búnaðarstovuni og Bóndafelag Føroya, sum vísa á eina avmarkandi ávirkan, um H frílendi (frílendi) í bygdini, sum bæði í Kirkjubø og á Velbastað er galdandi fyri innangarðsjørð, verður broytt til D1-frílendi. Orsøkin er at D1 ásetingar ikki nevna at økið verður tilskilað landbúnðarvirksemi. Umsitingin mælir tí til at broyta býarplanin soleiðis at H økini í Velbastað (og Kirkjubø) vera broytt til 4. grundurmáði (sí *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026*).

H1 økið, sum sambært galdandi byggisamtykt er lagt til friðað øki av mentunar- og søguligum grundum, verður sambært uppskotinum broytt til D1 øki, og á tann hátt lýsir byggisamtyktin meira nágreiniliga hvørji økir í bygdini hava serligt fornfrøðiligt ella varðveitingarvert virði.

**Nýggj skjøl**
*j. nr. 25/01104-16 Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot feb 2026* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 09. mars 2026:** Anja Weyhe og Annita á Fríðriksmørk taka undir við tilmælinum.

Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen og Kári Johansen taka ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Atkvøtt varð um tilmæli frá umsitingini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Gunnar Djurhuus, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Elin Heðinsdóttir Joensen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen,Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Av misgáum var ikki samsvar millum málslýsing og viðhefta kortskjal til seinastu viðgerð. Ítøkiliga er talan um broytingaruppskotið, sum umsitingin gekk á møti, har F økir vera broytt til D1. Umsitingin hevur tískil viðheft nýtt kortskjal, har feilurin er rættaður (sí *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026)*.

**Nýggj skjøl**
*j. nr. 25/01104-19 Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026*

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býararkitekturin mæla til at broyta uppskotið sambært skjalinum *Kort - Velbastað eftir broyting, uppskot mars 2026* og *Almenna byggisamtyktin Velbastað dafg, des 2025* og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 13. apríl 2026:** Ein minniluti, Anja Weyhe, Heidi Lava Elgeirsdóttir, tekur undir við tilmælinum.

Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Birgir Nielsen, Kári Johansen, tekur ikki undir við timælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Tikið av skrá.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá umsitingini, ið varð samtykt við sjey atkvøðum fyri, seks atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

# 187/26 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri matr. nr. 39e og 39f, Argir. Frá A1 til A4

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 08.05.2026 | 120/26 | 26/00563-3 |
| 2 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 187/26 | 26/00563-3 |

**Upprunin til málið**
Umsøkjari hevur, við heimild frá eigara, søkt um loyvi at byggja íbúðir á ognunum matr. nr. 39e og 39f, Argir.

**Lýsing av málinum**
Ognirnar liggja í A1 sethúsaøki, og hevur umsøkjari, í samráð við umsitingina, søkt um at broyta byggisamtyktina fyri økið til nýggja A4 øki, ætlað opnari/lágari íbúðarbygging, sum í løtuni liggur til góðkenningar hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Ásetingar fyri A1 øki í almennu byggisamtyktini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til stakhús. Eftir serloyvi frá byggivaldinum kunnu eisini byggjast tvíhús, raðhús og tílíkir bústaðir fyri eitt húski. Stakhús og tvíhús kunnu eisini hava eina minni íbúð, ið tó ikki kann frábýtast sum eigaraíbúð.

Ásetingar fyri A4 øki smb. uppskoti til broyting av almennu byggisamtykini eru m.a.:

- Umráðisparturin verður lagdur til opna/lága bústaðabygging.
- Skipanin av økinum skal taka atlit til og hóska til kringliggjandi bústaðarøki.

**Upplýsingar frá umsitingini**
Í sambandi við yvirskipaða ynskið um at gagnnýta avmarkaða lendið í Tórshavnar kommunu á mest skynsama hátt og býartætta, verður mælt til, at tað í ávísum egnaðum sethúsaøkjum verða bygdar íbúðir ístaðin fyri sethús – hetta fyri at tryggja eina skynsama lendisnýtslu og burðardygga býarmenning. Uppskot um at gera nýggjan umráðispart til tílíka bygging í almennu byggisamtyktini, liggur í løtuni til góðkenningar hjá Uttanríkis- og vinnumálaráðnum, sí mál *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – opin og lág bústaðarbygging* og uppskot til ásetingar fyri umráðispart A4 í skjali *Umráðispartur A4 í 3. grundumráði*. Møguleikin at leggja økið sum A4 øki er treytað av, at uppskotið verður góðkent.

Umsitingin metir, at matr. nr. 39e og 39f er egnað at skipa á ein tílíkan hátt. Av tí at talan er um íbúðarøki millum – ella tætt upp at – sethúsaøkjum, eru byggiregulerandi ásetingarnar fyri nýggja A4 økið at sammeta við tær fyri A1 – sethúsaøki. Tað merkir millum annað, at mest loyvda byggistig er 0,30, mest loyvda nýtslustig er 0,70 og mest loyvda hædd er tann sama, sum í vanligum sethúsaøkjum. Munurin er, at tað í hesum nýggja umráðispartinum ber til at skipa økið sum íbúðarøki við t.d. felags parkeringsøki og hentleikum annars, umframt at til ber at sundurbýta íbúðirnar í eigaraíbúðir. Mett verður, at tað á matr. nr. 39e og 39f í tí føri kunnu byggjast uml. 10 bústaðir, ístaðin fyri 4 bústaðir (á hvørjum stykki kunnu í løtuni byggjast eini tvíhús).

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

- *Nýggjur umráðispartur í almennu byggisamtyktini. A4 – opin og lág bústaðarbygging,* journal nr. 25/10630.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**
Viðmerkingar frá Teknisku deild:

Verður byggisamtyktin broytt, og eigarin fær loyvi at byggja 10 til 12 bústaðir, verður neyðugt at taka verandi vatnleiðingar burtur og nýggj og størri leiðing má leggjast til ognirnar. Kostnaðin skal eigarin av ognunum bera. Høvuðsleiðingarnar megna væl at veita vatnið, um byggisamtyktin verður broytt.

Viðmerkingar frá Byggimálsdeildini:
Byggimálsdeildin hevur ongar viðmerkingar til broytingina.

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

- *Kort – áðrenn broyting,* journal nr. 26/00563-8.
- *Kort – eftir broyting,* journal nr. 26/00563-8.
- *Umráðispartur A4 í 3. Grundumráði,* journal nr. 26/00563-9.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býararkitekturin mæla til at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 39e og 39f, Argir, frá A1 øki til A4 øki, og beina málið í býráðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 08. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

Birgir Nielsen var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, tvær atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, og Annfinn Brekkstein.

| | Býráðsfundur<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 720<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

# 188/26 Parkeringspláss við omankoyringina til Hvítanes

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Hvítanesnevndin | 12.03.2025 | 3/25 | 25/03896-1 |
| 2 Hvítanesnevndin | 16.06.2025 | 5/25 | 25/03896-1 |
| 3 Ferðslunevndin | 28.08.2025 | 25/25 | 25/03896-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 01.09.2025 | 48/25 | 25/03896-1 |
| 5 Hvítanesnevndin | 23.09.2025 | 9/25 | 25/03896-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 10.09.2025 | 142/25 | 25/03896-1 |
| 7 Býráðsfundur | 18.09.2025 | 197/25 | 25/03896-1 |
| 8 Ferðslunevndin | 09.10.2025 | 35/25 | 25/03896-1 |
| 9 Ferðslunevndin | 07.11.2025 | 40/25 | 25/03896-1 |
| 10 Hvítanesnevndin | 24.02.2026 | 1/26 | 25/03896-1 |
| 11 Tekniska nevnd | 08.05.2026 | 65/26 | 25/03896-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 119/26 | 25/03896-1 |
| 13 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 188/26 | 25/03896-1 |
| 14 Hvítanesnevndin | 11.06.2026 | 6/26 | 25/03896-1 |

**Upprunin til málið**
Staðbundna nevndin á Hvítanesi ynskir at betra um ferðslutrygdina og møguleikan um til- og frákoyring út á landsvegin, og somuleiðis økja um trygdina hjá bussleiðini og ferðandi tess. Eisini at gera umstøðurnar hjá bilum at parkera í økinum.

**Lýsing av málinum**
Frá Hvítanesnevndini:

Trupuleikin lýstur í stuttum.
Tá býarbussurin koyrir inn á Hvítanes, stevnur hann beint móti busskýlinum, sum als ikki er ein ferðslutrygg loysn. Somuleiðis koyrir ferðslan til Hvítanes, sum kemur úr Havnini, beint framvið skýlinum. Skýlið er eitt sokallað krosskýli, sum skal kunna verja fólk móti vindi úr øllum ættum, men tað ger somuleiðs, at mann ikki altíð sær um fólk eru í skýlinum, ella eru fjald handan sýnina.

Ymiskar loysnir sum vit mæla til og ynskja verða framdar. Loysnirnar skulu tó viðgerðast av serkønum fólki innan ferðslutrygd og vegarbeiði, so frægasta loysnin verður funnin.

- Sjálvt skýli kann skiftast út við eitt úr glasi, ella partvíst úr glasi, so førarar síggja um fólk eru í skýlinum.
- Betongirðingin fram við gøtuni, kann leingjast, soleiðis at bussskýlið og fólk eru vard av girðingini, um ein bilur ella bussurin kemur av leið, tá koyrt verður inn á Hvítanes. Skelkarmyndin er, at bussurin ”pløjar” og koyrir beint gjøgnum bussskýlið, sum í dag er gjørligt, um heilt illa stóð til.
- Umhugsa aðra staðseting av sjálvum bussskýlinum.
- Sjálv útkoyringin verður flutt longur norður. Uttan serligt gravararbeiði, kann útkoyringin flytast eina heila farbreyt longur norður, 3–4 metrar, sum vil geva bussinum betur pláss at venda á Hvítanesi. Við eitt sindur av útfylling, kann útkoyringin flytast enn longur.

Stórt økið er eisini undir landsvegnum og norðanfyri útkoyringina, til at gera nøkur fá parkeringspláss til bilar og fólk at bíða eftir bussinum, ella at umskipa fólk og/ella viðføri.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 721<br><br>Forkvinnunnar merki: |

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Hvítanesnevndin 12. mars 2025:** Kunnað og umrøtt varð um parkeringsætlanina. Ymsar loysnir vóru umrøddar og umsitingin ger uppskot til loysnir til komandi fund við at flyta busssteðgistaðið, gera parkeringspláss og nýtt bussskýli og alt hetta við 60 km/t á Hvítanesvegnum sum grundarlag.

**Ískoyti:**
Umsitingin leggur fram uppskot til umrøðu.

**Hvítanesnevndin 16. juni 2025:** Uppskotið varð framlagt og umrøtt. Umsitingin arbeiðir víðari við framløgdu loysnini. J.nr. 25/03896-7.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til loysn við miðoyggj, parkeringsplássi og tillagan av bussskýli við tilhoyrandi kostnaðarmeting álj. uml. kr. 550.000.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 8175 | | | Omankoyring til Hvítanes |

| **Upphædd** |
|---|
| 550.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 550.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2025 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 5.000 |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 550.000 til arbeiðið at dagføra vegamótið við omankoyringina til Hvítanes av LK81999 Vegaverkætlanir á nýggja verkætlan "Omankoyring til Hvítanes" báðar undir kontu 8175 Vegir (íløgur) og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Ferðslunevndin 28. august 2025:** Ferðslunevndin tekur undir við uppskotinum hjá umsitingini. Umsitingin arbeiðir víðari við ítøkiligum uppskoti til ferðslumerking.

**Tekniska nevnd 01. september 2025:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Heðin Mortensen, Anja Weyhe, tekur undir við tilmælinum.

Annfinn Brekkstein tekur ikki undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson atkvøður ímóti.

**Fíggjarnevndin 10. september 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála, Kristianna Winther Poulsen og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson, atkvøður ímóti.

**Býráðsfundur 18. september 2025:** Kári Johansen skeyt upp at beina málið aftur í nevnd.

Fyri atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen, Anja Weyhe og Bergur Robert Dam Jensen

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Blankt atkvøddi: ongin.

Samtykt at beina málið aftur í nevnd við 7 atkvøðum fyri, 6 atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

**Hvítanesnevndin 23. september 2025:** Umrøtt. Vísandi til samtykt 16. juni 2025 stendur staðbundna nevndin enn við sína støðu og hildið verður fast við loysnina sum víst í skjali 25/03896-7.

**Ískoyti**
Til nýggja umrøðu í ferðslunevndini.

**Ferðslunevndin 09. oktober 2025:** Tekur undir við, at umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Ískoyti**
Kunnað verður um málið.

**Ferðslunevndin 07. november 2025:** Kunnað varð um skriv frá Landsverk dagf. 30.10.25 har tað varð víst á, at Landsverk mælir frá at seta ferðina niður í 60 km/t, men heldur til at seta upp (variable hastighedstavler i kryds med sidevejsdetektering). Ferðslunevndin heldur fast við niðurstøðuna frá 9. okt. 2025.

**Ískoyti:**
Í framhaldi samskiftinum við Landsverk um dagføring av sjálvum vegamótinum og hartilhoyrandi spurninginum um at niðurseta ferðina á Hvítanesvegnum úr 80 km/t niður á 60 km/t, verður hesin parturin av málinum steðgaður fyribils til loysn verður funnin í framtíðar samskifti við Landsverk. Arbeitt verður ístaðin við at fáa avgreitt tann partin av málinum, sum snýr seg um staðseting av p-plássi í ovara borði á vegnum oman til bygdina.

Kunnað verður annars um málið.

**Hvítanesnevndin 24. februar 2026:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**
Vísandi til tørvin á at fáa farið undir arbeiðið at gera p-pláss við omankoyringina til Hvítanes, verður mælt til at bíða við tí partinum av málinum, sum snýr seg um sjálva íbindingina og um samskiftið við Landsverk um spurningin at seta ferðina niður til 60 km/t á strekkinum fram við sjálvari íbindingini. Í staðin fyri verður mælt til at fara undir gerð av p-plássinum.

Undir konto 8175 Vegir (íløgur) er annar løgukarmur LK81998 Parkering, og í 2025 eru ásettar kr. 700.000 fyri fíggjarárið.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81998 | Parkering | 8175 | | | P-pláss við omankoyringina til Hvítanes | 200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 200.000 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til:
- At gera parkeringspláss við omankoyringina til Hvítanes
- At játtaðar verða játta kr. 200.000 av løgukarmi LK81998, Parkering, undir konto 8175, á nýggja verkætlan “P-pláss við omankoyrigina til Hvítanes”, undir somu konto
- At beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 725 |
| | Forkvinnunnar merki: |

## <u>189/26 Útstykkingarvegur á matr. nr. 203c í Kollafirði</u>

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 24.11.2025 | 89/25 | 25/08052-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 03.12.2025 | 229/25 | 25/08052-1 |
| 3 Býráðsfundur | 11.12.2025 | 287/25 | 25/08052-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 13.04.2026 | 47/26 | 25/08052-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 83/26 | 25/08052-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 110/26 | 25/08052-1 |
| 7 Tekniska nevnd | 08.05.2026 | 68/26 | 25/08052-1 |
| 8 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 117/26 | 25/08052-1 |
| 9 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 189/26 | 25/08052-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/06231-2 Útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging.

**Lýsing av málinum**
Ætlaði íbúðarvegurin verður partur av verandi vegakervi hjá kommununi og framhald av málinum um útbjóðing av matr. nr. 203c í Kollafirði til raðhúsa- ella íbúðarbygging, vísandi til at tekniska nevnd hevur tikið undir við tilmælinum 10. juni 2025, at hava nýtt útboð fyri matr. nr. 51-203c.

Í hesum føri er ætlanin at fara undir vegarbeiðið fyrst.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 726 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Útstykkingarvegur á matr. nr. 103c, Kollafjørður | 200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | na |
| Áður játtað | Upphædd: | 0 |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | 2026 |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 15.000 |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at
1) heimila umsitingini at fyrireika útbjóðingartilfar at prosjektera vegaætlanina at leggja fyri nevndina aftur.
2) játta kr. 200.000 av løgukarmi LK81999 Vegaverkætlanir.
3) beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 24. november 2025:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 03. desember 2025:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skála og Kristianna Winther Poulsen, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið.
Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Høgni Vilhelmsen, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 11. desember 2025:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri og fimm atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Rúni Reginsson Hammer og Annfinn Brekkstein.

**Ískoyti**
Umsitingin hevur gjørt uppskot til tilfar at bjóða út í innbodnari lisitatión. Uppskotið tekur støði í gerð av vegi uml. 60 m við vendiplássi, tó uttan veitingar og asfalt. Tá ið komandi mennari kemur at gera útstykkingarabeiðið, verður hesin vegurin náttúrligur partur av útstykkingararbeiðinum.

Mett verður, at kostnaðurin fyri arbeiðið at gera vegin verður umleið kr. 1,3 mió.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | | | Útstykkingarvegur matr.nr. 203c í Kollafirði | 1.300.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til

- at heimila umsitingini at bjóða út arbeiðið í innbodnari lisitatión og at fara undir samráðingar við tann, sum hevur besta boð at gera sáttmála um arbeiðið.
- at játta kr. 1.300.000 av løgukarmi LK81999 á nýggja verkætlan "Útstykkingarvegur matr.nr. 203c í Kollafirði", undir konto 8175 Vegir (íløgur).
  at beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 13. apríl 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Guttormur í Skála, Birgir Nielsen, tekur undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Kristianna Winther Poulsen, Heidi Lava Elgeirsdóttir og Høgni Vilhelmsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Kári Johansen skjeyt upp at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við 7 atkvøðum fyri og 6 atkvøðum ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bergur Robert Dam Jensen, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála

**Tekniska nevnd 08. mai 2026:** Nevndin áleggur umsitingini, at útboð ikki mugu fara út áðrenn neyðugar samtyktir fyriliggja.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Kunnað varð um málið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við ellivu atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvødd: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddi: Súna Mørk.

# 190/26 Parkeringsskipan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 09.02.2026 | 22/26 | 25/11126-3 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 39/26 | 25/11126-3 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 61/26 | 25/11126-3 |
| 4 Tekniska nevnd | 08.05.2026 | 66/26 | 25/11126-3 |
| 5 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 118/26 | 25/11126-3 |
| 6 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 190/26 | 25/11126-3 |
| 7 Býráðsfundur | | | 25/11126-3 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 9901848 Parkerinsskipan í Tórshavnar kommunu, har kommunan og Føroya Fútadømi avtalaðu í 2003 at dagføra parkeringskipanina í kommununi og sum liður í menningin var millum annað farið undir at brúka eina innkrevjara- og telduskipan, TicketMan, sum parkeringansararnir skuldu brúka.

**Lýsing av málinum**
Parkerignsskipanin, sum Føroya Fútadømi/Føroya Politi saman við Tórshavnar kommunu hevur nýtt í meiri enn 20 ár, treingir til umfatandi dagføringar. Størsta avbjóðingin er tann parturin í skipanini, sum fyrisitur innkomin parkeringsgjøld. Talan er um eina gamla skipan, sum samankoyrir ásett gjøld fyri ólógliga parkering saman við skrásetingini hjá Akstovuni. Skipanin er nú vorðin ótíðarhóskandi og hevur umsitingin hjá Føroya Politi havt trupult við at senda kommununi kvatrárligar fíggarligar uppgerðir. Av somu orsøk hava trupuleikar verið við fíggjarstøðuni á rakstarkonto 7610 Parkeringsskipanin.

Umsitingin hevur kannað møguleikarnar fyri at dagføra skipanina og komin til ta niðurstøðu at royna aðra skipan. Í hesum sambandi hevur umsitingin kunnað seg um skipanina hjá Tunnilsfelagnum og Vága Floghavn. Skipanin hjá Tunnilsfelagnum hevur vist seg at virka sera væl og hóast at hendan skipan ikki í verandi líki kann nýtast av kommuni, so hevur umsitingin fingið eina fyribils kostnaðarmering frá Formula, sum eigur skipanina hjá Tunnilfelagnum, til at gera eina líknandi skipan til Tórshavnar Kommunu.

Skipanin hjá Formula verður ein skipan, har dátur frá parkeringsansarum verða tengd saman við upplýsingum frá Akstovuni og upprættað sum ein kreditor sak. Saman við rokniskaparskipanini hjá Føroya Politi, verður giro send til avvarandi bileigara, antin talgilt ella fysiskt.

Í sama viðfangi er neyðugt at dagføra skipanina ið parkeringsansarnirnir brúka úti á gøtunum, til at skráseta ólógligar parkeringar. Skipanin, ið er umsitin av veitaranum Schweers er ótíðarhóskandi og hevur veitarin í fleiri ár hildi einari gamlari útgávu av skipanini koyrandi einans vegna Tórshavnar Kommunu. Tískil hevur umsitingin eisini fingið eina fyribils kostnaðarmeting frá Schweers uppá at dagføra skipanina til eina nýggjari útgávu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
Løgtingslógarkunngerð nr. 14 frá 2. mars 1988 um ferðslu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 74 frá 30. apríl 2025:
§ 58 e, stk. 9 Landsstýrismaðurin kann áseta, at eftirlitið við, at reglurnar, ið nevndar eru í stk. 1, verða hildnar, heilt ella partvíst verður latið viðkomandi bý- ella bygdaráði eftir samráðing at umsita. Landsstýrismaðurin setur greiniligari reglur um starvið hjá kommunalum parkeringsvørðum.

§ 58 e ,Stk. 7. Landfútin kann lata serligum parkeringsvørðum heilt ella fyri ein part at hava eftirlit við, at reglurnar, ið nevndar eru í stk. 1, verða hildnar. Landsstýrismaðurin setir greiniligari reglur um starvið hjá parkeringsvørðum.

§ 58 e ,Stk. 8. Útreiðslurnar av parkeringsvørðum verða goldnar úr landskassanum ella eftir samráðing við viðkomandi bý- ella bygdarráð av viðkomandi kommunu.

§ 58 e ,Stk. 9. 4) Landsstýrismaðurin kann áseta, at eftirlitið við, at reglurnar, ið nevndar eru í stk. 1, verða hildnar, heilt ella partvíst verður latið viðkomandi bý- ella bygdaráði eftir samráðing at umsita. Landsstýrismaðurin setur greiniligari reglur um starvið hjá kommunalum parkeringsvørum.

Kunngerð nr. 138 frá 22. desember 2000 um innkrevjing av gjaldi fyri ólógligan steðg ella ólógliga parkering:
§ 1. Gjaldið fyri brot á tær í § 58 e, stk. 1, í ferðslulógini fyrisettu reglur um steðg og parkering, skal rindast Føroya Landfúta innan 10 dagar frá tí degi, tað er álagt. Verður roynt at krevja gjaldið frá eigaranum (nýtaranum) eftir § 58 e, stk. 4, í ferðslulógini, fær hann eina freist at rinda gjaldið upp á minst 10 dagar roknað frá tí degi, hann hevur fingið boð um gjaldskravið.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd   Ja ☐   Nei ☐**

**Skjøl**
25/11126-1   Tilfar frá stýrisfundinum í dag – Parkeringsskipan

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei
Verður fíggjað av rakstrarkontu 7610, Parkeringsskipanin.

Umsitingin hevur móttikið tilboð frá Formula upp á eina dagførda parkeringsskipan álj. kr. 335.707 (u/mvg). Umsitingin hevur eisini móttikið tilboð frá Schweers upp á eina dagførda skrásetingarskipan álj. Kr. 88.920,50 (u/mvg).

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til játta kr. 500.000,- til endamálið at fáa eina dagførda parkeringsskipan.
Alternativt fíggjað av løgukontu 8175 Vegir (íløgur) LK81999 Vegaverkætlanir.

**Tekniska nevnd 09. februar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti**
Umsitingin er komin eftir, at rakstrarkonta 7610 Parkeringsskipanin hevur stórt trot og kann tí ikki brúkast til at fíggja nevndu skipan.

Tí er neyðugt at skipanin verður fíggjað av konto 8175 Vegir (íløgur) LK81999 Vegaverkætlanir sum eykajáttan.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 7610 | | Parkeringsskipanin | | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fíggja dagføringina av parkeringsskipanini av løgukarminum LK81999 Vegaverkætlanir undir kontu 8175 Vegir (íløgur) sum eykajáttan og beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Útsett.

**Ískoyti**
Undir konto 8175 Vegir (íløgur) er annar løgukarmur LK81998 Parkering, og í 2025 eru ásettar kr. 700.000 fyri fíggjarárið.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eykajáttan ☒
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8175 | LK81998 | Parkering | 7610 | | Parkeringsskipan | | 500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

## Tilmæli

Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at fíggja dagføringina av parkeringsskipanini álj. kr. 500.000 av løgukarminum LK81998 “Parkering” undir kontu 8175 Vegir (íløgur) sum eykajáttan og beina málið til tvær viðgerðir í býráðnum umvegis fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 08. mai 2026:** Ein meiriluti, Bergur Robert Dam Jensen, Anja Weyhe, Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at arbeiðið ikki er boðið út, og at kommunan heldur skuldi farið undir eina tilgongd at øll skuldu goldið fyri at parkera í býnum í ein parkeringsgrunn, sum kommunan eigur og rekur.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Ein meiriluti, Elsa Berg, Guttormur í Skúla, Kristianna Winther Poulsen og Birgir Nielsen, tekur undir við meirilutanum í teknisku nevnd og beinir málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson tekur ikki undir við tilmælinum, vísandi til at arbeiðið ikki er boðið út, og at kommunan heldur skuldi farið undir eina tilgongd at øll skuldu goldið fyri at parkera í býnum í ein parkeringsgrunn, sum kommunan eigur og rekur.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð við fyrstu viðgerð um tilmælið frá meirilutanum í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tíggju atkvøðum fyri, einari atkvøðum ímóti og tveimum blonkum atkvøðum.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Súna Mørk og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

Blankt atkvøddu: Høgni Vilhelmsen og Birgir Nielsen.

# 191/26 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK - innkomuveg - 21/02196

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 02.06.2025 | 25/25 | 25/01181-1 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 35/26 | 25/01181-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 62/26 | 25/01181-1 |
| 4 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 120/26 | 25/01181-1 |
| 5 Tekniska nevnd | | | 25/01181-1 |
| 6 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 191/26 | 25/01181-1 |

**Upprunin til málið**

Málið er lýst í málslýsing jnr. 21/02196-2, Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK, sum er løgd við sum fylgiskjal.

**Ískoyti**

Nú vegarbeiðið sambært tíðarætlan verður avhendað um mánaðarskiftið juni/juli 2025, verður kunnað um málið.

Fíggjarlig uppgerð pr. 05.05 2025

| | | |
|---|---|---|
| Samlað játtan íalt | kr. | 417.452.000 |
| 1) Frá Føroya Landstýri | kr. | 110.000.000 |
| 2) Frá Eysturoyartunlinum | kr. | 12.924.000 |
| 3) Tórshavnar býráð | kr. | 294.528.000 |
| | | |
| Brúktar eru | kr. | 66.489.000 |
| Avlop | kr. | 50.936.000 |
| Virði á arbeiði at gera til avhending | kr. | 50.872.000 |
| Framskrivað fíggjarstøða | kr. | 63.049 |

Víst verður annars til skjal nr. 25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx.

**Skjøl**

21/02196-2 Uppskot til stuðulslóg til nýggjan uttara ringveg og uppskot til avtalu við TK
25/01150-2 Totalt yvirlit 6.xlsx

Umsitingin kunnar um gongdina í málinum.

**Tekniska nevnd 02. juni 2025:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti**

Verkætlanin við innkomuvegnum varð avhendað 01.07.2025 við mangullista.

Nú arbeiðið er liðugt er staðfest, at tørvur er á kr. 3 mió. til endaliga liðugerð, og stavar henda upphædd í høvuðsheitum frá útreiðslum til keyp av lendi frá privatum borgara, matrikulering og eyka útreiðslur í sambandi við byggingina, so sum streym til gøtuljós, strikingar og drekkivatnsleiðingar. Talan er ítøkiliga um niðanfyri standandi:

- Keyp av lendi frá 55-1372a, 786 m² x 2000 kr/m² = 1.572.000 kr.
    - Orsøkin til høga m2 prísin, er at matrikulin liggur í byggilendi. Keypið er vegna tað, at vavið av inntakinum til tunnilin kom longri inn á umrødda matrikul enn upprunaliga mett.
- Veiting av tilfari til drekkivatni: 1.249.130 kr
    - Talan er um tilfar til vatnleiðingar einans. Arbeiðið at grava fyri, leggja og tyrva er innihildið í verkætlan.
- Matrikulering av Havnavegnum: 500.000 kr (mettur kostnaður út frá galdandi prísum hjá Umhvørvisstovuni)

Tilsamans 3.321.130 kr, harav uml. kr. 320.000 eru goldnar av verkætlanini frammanundan.

**Skjøl**
25/01181-5 Totalt yvirlit 12.xlsx

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

| | |
|---|---|
| Vanlig játtan | ☒ |
| Eykajáttan | ☐ |
| Loka verkætlan | ☐ |

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81999 | Vegaverkætlanir | 8175 | L81037 | Innkomuvegur | | 3.000.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**
Tekniski stjóri og býarverkfrøðingurin mæla til at játta kr. 3 mió av løgukarminum LK81999 undir kontu 8175 Vegaverkætlanir inn á verkætlanina L81037 Innkomuvegur.

**Tekniska nevnd 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Umrøtt og verður tikið upp aftur á komandi fundi.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

# 192/26 Nýggjur economiser til Brennistøðina

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 04.05.2026 | 38/26 | 26/03662-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 122/26 | 26/03662-2 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 192/26 | 26/03662-2 |

**Upprunin til málið**
Í oktober 2024 fekk kommunan eina støðulýsing frá Rambøll uppá Brennistøðina á Hjalla. Støðulýsingin vísir, at ymisk arbeiðir skulu gerast komandi árini, m.a. útskiftan av economiser (ECO)

**Lýsing av málinum**
Í støðulýsingini frá Rambøll er eisini gjørd ein raðfesting av teimum ymisku arbeiðunum, sum skulu gerast. Útskiftan av ECO verður raðfest høgt, tí verandi ECO er illa farin og tað ber ikki til at reka Brennistøðina og framleiða fjarhita, um ECO ikki virkar.

Rambøll hevur gjørt útbjóðingartilfar til nýggjan ECO og innheintað tilboð frá Kanadevia, hetta tilboði er hjálagt.

Nýggi ECO verður staðsettur uttan fyri verandi bygning, og verður hetta gjørt, bæði tí at tað ikki er nóg mikið av plássi inni í verandi bygningi til nýggja ECO, og tí at við at seta hann uttanfyri, so kann Brennistøðin koyra samstundis sum meginparturin av arbeiðinum verður gjørt.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Tilboðið er uppá íalt kr. 9.650.000, tað er fyri veitan og uppsetan, uttan mvg.

Um rør skulu verða úr rustfríum og sýru-føstum tilfari, verður eykakostnaðurin kr. 1.935.000.

Tilboðið er galdandi til 21. juni 2026.

Ætlanin er at gera arbeiðið í viku 38, tað er miðjan september 2026.

Ætlanin er at gera ein klimaskerm (bygning) rundan um ECO, bæði fyri at verja ECO og fyri at kunna viðlíkahalda og gera neyðug eftirlit og útskiftan, eisini tá veðrið er ringt.

Bygningur og fundamentir eru ikki við í tilboðnum omanfyri.

Kanadevia hava givið ein eykaprís fyri rør úr rustfríum og sýru-føstum tilfari uppá kr. 1.935.000.
Umsitingin metir ikki at tað er neyðugt við rustfríum rørum, vísandi til, at tjúgdin av rørunum er 1 mm meira enn á verandi ECO.

<u>Kostnaðarmeting:</u>
Mett verður, at samlaði kostnaðurin av at fáa ein nýggjan ECO verður kr. 13,5 mió, sum er:

- Tilboðið frá Kanadevia kr. 9.650.000
- Fundamentir og bygningur kr. 2.000.000
- Annað kr. 1.850.000 (prosjekt, flutning, 6,25% mvg v.m.)
- Kostnaðarmeting íalt kr. 13.500.000

Neyðugt verður at steðga brenningini (sløkkja ovnin) í uml. 3 vikur, meðan ECO verður settur til verandi skipan. Hesa tíðina kann møguliga roknast við, at neyðugt verður at pakka burturkast til at leggja á goymslu ella til at senda av landinum, alt eftir hvussu leingi brennistøðin liggur still, hvussu nógv burturkast kemur inn og hvussu nógv kann sendast til IRF.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
Víst verður til j.nr. 25/3238, raðfestingar íløgukonto 7175, Renovatión (íløgur), fyri 2025, har býráðið tann 18.09.2025 samtykti, at raðfesta kr. 9.250.000 til útskiftan og umvælingar á Brennistøðini, og at íløgan verður at leggja fyri náttúru- og umhvørvisnevndina, fíggjarnevndina og býráðið sambært játtanarreglunum, tá tørvur er á tí.

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl**
j.nr. 26/03662-1 Tilboð frá Canadevia uppá nýggjan ECO

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** **(set x)**

| | **Fyri Tórshavnar kommunu** | **Fyri ávís økir í kommununi** | **Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir** | **Fyri vinnuna** |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | LK71999 | Renovatión (íløgur) | 7175 | L71008 | Útskiftingar og umvælingar á Brennistøðini | | 13.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, leiðarin á Umhvørvisdeildini og leiðarin á KOB mæla til:
- at tikið verður av tilboðnum frá Kanadevia uppá nýggjan ECO, fyri íalt kr. 9.650.000,
- at játtaðar verða kr. 13.500.000 av løgukarmi LK71999, Renovatión (íløgur), á verkætlan L71008, Útskiftingar og umvælingar á Brennistøðini, undir konto 7175.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 04. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum við tí broyting, at upphæddin kr. 13.500.000 verður broytt til kr. 4.250.000, sum skulu játtast av LK71999 á konto L71008. Tað eru frammanundan játtaðar kr. 9.250.000 av LK71999 á konto L71008.

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 7175 | LK71999 | Renovatión (íløgur) | 7175 | L71008 | Útskiftingar og umvælingar á Brennistøðini | | 4.250.000 |

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 738<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 193/26 Nevndarlimur Visit Tórshavn 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 133/26 | 26/03040-2 |
| 2 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 166/26 | 26/03040-2 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 193/26 | 26/03040-2 |

**Upprunin til málið**
Býráðið skal velja ein nevndarlim og ein tiltakslim í nevndina fyri Visit Tórshavn í 2026. Felagið Tórshavn (Visit Tórshavn) hevur havt aðalfund tann 28. apríl 2026.

**Lýsing av málinum**
Nevndin hjá felagnum Tórshavn telur fimm limir, ið sita tvey ár í senn. Annaðhvørt ár standa tveir nevndarlimir fyri vali, og annaðhvørt ár standa tríggir limir fyri vali.

Tveir nevndarlimir verða valdir beinleiðis av Tórshavnar kommunu og tríggir verða valdir av Felagnum Tórshavn á aðalfundi. Teir nevndarlimir, ið kommunan velur, og tveir av nevndarlimunum, ið Felagið Tórshavn velur, skulu verða persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovuvinnu og møguliga aðra vinnu, sum ein ein viðkomandi leiklut í ferðavinnuhøpi.

Triði nevndarlimurin, sum Felagið Tórshavn velur, umboðar Felagið Tórshavn, og kann verða valdir millum limir felagsins ella umboðandi almennan ella privatan stovn, savn, mentanarlív ella líknandi.

Nevndarlimir kunnu ikki vera býráðslimir. Nevndarlimir kunnu verða valdir aftur.
Fyri hvønn nevndarlim verður tiltaks nevndarlimur valdur.
Nevndin skipar seg sjálva við formanni og næstformanni.

Samgongan valdi í 2025 nevndarlim og tiltakslim. Í 2026 er tað andstøðan, sum skal velja nevndarlim og tiltakslim.

Í ár standa Sóley Heradóttir Hammer og Sunnvá Dahl Høgfeldt fyri vali um sum umboð fyri Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd  Ja ☐  Nei ☐**

**Skjøl**

| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 739<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☒ Nei

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir til, at Býráðið velur lim og nevndarlim fyri Felagið Tórshavn, sum andstøðan mælir til.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Tróndur Sigurðsson skjýtur upp at velja Súsannu Sondum sum fastan lim, og Annfinn Brekkstein skjýtur upp at velja Geir Wardum sum tiltakslim í nevndina fyri Felagið Tórshavn, ið var einmælt samtykt.

**Ískoyti:**
Gjørt er vart við, at omanfyri nevndu lúka ikki krøvini sambært viðtøkunum.

Krøvini til nevndarlimir er, at teir "skulu vera persónar, sum eru leiðarar ella stjórar innan ferðavinnu, handilsvinnu, matstovu vinnu og møguliga aðra vinnu, sum hevur ein viðkomandi leiklut í ferðavinnu høpi."

Fyri ikki at bróta viðtøkurnar, verður málið lagt fyri aftur næsta býráðsfund, har minnilutin fær høvið at velja nevndarlim og varalim, sum lúka krøvini sambært viðtøkunum.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt var um at staðfesta valdar limir og at beina málið í vinnunevndina um at broyta viðtøkurnar fyri val av nevndarlimum, ið varð einmælt samtykt.

## 194/26 Leigumál. Kommunan leigar lendi til Transformarastøð. SEV. Øki á Bøllureyni. matr.nr. 139a, Tórshavn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 93/26 | 25/09219-3 |
| 2 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 132/26 | 25/09219-3 |
| 3 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 165/26 | 25/09219-3 |
| 4 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 109/26 | 25/09219-3 |
| 5 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 194/26 | 25/09219-3 |

**Upprunin til málið. SEV hevur søkt um byggiloyvi til eina transformarastøð á matr.nr. 139a, Hoyvík. Á Bøllureyni við Oyggjarvegin.**

**Lýsing av málinum**
Kommunan hevur givið byggiloyvi til Transformarastøðina 29.09.2025.
Náttúrufriðingarnevnd Streymoyar Sýslu, hevur givið sýtt samtykki til bygging/staðseting 19.08.2025, og hevur hin 28.september 2025, givið loyvið.

Vísandi til at talan er um festijørð, krevur Búnaðarstovan at leigusáttmáli verður gjørdur, og at Tórshavnar kommuna stendur fyri leigumálinum.
Kostnaður. Byrjan kr. 2.500,- og ein árlig leiga á 500 kr.

Búnaðarstovan hevur sent kommununi eitt uppskot til ein 10 ára leigusáttmála.

**Lógir, ásetingar o.a.**

Matrikkullógin og viðtøkur fyri SEV.

Sambært grein 10 stk. 1, í viðtøkunum fyri SEV framgongur, at hvør limakommuna letur innanfyri kommunumark felagnum ókeypis til handa ta vídd, ið tørvar til háspennings- og lágspenningsleiðingar, transformarastøðir og til vegir til støðirnar.

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☒**

**Skjøl** 25/09219-1 Leigusáttmáli.

| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 741<br><br>Forkvinnunnar merki: |
|---|---|---|

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei
**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn |
| | | |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| Deild | Verk-ætlan | Navn | Nýggj verkætlan |
| | | 6111 | |

| Upphædd |
|---|
| 2500 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| Íløgujáttan | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | 2500 |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | 500 |

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at leiga lendið frá Búnaðarstovuni í 10 ár, sí sáttmála skjal 25/09219-1

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

Kristianna Winther Poulsen og Tróndur Sigurðsson vóru ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Borgarstjórin kom við broytingaruppskoti um at beina málið aftur í nevnd, ið varð einmælt samtykt

**Ískoyti:**

Málið verður lagt fyri aftur í fíggjarnevnd.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 742 |
| | Forkvinnunnar merki: |

Spurningur um festari er hoyrdur.

Upplýsast kann, at í samband við viðgerðina av byggimálinum ( j.nr. 25/05995 ) framgongur sambært útskrift úr gerðabók Náttúrufriðingarnevnd Streymoyar Sýslu ( J.nr. 25/05995-6 )

at:

- Nevndarformaðurin í Náttúrufriðingarnevndini hevur 14. august 2025 tosað við bóndan Sigert Patursson um umsóknina og ætlaninar hjá SEV. Sigert úttalaði, at best hevði verið, um umsóknin frá SEV kom beinanvegin, tá søkt bleiv um at seta HF-antennuna upp á staðnum. Hann helt, at tá tøknihúsið var komið, so mátti eisini streymur veitast hagar. Hann hevði annars einki ímóti ætlanini.
- 14. august sendi nevndarformaðurin í Náttúrufriðingarnevndini teldupost til Búnaðarstovuna og bóndan um ætlaninar at seta trafostøð upp á staðnum við umbøn um at fáa viðmerkingar til ætlanina.
- 18. august tosaði nevndarformaðurin í Náttúrufriðingarnevndini við deildarleiðara, Andrass Holm Arge á Búnaðarstovuni. Eftir at hava tosað um ætlanirnar, upplýsti hann, at Búnaðarstovan einki hevði ímóti ætlanini, tá bóndin longu var kunnaður.

Viðheft skjøl úr byggimálinum 25/05995.

- Byggiloyvi til transformarastøð 29.09.2025
- Afgørelse fra Overfredningsnævnet 28.09.2025
- Útskrift Gerðabók Náttúrufriðingarnevnd Streymoyar sýslu. 9.08.2025
- Uppskot frá SEV til staðseting av trafostøð
- Tekningar og myndir av trafostøð
- Teldupostur til Búnaðarstovuna og bóndan 14.08.2025

**Tilmæli**:
Kommunustjórin mælir býráðnum til umvegis fíggjarnevndina, at leiga lendið frá Búnaðarstovuni í 10 ár, sí sáttmála skjal 25/09219-1

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 743<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 195/26 Sandsølan á Sundi ( Sandship ) : Umsókn um at víðka leiguøki á Sundi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Havnanevndin | 05.05.2026 | 28/26 | 26/03680-5 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 123/26 | 26/03680-5 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 195/26 | 26/03680-5 |

**Upprunin til málið**
Umsókn frá Sandsøluni á Sundi d.f. 9/4-26.

**Lýsing av málinum**
Sandsølan á Sundi, ið leigar uml. 20.000 m² á eystara parti á nýggju útfyllingini á Sundi, søkir í telduposti d.f. 9/4-26 um at víðka verandi leigumál við umleið 4-5.000 m² aftrat.

Felagið ætlar at víðka um goymsluna á Sundi fyri at kunna miðsavna mest møguligt av virkseminum, og hevur tí tørv á størri goymsluøki.

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**
Verandi leigusáttmáli umfatar 20.000 m² á eystara parti av nýggju útfyllingini á Sundi. Leigusáttmálin tók við 28/2-2022 og hevur 10 ára gildistíð, og síðani 6 mánaða uppsagnartíð.

Tórshavnar havn metir, at virksemið hjá Sandsøluni á Sundi hóskar sera væl til økið á Sundi. Sandsølan innflytir sand, skerv o.t. um bryggjukantin á Sundi og skapar harvið inntøkur til Tórshavnar havn frá vøru- og skipagjøldum, júst sum endamálið er við slíkum havnaøkjum.

Tórshavnar kommuna (Brennistøðin) hevur ætlanir um at leiga umleið 13.000 m² í eystara enda á útfyllinigin til skrottviðgerð og -goymslu v.m. Økið til Brennistøðina er lagt og teknað soleiðis, at tað skuldi bera til at víðka leigumálið hjá Sandsøluni eystureftir, um tørvur gjørdist á tí. Tað eru áleið 5.000 m² ímillum núverandi leiguøkið hjá Sandsøluni og ætlaða økið hjá Brennistøðini. Sostatt er pláss fyri, at Sandsølan kann víðka og at Brennistøðin kann fáa ætlaða økið til leigu.

Á økinum, sum Sandsølan ætlar at leiga, er gjørt eitt (stuttíðar) leigumál á 600 m² við JS Vørukoyring (upprunaliga 1000 $m^2$, sum seinni er minkað niður í 600 $m^2$), sum skal brúkast til parkering av lastbilum og bingjum. Neyðugt verður tí at uppsiga hetta leigumálið. Uppsagnartíðin er 1 mánaði. Eisini kann víkjast frá uppsagnartíðini, um økið skal nýtast til annað endamál sambært heildarætlan ella til annað langtíðarleigumál í samsvari við byggisamtyktini fyri økið.

Neyðugt verður at leingja vegatkomuna til eystara part av økinum við umleið 200-250 m.

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd** **Ja ☐** **Nei ☐**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 744<br>Forkvinnunnar merki: |

**Skjøl**
J.Nr. 25/07022-1 : (Verandi) leigusáttmáli við Sandsøluna
J.Nr. 26/03680-1 : Umsókn frá Sandsøluni um at víðkan leigumálið á Sundi
J.Nr. 26/03680-6 : Kortskjal, ið vísir uppskot til víðkan av leiguøkinum
J.Nr. 26/03680-7 : Uppskot til ískoyti til leigusáttmála við Sandsøluna
J.Nr. 26/03680-3 : Teldupostur við støðumynd av økinum, ið KOB ætlar at leiga
J.Nr. 22/05943-2 : Leigusáttmáli við JS Vørukoyring
J.Nr. 26/03680-2 : Teldupostur frá Sandsøluni við uppskoti um ymsar ábøtur
J.Nr. 26/03680-4 : Teldupostur frá Sandsøluni við dronumyndum av økinum

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/léttar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Tilmæli**:
Stjórin í Tórshavnar havn mælir til,

- at verandi leigumál við Sandsøluna á Sundi verður víðkað við uml 5.000 m² sambært kortskjali j.nr. 26/03680-6, og at gjørt verður eitt ískoyti til leigusáttmálan hesum viðvíkjandi sambært uppskot j.nr. 26/03680-7.
- at leigumálið við JS Vørukoyring verður uppsagdur til 1. september 2026.
- at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Havnanevndin 05. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við havnanevndini og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið frá fíggjarnevndini, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 745 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 196/26 Brúksvatn til Stórutjørn

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 08.05.2026 | 63/26 | 26/03494-2 |
| 2 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 124/26 | 26/03494-2 |
| 3 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 196/26 | 26/03494-2 |

**Upprunin til málið**
Í sambandi við útstykkingina á Stórutjørn, er neyðugt, at neyðugt vatntrýst er á brúksvatninum til komandi virksemið. Verandi trýst á ca. 2 bar nøktar ikki tørvin, tí hæddarmunurin millum ovastu lonirnar í útstykkingini og vatnbrunnarnar í Villingardali er einans ca 30 m.

Fyri at nøkta tørvin á vatntrýstinum kann ein nýggj vatnleiðing leggjast frá ovast á Sundsvegnum við vatnbrunnarnar hjá Villingardalsverkinum og oman til útstykkingarnar við Stórutjørn. Henda leiðin er uml. 1700 m long og kostar uml. kr. 11 mió.

Hin loysnin er at staðseta eina pumpustøð á økinum og kostar hetta uml. kr. 1,2 mió.

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| Játtast av: | | |
|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** |
| 6775 | LK67999 | Vatnveiting |

| Játtast á: | | | |
|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** |
| 6775 | | | Brúksvatn til Stórutjørn |

| **Upphædd** |
|---|
| 1.200.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin, býarverkfrøðingurin og leiðarin á vatndeildini mæla til at
- Heimila umsitingini at prosjektera útbjóðingartilfar og at bjóða út arbeiðið í innbodnari lisitatión, sum síðani verður lagt fyri fyri nevndina aftur.
- játta kr. 1.200.000 av løgukarmi LK67999, Vatnveiting, undir konto 6775, Vatnveiting (íløgur), á nýggja verkætlan "Brúksvatn til Stórutjørn".
- beina málið um um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 08. mai 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd og beina málið í býráðið.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 747<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 197/26 Framflytingar fyri roknskaparárið 2025

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 72/26 | 26/02479-1 |
| 2 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 95/26 | 26/02479-1 |
| 3 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 134/26 | 26/02479-1 |
| 4 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 167/26 | 26/02479-1 |
| 5 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 197/26 | 26/02479-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært játtanarreglunum hjá Tórshavnar kommunu verða meir- og minninýtslur fluttar fram til komandi ár. Framflytingar skulu játtast sum eykajáttan í býráðnum, tvs. skulu hava tvær viðgerðir.

Meirnýtsla, sum í mesta lagi kann vera 5% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Meirnýtsla skal vera burtur innan trý ár.

Minninýtsla, sum í mesta lagi kann vera 10% av nettojáttanini, verður flutt til næsta ár. Um serlig viðurskifti gera seg galdandi, og ynski er at flyta meira enn 10% til árið eftir, kann ein umbøn um hetta sendast avvarðandi fyrisitingarstjóra.

**Lýsing av málinum**
Ársroknskapurin fyri 2025 er gjørdur upp, og gjørt er eitt yvirlit yvir rakstrar- og íløgujáttanir at flyta fram til 2026.

Samlaða framflytingin íroknað Tórshavnar Havn er í alt kr. 112,0 mió. Fyri rakstur er upphæddin kr. 24,3 mió. netto og fyri íløgur kr. 87,7 mió.

Tórshavnar havn hevur harumfamt staðfestar meirinntøkur í 2025 á kr. 11,3 mió. Biðið verður um at fáa hesa upphædd framflutta á íløgukarmin P00.

| | Rakstur | Íløgur | Meirinntøkur |
|---|---|---|---|
| TK | 18,1 mió | 5,9 mió | |
| TH | 6,2 mió | 81,8 mió | 11,3 mió |
| **Íalt** | **24,3 mió** | **87,7 mió** | **11,3 mió** |

Samlaða minninýtslan á rakstrarsíðuni fyri Tórshavnar kommunu frároknað Tórshavnar havn er kr. 6,2 mió. kr. Á § 1,2,5,6 og 7 er talan um minninýtslu, í meðan tað á § 3 og 4 er talan um meirnýtslu.

**Lógir, ásetingar o.a.**
**Upplýsingar frá umsitingini**
**Onnur mál**
**Lógir, ásetingar o.a.**

| | Býráðsfundur<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 748 |
|---|---|---|
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Upplýsingar frá umsitingini**
**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**
**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum (set x)**

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☐
Eyka játtan ☒
Lokað verkætlan ☐

| Játtast av: | | | Játtast á: | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| Ymiskar | | Framflutt 2025 | Ymiskar | | Játtan 2026 | | 112,0 mió |
| 7410 | TH | Meirinntøkur | 7475 | TH | Íløgukarmur P00 2026 | | 11,3 mió |

**Tilmæli**:
Stjórnin mælir til at játtað framflyting á 24,3 mió. kr. til rakstur og 87,7 mió. kr. til íløgur. Eisini verður mælt til at staðfestar meirinntøkur hjá Tórshavnar Havn á kr. 11,3 mió verða fluttar á íløgukarmin P00.

Møguligar broytingar í framflytingum koma við til aðru viðgerð.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið til tvær viðgerðir.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Einmælt samtykt við fyrstu viðgerð.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Atkvøtt varð við aðru viðgerð, og varð málið samtykt við tólv atkvøðum fyri, einari atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Jón Kragesteen, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

**Ískoyti:**
Roknskapurin er nú endaligur og staðfest er ein broyting í íløgum.

Samlaða framflytingin fyri íløgur verður 85,1 mió. kr, ein broyting á -2,6 mió. og raksturin verður óbroyttur 24,3 mió. í alt kr. 109,4 mió.

| | Rakstur | Íløgur | Meirinntøkur |
|---|---|---|---|
| TK | 18,1 mió | 3,3 mió | |
| TH | 6,2 mió | 81,8 mió | 11,3 mió |
| **Íalt** | **24,3 mió** | **85,1 mió** | **11,3 mió** |

**Skjøl:**
26/02479-1 - *"Uppskot til broytingar í framfluttum rakstri 2025"*
26/02479-1 - *"Framflyting íløgur 2025, endaligt"*
26/02479-1 - *"Framflyting rakstur 2025, endaligt"*
26/02479-2 - *"Framflyting íløgur 2025"*
26/02479-2 - *"Framflyting rakstur 2025"*

**Tilmæli:**
Stjórnin mælir til at játta framflyting á 24,3 mió kr til rakstur og 85,1 mió. til íløgur, og at staðfestar meirinntøkur hjá Tórshavnar Havn á kr. 11,3 mió verða fluttar á íløgukarmin P00.

Eisini verður mælt til at gera broytingar í rakstrarframflytingini sambært viðlagda broytingarskjali.

Í eykajáttanini av meirinntøkum 2025, mál 25/09786-1, var samtykt at játtað 1,3 mió til spælipláss í viðarlundini (Náttúruspælipláss Amerika) á íløgukontu 3175 Barnaansing. Sambært bygnings- og mentamáladeildini skuldi hendan játtanin heldur verið samtykt á 4175 Dagføring av skúlum. Mælt verður til at flyta játtanina av 3175-LK31999 á 4175-L41019 Skúlar uttanumøkið.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Atkvøtt varð um tilmælið, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, einari atkvøðu ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Tróndur Sigurðsson.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 750<br>Forkvinnunnar merki: |

## 198/26 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2026

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.02.2026 | 48/26 | 26/00100-1 |
| 2 Býráðsfundur | 26.02.2026 | 67/26 | 26/00100-1 |
| 3 Fíggjarnevndin | 17.03.2026 | 73/26 | 26/00100-1 |
| 4 Býráðsfundur | 19.03.2026 | 96/26 | 26/00100-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 99/26 | 26/00100-1 |
| 6 Fíggjarnevndin | 29.04.2026 | 107/26 | 26/00100-1 |
| 7 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 136/26 | 26/00100-1 |
| 8 Býráðsfundur | 05.05.2026 | 169/26 | 26/00100-1 |
| 9 Fíggjarnevndin | 13.05.2026 | 128/26 | 26/00100-1 |
| 10 Fíggjarnevndin | 27.05.2026 | 134/26 | 26/00100-1 |
| 11 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 198/26 | 26/00100-1 |
| 12 Fíggjarnevndin | 10.06.2026 | 155/26 | 26/00100-1 |

**Upprunin til málið**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. §10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna.

**Lýsing av málinum**

**Lógir, ásetingar o.a.**

**Upplýsingar frá umsitingini**

**Onnur mál sum kunnu hava týdning fyri málið**

**Viðmerkingar frá øðrum (t.d. deildum, staðbundnum nevndum og myndugleikum)**

**Leggjast fyri staðbundna nevnd Ja ☐ Nei ☐**

**Skjøl**

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 751 |
| | | Forkvinnunnar merki: |

**Yvirlit yvir avleiðingarnar av uppskotinum** (set x)

| | Fyri Tórshavnar kommunu | Fyri ávís økir í kommununi | Fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|
| **Umsitingaravleiðingar** | | | | |
| **Umhvørvisavleiðingar** | | | | |
| **Møgulig frávik/lættar frá ásetingum** | | | | |
| **Sosialar avleiðingar** | | | | |
| **Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar** | | | | |

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☐ Ja ☐ Nei

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri januar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 18. februar 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 26. februar 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri februar verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 17. mars 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 19. mars 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri mars verður lagt frá á fundinum.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 29. apríl 2026:** Framlagt.

Tróndur Sigurðsson var ikki við í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Útsett.

**Býráðsfundur 05. mai 2026:** Framlagt og góðkent.

**Ískoyti:**
Roknskapurin fyri apríl verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevndin 13. mai 2026:** Útsett.

**Fíggjarnevndin 27. mai 2026:** Framlagt.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Framlagt og góðkent.

| | |
|---|---|
| **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 753 |
| | Forkvinnunnar merki: |

# 199/26 Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 12.01.2026 | 4/26 | 25/11095-1 |
| 2 Fíggjarnevndin | 21.01.2026 | 5/26 | 25/11095-1 |
| 3 Býráðsfundur | 29.01.2026 | 17/26 | 25/11095-1 |
| 4 Tekniska nevnd | 09.03.2026 | 44/26 | 25/11095-1 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2026 | 84/26 | 25/11095-1 |
| 6 Býráðsfundur | 30.04.2026 | 111/26 | 25/11095-1 |
| 7 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 199/26 | 25/11095-1 |

**Upprunin til málið**
Víst verður til mál nr. 25/04088 Innkomuvegur til bygdina og vegin niðan á Garðar og Soylugarðar í Kaldbak.

**Lýsing av málinum**
Ástaðarfundur varð hildin 03.12.2025.

Ynski frá umboðunum úr staðbundnu nevndini er, at farast skal víðari við arbeiðinum at tillaga uttanumøkið við Borgarahúsið.

Fyri at farast kann víðari í viðgerðini av málinum, skal fígging útvegast til arbeiðið, so tað kann bjóðast út.

**Skjøl**
mál nr. 25/04088 Innkomuvegur til bygdina og vegin niðan á Garðar og Soylugarðar í Kaldbak

**Fíggjarligar avleiðingar:** ☒ Ja ☐ Nei

**Játtan:**

Vanlig játtan ☒
Eykajáttan ☐
Loka verkætlan ☐

| **Játtast av:** | | | **Játtast á:** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Deild** | **Verk-ætlan** | **Navn** | **Nýggj verkætlan** | **Upphædd** |
| 8175 | LK81062 | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 8175 | L81062 | | Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak | 1.500.000 |

**Útgreining av fíggjarligum avleiðingum:**

| **Íløgujáttan** | | |
|---|---|---|
| Samlaður kostnaður fyri verkætlanina | Upphædd: | |
| Áður játtað | Upphædd: | |
| Tíðarætlan (byrjan/endi) | Ár: | |
| Árlig avleiðing á rakstur | Upphædd: | |

**Tilmæli**:
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla teknisku nevnd til at:

1) játta kr. 1.500.000 av løgukarmi LK81062, Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak, á nýggja verkætlan L81062, Vegagerð við Borgarahúsið í Kaldbak, undir kontu 8175.
2) beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Tekniska nevnd 12. januar 2026:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at heimila umsitingini at bjóða arbeiðið út.

**Fíggjarnevndin 21. januar 2026:** Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundur 29. januar 2026:** Einmælt samtykt.

**Ískoyti**
Lisitatión varð hildin 25.02.2026 og vóru hesi boð móttikin:

- Andrias Berg, sum ikki gav boð.
- David Nordendal kom við einum tilboði, sum ljóðaði uppá kr. 1.474.521,20 u.mvg. saman við tíðarætlan, hvar avhending er sett til 01.09.2026.
- Frank Hellisdal kom við einum tilboði, sum ljóðaði uppá kr. 1.124.450,40 u.mvg. Frank hevur viðmerkt: Byrja mitt í summar. Her er eingin tíðarætlan við.

Lægsta tilboð gevur sambært lógini um útboð rættin til at samráðast um sáttmála. Løgfrøðilig meting er gjørd, at, manglandi tíðarætlanin sambært útboðstilfarinum, ikki útilokar boðgevaran. Tíðarætlanin hjá tilboðsgevaranum við næstlægsta tilboðnum vísir á eina tíðarætlan upp á uml 5-6 mánaðir, frá tí at arbeiðið byrjar, og verður tað tí mett, at hetta kann viðføra, at økið verður sum byggipláss í ov langa tíð í mun til vavið av verkætlanini.

Út frá eini heildarmeting verður mett at vera rættast, at fara undir samráðingar við tilboðsgevara við lægsta tilboðnum, har viðkomandi skal vísa á eina realistiska tíðarætlan fyri arbeiðið.

**Tilmæli**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at heimila umsitingini:
- at fara undir samráðingar við veitaran við lægra tilboðnum.
- at gera sáttmála við veitaran, treytað av at samráðingarnar koma á mál.

**Tekniska nevnd 09. mars 2026:** Samtykt at taka undir við tilboðnum frá David Nordendal, men við tí treyt, at umsitingin fer í samráðingar við hann um, at arbeiðstíðin skal styttast munandi.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Ískoyti:**
Borgarstjórin hevur biðið um eitt uttanhýsis løgfrøðiligt upprit í málinum.

Uppritið viðger hesi viðurskifti:
1. *um kommunustýrislimir eru bundnir av fyrisitingarrættinum, tá ið avgerðir verða tiknar í kommunustýrinum og í føstum nevndum.*
2. *um kommunan er bundin til at gjøgnumføra og halda seg til sáttmálan við arbeiðstakaran, sum sáttmáli er skrivaður undir við og um endurgjaldsváðar eru fyri kommununa í málinum.*

3. *um kommunustýrislimir kunnu hefta persónliga fyri at kommunan fær fíggjarligan miss vegna avgerðir, sum kommunustýrislimir hava verið við til at taka/samtykkja.*

Uppritið vísur á, at fyrisitingarlógin og meginreglurnar innan fyrisitingarrættin eru galdandi fyri viðgerðina av málum, har myndugleikin hevur ella fer at taka avgerð. Í fyrisitingarrættinum galda harumframt tær meginreglur, sum eitt nú kravið um at ein avgerð skal vera saklig, kravið um grundgeving, kravið um at upplýsa mál til fulnar osfr. Tá ið kommunustýrið ella føst nevnd, sum kommunustýrið hevur heimilað at taka avgerðir, tekur avgerðir mótvegis borgaranum, skulu avgerðirnar/samtyktirnar tískil halda seg til tær vanligu fyrisitingarrættarligu meginreglurnar.

Tá ið kommunan tekur avgerð um at taka av einum tilboði frá einum tilboðsgevara, og gevur einum øðrum tilboðsgevara noktandi svar, er avgerðin fevnd av fyrisitingarrættinum. Um samtyktin ella avgerðin mótvegis borgaranum ikki inniheldur tey krøv, sum eru sambært fyrisitingarrættinum, er vandi fyri, at lýtir eru við avgerðini, sum í ringasta føri kann enda við eini skeivari avgerð og hetta kann møguliga hava við sær endurgjald.

Í uppritinum verður víst á, at nevndarlimirnir í Teknisku nevnd hava fingið málið upplýst frá umsitingini, fingið sakligar grundgevingar fyri tilmælinum um at fara í samráðingar við tilboðgevaran við lægra tilboðnum og heimila umsitingini, at innganga avtalu við tilboðsgevaran. Hóast hetta hevur nevndin samtykt at taka av tilboðnum frá tí, sum hevði hægra tilboðið. Hendan avgerð er tikin uttan at grundgevingarnar ella sakligu atlitini aftanfyri avgerðini eru førd í gerðabókina, og soleiðis sum málið er upplýst, verður mett, at tað ikki eru saklig atlit, sum kunnu grundgeva ítøkiligu avgerðini. Harumframt hevur Tekniska nevnd við at samtykkja at gera avtalu við tilboðsgevaran við hægra tilboðnum, farin útum heimilaðu játtanina, og tað í sær sjálvum er eitt brot á kommunustýrislógina og kann verða tyngjandi í mun til metingina um endurgjald mótvegis kommununi.

Í uppritinum verður mett, at málið ber brá av fleiri løgfrøðiligum avbjóðingum, m.a. kundi útbjóðingarskrivið verið gjøllari í sínum málburi og gjøllari frágingið. Annars verður víst á, at tað er ikki ivi um, at tann eini tilboðsgevarin hevði lægri tilboð enn hin, og at tann tilboðsgevarin, sum endaði við at fáa arbeiðið, hevði eitt tilboð, sum var hægri enn játtanin, ið var tøk til endamálið. Um saklig atlit høvdu verið fyri at tikið av hægra tilboðnum, so hevði hetta undir øllum umstøðum kravt, at kommunustýrið setti størri játtan av til endamálið áðrenn sáttmáli var undirskrivaður.

Í uppritinum verður samanumtikið mett, at tað kann staðfestast, at

1. *kommunustýrislimir eru bundnir av fyrisitingarrættinum, tá ið avgerðir verða tiknar í kommunustýrinum og í føstum nevndum,*
2. *at kommunan er bundin til at gjøgnumføra og halda seg til sáttmálan við arbeiðstakaran, sum sáttmáli er skrivaður undir við, men at endurgjaldsváðar eisini eru fyri kommununa mótvegis tilboðsgevaranum við lægra tilboðnum, og at*
3. *kommunustýrislimir kunnu hefta persónliga fyri fíggjarligan miss, sum kommunan verður fyri vegna avgerðir/samtyktir, sum kommunustýrislimir/nevndarlimir í føstum nevndum hava verið við til samtykkja.*

**Skjal:**

25/11095-17: "*Uttanhýsis løgfrøðiligt upprit um útboð, nevndarviðgerð, játtanarheimild og endurgjaldsábyrgd*"

**Tilmæli:**

At umrøða á fíggjarnevndarfundi.

**Fíggjarnevndin 22. apríl 2026:** Umrøtt.

**Býráðsfundur 30. apríl 2026:** Umrøtt.

**Ískoyti:**
Tróndur Sigurðsson biður um at fáa málið á skrá til komandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Tróndur Sigurðsson skjýtur upp at gera óhefta kanning av málinum, og at umboð fyri hvønn flokk eru við til at orða arbeiðssetning. At leggja til politiska støðutakan aftur.

Atkvøtt varð um broytingaruppskotið, ið varð samtykt við tólv atkvøðum fyri, ongari atkvøðu ímóti og einari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen, Guttormur í Skála, Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Birgir Nielsen, Høgni Vilhelmsen og Annfinn Brekkstein.

Ímóti atkvøddi: Eingin

Blankt atkvøddi: Annita á Fríðriksmørk.

| | | |
|---|---|---|
| | **Býráðsfundur**<br>04. juni 2026 | Blað nr.: 757<br><br>Forkvinnunnar merki: |

# 200/26 Nýtt felagshús til FC Hoyvík og heildarætlan fyri økið - 23/05602

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundur | 27.03.2025 | 92/25 | 25/00153-1 |
| 2 Býráðsfundur | 18.06.2025 | 176/25 | 25/00153-1 |
| 3 Mentamálanevndin | 03.09.2025 | 99/25 | 25/00153-1 |
| 4 Býráðsfundur | 04.06.2026 | 200/26 | 25/00153-1 |

**Býráðsfundur 27. mars 2025:** Málið varð umrøtt, og síðani varð atkvøtt um, hvørt broytingaruppskot skuldi kunna leggjast fram í málinum, og fall hetta við fimm atkvøðum fyri, átta atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Sunnvá Dahl Høgfeldt, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen.

Ímóti atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Guttormur í Skála.

Málið avgreitt við umrøðuni í býráðnum.

**Ískoyti:**
Birgir Nielsen krevur at fáa málið á skrá til býráðsfundin.

**Býráðsfundur 18. juni 2025:** Málið varð umrøtt, og síðani varð atkvøtt um, hvørt broytingaruppskot frá Trónda Sigurðsson um at bjóða lendisarbeiðið út skuldi kunna leggjast fram í málinum, og fall hetta við átta atkvøðum ímóti, fimm atkvøðum fyri og ongari blankara.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Anja Weyhe, Kristianna Winther Poulsen, Bergur Robert Dam Jensen, Hildur Eyðunsdóttir og Guttormur í Skála

Ímóti atkvøddu: Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson, Kári Johansen, Birgir Nielsen og Astrið Breckmann.

Málið endaði tí við umrøðuni í býráðnum.

**Ískoyti:**
Málið verður lagt fyri Mentamálanevndina til umrøðu.

**Tilmæli**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at mentamálanevndin umrøður málið.

**Mentamálanevndin 03. september 2025:** Nevndin samtykti at biðja teknisku fyrisiting koma við tillagingum til næsta fund.

**Ískoyti**
Kári Johansen krevur málið á skrá til fyrstkomandi býráðsfund.

**Býráðsfundur 04. juni 2026:** Borgarstjórin mælir til at beina málið aftur í nevnd, ið varð samtykt við átta atkvøðum fyri, fimm atkvøðum ímóti og ongari blankari atkvøðu.

Fyri atkvøddu: Elsa Berg, Heðin Mortensen, Heidi Lava Elgeirsdóttir, Annita á Fríðriksmørk, Anja Weyhe, Bergur Robert Dam Jensen, Kristianna Winther Poulsen og Guttormur í Skála.

Ímóti atkvøddu: Tróndur Sigurðsson, Súna Mørk, Høgni Vilhelmsen, Birgir Nielsen og Annfinn Brekkstein.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:00**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Elsa Berg | Heðin Mortensen | Heidi Lava Elgeirsdóttir |
| Annita á Fríðriksmørk | Anja Weyhe | Kristianna Winther Poulsen |
| Bergur Robert Dam Jensen | Guttormur í Skála | Annfinn Brekkstein |
| Tróndur Sigurðsson | Høgni Vilhelmsen | Birgir Nielsen |
| | Súna Mørk | |